| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**22. mai 2014** | Blað nr.: 1 |
| | Formansins merki: |

**GERÐABÓK**

**Dato:** 22. mai 2014 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 75/14-126/14

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Olsen
Rúni Djurhuus

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Ingunn Eiriksdóttir

**LUTTÓKU IKKI:**
Sigrún Mohr, ið hevur farloyvi

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

## 82/14 Uppsamlingsmál ár 2014 : Býráðslimir - farloyvi 14 dagar ella meir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 82/14 | 14/00934-9 |

**Málslýsing:**
Sigrún Mohr hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rúni Djurhuus, eru loknar.

**Býráðið 22. mai 2014:** Samtykt.

# 83/14 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 8/14 | 14/01236-1 |
| 2 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 30/14 | 14/01236-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.03.2014 | 48/14 | 14/01236-1 |
| 4 Býráðsfundir | 27.03.2014 | 52/14 | 14/01236-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 111/14 | 14/01236-1 |
| 6 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 83/14 | 14/01236-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 04. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 27. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mars og apríl 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 22. mai 2014:** Framlagt og góðkent.

# 84/14 Meirinntøkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 114/14 | 14/02981-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 84/14 | 14/02981-1 |

**Málslýsing:**
Í ársroknskapinum 2013 kann staðfestast at inntøkurnar í sambandi við skattir og avgjøld er góðar 23 mió. kr. hægri enn mett í fíggjarætlanini.

Mælt verður til, at meirinntøkurnar verða brúktar til fígging soleiðis:

Fyri at arbeiði at skriva Havnar Søgu kann halda fram, verður mælt til at játta 1 mió. kr. til Søvn og mentanararv.

Kommunan tapti eitt sakarmál, sum kostar kommununi uml. 1,5 mió. kr. Mælt verður til at játta 1,5 mió. kr. til konto 20910 aðrar útreiðslur.

Eftir ætlan yvirtekur TK eldraøkið 1. Januar 2015. Fyrireikingararbeiðið í samband við yvirtøkuna er fari í gongd. Staðfestast kann longu nú, at rættuliga nógv fyrireikandi arbeiði skal gerast á ávikavist starvsfólka, fíggjar- og KT-deildini, umframt á trivnaðarfyrisitingini, um yvirtøkan av eldraøkinum skal verða væleydnað. Til at fremja fyrireikandi arbeiði, er neyðugt við starvsfólkaressoursum, sum deildirnar ikki hava í dag. Mælt verður til at játta 1 mió. kr. til starvsfólk í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum. 500 t.kr. til 1311 miðfyrisiting 250 t.kr. til 1314 Kunningartøkni og 460 t.kr til 1312 Trivnaðarfyrisitingina.

Býráði samtykti tann 30. Mai 2013 at fíggja keyp av bygningi til umsitingina við m.a. sølu av ognum. Vegna væntandi søluinntøkur er konta 6175 keyp og søla í undirskoti. Mælt verður til at 19,5 mió. kr. vera brúktar til at fíggja ein part av undirskotinum.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt

# 85/14 Framfluttar játtanir 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.03.2014 | 84/14 | 14/02176-1 |
| 2 Býráðsfundir | 27.03.2014 | 56/14 | 14/02176-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 85/14 | 14/02176-1 |

Málslýsing:

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at roknskapurin fyri 2013 verður gjørdur upp, verður eisini gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2014.

Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum.

Yvirlitið saman við ynsktum broytingum verður lagt fram saman við fyribils roknskapinum fyri 2013.

Ynsktu broytingar í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini 2014:

**Tekniska nevnd:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7610 Parkeringsskipanin | 700.000 | 8210 Gøtuljós | 300.000 |
| | | 8111 Reinhald | 400.000 |
| **Tilsamans** | **700.000** | | **700.000** |

Um kr. 790.000 eru tøkar við árskifti á 3215, so skal hetta nýtast til framhald av frítíðarskúlatilboðum til 3. flokk í 2014. Upphæddin er ikki røk

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting á t.kr. 18.874 netto, til rakstur og t.kr. 137.198, netto, til íløgur. Umframt at taka undir við tilmælinum um broyting.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 27. mars 2014:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 86/14 Ferðslutrupulleikar á Karlamagnusarbreyt og síðugøtunum til Myllutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.03.2014 | 31/14 | 14/00399-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.03.2014 | 69/14 | 14/00399-2 |
| 3 Býráðsfundir | 27.03.2014 | 58/14 | 14/00399-2 |
| 4 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 86/14 | 14/00399-2 |

## Lýsing av málinum - samandráttur:

Nú bygging er byrjað, og alsamt størri ferðsla er at staðfesta á Karlamagnusarbreyt, hava borgarar og eigarafelag vent sær til kommununa við fráboðan um ótryggleikan á vegastrekkinum millum Kirkjustræti og Atlagøtu. Víst hevur verið á, at eingin gongubreyt er fram við gøtuni og at ljósviðurskiftini ikki eru nøktandi.

Karlamagnusarbreyt er ætlað at verða ein handilsgøta og tá bygt er fult út á økinum, er ætlanin sambært uppruna prosjektinum, at belegningurin á gøtuni skal verða við flísum og chaussesteinum. Upprunaliga prosjektið ásetti eisini, at við afturkanti á gongubreyt skuldi stoypast stuðlamúrur, soleiðis at vegkassin og veitingarnar vóru tryggjað. Arbeiðið av at gera Karlamagnusarbreyt og tær 3 síðugøturnar til Myllutjørn er avhendað kommununi og staðfestast kann, at nakrir manglar eru at gera í hesum sambandi. Her er einamest talan um viðurskifti, sum bygginevndin avgjørdi at spara burtur ella bíða við.

Fyri at gera ferðslutrygdarviðurskiftini á økinum betur, áðrenn endaliga loysnin verður framd um nøkur ár, tá meira er bygt økinum, verður mælt til aðra av hesum loysnum:

1. at leggja spigma-kantsteinar har, sum tað í dag er staðsett ein breið hvít vognbanalinja, umframt at asfaltera part av gongubreyt - t.d. 1 m - fram við strekkinum millum Kirkjustræti og Atlagøtu.
2. at gera stuðlamúrarnar við afturkant av gongubreyt í ávísum økjum við størri hæddarmuni, sambært upprunaliga prosjektinum. Á tann hátt ber til at fáa alla gongubreytina ca. 1,5 m asfalteraða og samstundis tryggja, at einki tilfar ríðir undan vegnum. Tað fyriliggur eingin fíggjarlig meting av hesum uppskoti.

Í báðum førum er talan um eina broyting í mun til upprunaliga verkætlanina og raðfylgjuna av liðugtgerðini.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Mett verður, at samlaði kostnaður fyri arbeiðið sambært loysn nr. 1 liggur um ca. ½ mió. kr. (sí j. nr. 2013-2995/1).

Tað fyriliggur eingin fíggjarlig meting av loysn nr. 2.

Prísásetingin fyri grundøkini við Karlamagnussarbreyt er útroknað við støði í lidnu verkætlanini, og verður liðugtgerðin sostatt fíggja av tí sølupeningi sum kemur inn, so hvørt sum grundøkini verða seld.

Tekniska nevnd skal taka støðu til um farast skal undir at gera neyðugu ábøturnar at dagføra projektið av vegarbeiðinum av Karlamagnusarbreyt við síðugøtum við atliti til at betra um trygdina á gongubreytunum og ljósviðurskiftini, meðan fíggjarnevndin og býráðið skulu takað støðu til framhald av arbeiðinum, broyttu raðfylgjuna av liðugtgerðini og fíggingarleistin

Umsitingin greiðir frá gongdini í málinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at farið verður undir at dagføra verkætlanina av Karlamagnusarbreyt sambært omanfyri standandi uppskoti nr. 1 ella 2, og at fáa til vega útbjóðingartilfar, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina, at taka støðu til framhald av arbeiðinum, broyttu raðfylgjuna av liðugtgerðini og til fíggingarleistin.

## Lýsing av málinum - samandráttur:

Nú bygging er byrjað, og alsamt størri ferðsla er at staðfesta á Karlamagnusarbreyt, hava borgarar og eigarafelag vent sær til kommununa við fráboðan um ótryggleikan á vegastrekkinum millum Kirkjustræti og Atlagøtu. Víst hevur verið á, at eingin gongubreyt er fram við gøtuni og at ljósviðurskiftini ikki eru nøktandi.

Karlamagnusarbreyt er ætlað at verða ein handilsgøta og tá bygt er fult út á økinum, er ætlanin sambært uppruna prosjektinum, at belegningurin á gøtuni skal verða við flísum og chaussesteinum. Upprunaliga prosjektið ásetti eisini, at við afturkanti á gongubreyt skuldi stoypast stuðlamúrur, soleiðis at vegkassin og veitingarnar vóru tryggjað. Arbeiðið av at gera Karlamagnusarbreyt og tær 3 síðugøturnar til Myllutjørn er avhendað kommununi og staðfestast kann, at nakrir manglar eru at gera í hesum sambandi. Her er einamest talan um viðurskifti, sum bygginevndin avgjørdi at spara burtur ella bíða við.

Fyri at gera ferðslutrygdarviðurskiftini á økinum betur, áðrenn endaliga loysnin verður framd um nøkur ár, tá meira er bygt økinum, verður mælt til aðra av hesum loysnum:

3. at leggja spigma-kantsteinar har, sum tað í dag er staðsett ein breið hvít vognbanalinja, umframt at asfaltera part av gongubreyt - t.d. 1 m - fram við strekkinum millum Kirkjustræti og Atlagøtu.
4. at gera stuðlamúrarnar við afturkant av gongubreyt í ávísum økjum við størri hæddarmuni, sambært upprunaliga prosjektinum. Á tann hátt ber til at fáa alla gongubreytina ca. 1,5 m asfalteraða og samstundis tryggja, at einki tilfar ríðir undan vegnum. Tað fyriliggur eingin fíggjarlig meting av hesum uppskoti.

Í báðum førum er talan um eina broyting í mun til upprunaliga verkætlanina og raðfylgjuna av liðugtgerðini.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Mett verður, at samlaði kostnaður fyri arbeiðið sambært loysn nr. 1 liggur um ca. ½ mió. kr. (sí j. nr. 2013-2995/1).

Tað fyriliggur eingin fíggjarlig meting av loysn nr. 2.

Prísásetingin fyri grundøkini við Karlamagnussarbreyt er útroknað við støði í lidnu verkætlanini, og verður liðugtgerðin sostatt fíggja av tí sølupeningi sum kemur inn, so hvørt sum grundøkini verða seld.

Tekniska nevnd skal taka støðu til um farast skal undir at gera neyðugu ábøturnar at dagføra projektið av vegarbeiðinum av Karlamagnusarbreyt við síðugøtum við atliti til at betra um trygdina á gongubreytunum og ljósviðurskiftini, meðan fíggjarnevndin og býráðið skulu takað støðu til framhald av arbeiðinum, broyttu raðfylgjuna av liðugtgerðini og fíggingarleistin

Umsitingin greiðir frá gongdini í málinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at farið verður undir at dagføra verkætlanina av Karlamagnusarbreyt sambært omanfyri standandi uppskoti nr. 1 ella 2, og at fáa til vega útbjóðingartilfar, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina, at taka støðu til framhald av arbeiðinum, broyttu raðfylgjuna av liðugtgerðini og til fíggingarleistin.

**Tekniska nevnd 13. mars 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at dagføra alla Karlamagnusarbreyt sambært uppskoti 1 og 2 og at beina málið viðvíkjandi fígging, um fíggjarnevndina, í býráðið.

Somuleiðis heitir nevndin á mentamálanevndina um at útvega fígging til liðugtgerð av atkomuvegi og parkeringsøki við Skúlan við Løgmannabreyt og Hoyvíkar skúla við atliti til ferðslutrygdina.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Samtykt at taka undir tilmælinum at dagføra alla Karlamagnusarbreyt sambært uppskoti 1 og 2 og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 27. mars 2014:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 87/14 Skúlabygnaður og og skúlabygging í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.02.2014 | 1/14 | 14/00423-46 |
| 2 Býráðsfundir | 30.01.2014 | 24/14 | 14/00423-46 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 14/14 | 14/00423-46 |
| 4 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 35/14 | 14/00423-46 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 71/14 | 14/00423-46 |
| 6 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 108/14 | 14/00423-46 |
| 7 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 87/14 | 14/00423-46 |

**Málslýsing:**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Í álitinum Fólkaskúlin í Tórshavnar kommunu árini 2012-2021 verður skúlabygnaðurin í kommununi viðgjørdur. Skúlabygnaðurin í kommununi hevur avgerandi ávirkan á bæði íløgutørvin í verandi og nýggjar skúlar og á raksturin, serstakliga tímajáttanina til einstaka skúlan.

Skúlabygnaðurin hevur eisini avgerandi ávirkan á, hvussu undirvísingin kann skipast bæði í mun til lærugreinir, næmingar, lærarar osfr. Tað hevur í hesum sambandi stóran týdning, at skúlabygnaðurin er so skipaður, at hann stuðlar sum best undir undirvísingarliga virksemið og harvið mennir fakliga stigið.

Í álitinum er ein røð av tilmælum, sum fevna um skúlabygnaðin í allari kommununi, og sum byggja á ymisk atlit og fortreytir, ið mett verður hava størst týdning. Talan er um uppskot til ein samanhangandi bygnað, sum tí hevur ávirkan og avleiðingar fyri flest allar skúlarnar í kommununi. Samsvarandi uppskotinum um nýggja bygnaðinum setur uppskotið harumframt út í kortið, hvørjar íløgur skulu gerast komandi árini.

Størsta uppskotið er at byggja nýggjan Vesturskúla og í hesum sambandi niðurleggja Venjingarskúlan og Kommunuskúlan, og at Nám X verður sjálvstøðugur miðbýarskúli. Onnur høvuðsbroyting er at skipa forskúla í

øllum skúlum. Ein triðja høvuðsbroyting er, at skúlaskiftið verður at fylgja býtinum grunddeild (1.-3. fl.), miðdeild (4.-6. fl.) og hádeild (7.-9. fl.).

Í fólkaskúlalógini § 32 er ásett, at ein skúlabygnaður skal verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi. Sambært § 47, stk. 6 ger kommunustýrið uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum, og sambært § 52, stk. 4 viðger skúlastýrið saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum. Í teimum kommunum, har tvey ella fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk at viðgera uppskot um skúlabygnað.

Álitið um nýggjan skúlabygnað deils fyri kommununa sum heild, deils fyri einstaka skúlan, verður nú at leggja fyri skúlastýrini, og settur verður arbeiðsbólkur, har kommunan og tey 11 skúlastýrini í kommununi eru umboðað. Úrslitið av hesum verður so aftur at leggja fyri nevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at álitið verður at leggja fyri skúlastýrini, og at settur verður arbeiðsbólkur umboðandi øll skúlastýri og kommununa at viðgera bygnaðaruppskotið.

**Mentamálanevndin 18. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 18. apríl 2012:** Kunnað varð um niðurstøður frá arbeiðsbólkinum, sum hevur viðgjørt álitið um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021

**Ískoyti:**
Við støði í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingunum frá arbeiðsbólkinum umboðandi skúlastýrini, hevur annar arbeiðsbólkur nú útgreinað eitt konsept fyri nýggjum Vesturskúla (sí máltal 2012-1064). Arbeiðið er fyrsta stigið í fyrireikingunum at byggja henda skúlabygning.

Í nevndu ætlan er Vesturskúlin ein trý-sporaður skúli við forskúla og frítíðarskúla, og sostatt í samsvari við bygnaðin og skúlatilboðini, sum skotin verða upp í álitinum. Trý-sporaði Vesturskúlin er saman við ætlanini at flyta Nám X úr Eysturskúlanum høvuðsfortreyt fyri, at til ber at skipa skúlabygnaðinum fyri alla kommununa eftir uppskotinum í álitinum.

Vísandi til ætlanina at byggja Vesturskúlan (máltal 2012-1064) verður mett neyðugt við politiskari støðutakan til høvuðslinjurnar í uppskotinum til nýggja skúlabygnað fyri alla kommununa.

Hesar høvuðslinjur eru:
- At talið av sporum í høvuðsstaðarskúlunum í hádeild (7.-9. flokk) verður 14
- At Venjingarskúlin og Kommunuskúlin leggja saman í trý-sporaðan Vesturskúla
- At Skúlin á Argjahamri, Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt verða tvey-sporaðir skúlar 1.-9. flokk
- At Eysturskúlin verður tvey-sporaður 1.-6. flokk og fimm-sporaður 7.-9. flokk
- At Sankta Frans skúli verður tvey-sporaður 1.-6. flokk
- At næmingar úr Sankta Frans skúla, Nólsoyar skúla, Velbastaðar skúla, Kaldbaks skúla og Kollafjarðar skúla flyta í 7. flokk í Eysturskúlan
- At Nám X flytur úr Eysturskúlanum

Uppskotið um at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum hongur ikki saman við skúlabygnaðinum, men er mál um skipan av skúlatilboðum.

Landsstýrið skal sambært fólkaskúlalógini § 57, stk. 5 góðkenna skúlabygnað kommununnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja uppskotið til skúlabygnað fyri alla kommununa samsvarandi høvuðslinjunum omanfyri.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið og til kunningar í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Kunnað varð um málið

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í skrivi dagf. 19. februar 2013 boðar Mentamálaráðið frá, at Mentamálaráðið góðkennir ikki uppskotið til nýggjan skúlabygnað fyri Tórshavnar kommunu.

Í skrivinum verður víst á, at Mentamálaráðið arbeiðir við broytingum í fólkaskúlabygnaðinum, so at tímar í størri mun verða tillutaði til skúlaøki. Á henda hátt metir Mentamálaráðið, at tað ber til at tillaga fólkaskúlabygnaðin til tey ávísu økini, sum síðan sjálv gera av, í hvørjum hølum undirvíst verður.

Mentamálaráðið hevur ætlanir um at seta eina royndarskipan í verk, har tímatillutanin verður lagað eftir næmingatalinum í hvørjum árgangi. Ætlanin er framhaldandi, at kommunurnar sjálvar skulu gera av, hvørjir skúlabygningar skulu brúkast, men hetta má vera í tráð við fíggjarviðurskifti landsins, og í tráð við hvussu nógvir næmingar eru. Mentamálaráðið vil fegið samstarva við Tórshavnar kommunu viðvíkjandi skúlabygnaðinum í framtíðini og er altíð til reiðar at umrøða spurningin nærri.

Meðan omanfyri nevnda serliga snýr seg um tímajáttanina frá Mentamálaráðnum til skúlarnar, er skúlabygnaðurin eisini tengdur at íløguætlanini hjá kommununi í mun til tørv á skúlabygging og dagføring. Fundir hava verið við skúlastýri serliga í mun til støðuna hjá Venjingarskúlanum, Tórshavnar kommunuskúla og Sankta Frans skúla.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at fáa til vega eina verkætlanar- og tørvslýsing fyri ein miðbýarskúla og Vesturskúla og heita á býráðið um fíggjarnevndina at játta kr. 1.000.000 av kontu 4176 verkætlan L41012 Vesturskúli fyrireiking.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Tróndur Sigurðsson, taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av konto 4176, verkætlan L41012 Vesturskúli fyrireiking, at fáa til vega eina tørvslýsing fyri ein miðbýarskúla og Vesturskúla. Umsitingin fær til vega tørvslýsingina í samráð við mentamálanevndina, ið verður at leggja fyri býráðið í seinasta lagi 15. september 2013.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 26. juni 2013.

- Ávegis tørvslýsing verður løgd fram.

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Málið umrøtt. Tørvslýsing verður latin nevndini til víðari viðgerð 15. september 2013.

**Ískoyti:**
Tørvslýsing við heitinum *Skúlabygnaður og skúlabygningar – Tørvslýsing miðstaðarøkið* verður løgd fram at viðgera.

**Mentamálanevndin 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskoti 4 í tørvslýsingini, og at heita á umsitingina um at útgreina bygnað og bygging í mun til ymsu skipanirnar, kostnað, verkseting og tíðarætlan, at leggja fyri nevndina aftur skjótast.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2013:** Útgreiningin varð løgd fram. Málið útsett til næsta fund.

**Mentamálanevndin 6. november 2013:** Útsett.

**Mentamálanevndin 10. desember 2013:** Samtykt at heita á umsitingina um tilmæli til arbeiðssetning, har arbeiðsbólkur verður settur at gera uppskot til samskipan og/ella samanlegging av Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum, herundir leiðsluviður-skifti, undirvísing, bygningar v.m. at leggja aftur fyri nevdina á næsta fundi.

- Uppskot til arbeiðsbólk og arbeiðssetning verður lagt fram.

**Ískoyti:**
Í sambandi við uppskotið at byggja nýggjan skúla í vesturbýnum, varð mælt til, at Venjingarskúlin og Kommunuskúlin verða lagdir saman og flyta í henda nýggja skúlan.

Við støði í, at høvuðsstaðarøkið frameftir væntast at hava 12 spor 1.-7. flokk og 13 spor 8.-9. flokk, verður talan um at lækka samlaða talið av sporum við tveimum í mun til bygnaðin í dag. Sum fortreyt fyri hesum liggur eisini ein betri gagnnýtsla av høliskapasiteti í Skúlanum á Argjahamri.

Nýggi skúlin verður tí væntandi tveysporaður 1.-7. flokk og fýrasporaður 8.-9. flokk, har tey bæði eykasporini í framhaldsdeildini eru flokkar úr Sankta Frans skúla. Harumframt skal forskúli og frítíðarskúli verða partur av bygninginum. Atlit eigur at takast til, at til ber at byggja skúlan út seinni.

Eingin endalig tíðarætlan fyriliggur fyri nýggjum skúla. Eingin endalig avgerð er heldur tikin um talið av sporum, men mett verður neyðugt at fyrireika tilgongdina at samskipa undirvísingarvirksemið hjá báðum skúlunum longu nú, herundir næmingatilgongdina, eins og at fyrireika eina bygnaðarliga samanlegging.

Settur verður tí arbeiðsbólkur at gera uppskot til samskipan og/ella samanlegging av Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum.

**Tilmæli:**
Arbeiðsbólkurin skal:

1. Gera uppskot til bygnaðarliga samskipan og/ella samanlegging av skúlunum báðum sum liður í ætlanini um nýggjan skúla, herundir tíðarætlan og meting um fyrimunir og vansar.

2. Gera uppskot til samskipan av øllum undirvísingarvirkseminum hjá skúlunum báðum í verandi virknu høliskørmum við denti á at savna ymsu floksstigini, og at ætlaði nýggi skúlin verður at hava tvey færri spor enn skúlarnir samlað av hava í dag, herundir tíðarætlan.

Arbeiðsbólkurin skal verða liðugur lata uppskot 2. mai 2014.

Arbeiðsbólkurin verður mannaður soleiðis:

- Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Venjingarskúlanum
- Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri lærararnar í Venjingarskúlanum
- Eitt umboð fyri lærararnar í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Venjingarskúlanum
- Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri mentamáladeildina, sum samstundis verður skrivari
- Trivnaðarstjórin, sum samstundis er formaður

**Mentamálanevndin 8. januar 2013:** Samtykt at taka undir við arbeiðssetninginum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 30. januar 2014:** Málið beint í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 6. februar 2014:** Samtykt at seta arbeiðsbólk, sum skal:

Gera uppskot til bygnaðarliga samskipan og/ella samanlegging av skúlunum báðum sum liður í ætlanini um nýggjan skúla, herundir tíðarætlan.

Gera uppskot til samskipan av øllum undirvísingarvirkseminum hjá skúlunum báðum í verandi virknu høliskørmum við denti á at savna ymsu floksstigini, og at ætlaði nýggi skúlin verður at hava tvey færri spor enn skúlarnir samlað av hava í dag, herundir tíðarætlan.

Arbeiðsbólkurin skal lata uppskot í seinasta lagi 15. mai 2014.
Arbeiðsbólkurin verður mannaður soleiðis:
Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Venjingarskúlanum
Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Kommunuskúlanum
Eitt umboð fyri lærararnar í Venjingarskúlanum
Eitt umboð fyri lærararnar í Kommunuskúlanum
Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Venjingarskúlanum
Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Kommunuskúlanum
Eitt umboð fyri mentamáladeildina, sum samstundis verður skrivari
Trivnaðarstjórin, sum samstundis er formaður 2

Harumframt samtykti nevndin, at bygginevndin fyri nýggjum Vesturskúla beinanvegin fer undir neyðugu fyrireikingarnar at byggja tvey sporaðan skúla, sum skal kunna víðkast til trísporaðan skúla.

Nevndin samtykti eisini, at Kommunuskúlin verður mentanar- og virksemishús, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini viðvíkjandi arbeiðsbólkinum og arbeiðinum hjá bygginevndini fyri Vesturskúlan og at beina málið í byráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Samtykt við 12 atvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við fíggjarnevndini um vesturskúlan og at arbeitt verður víðari við tilmælinum hjá mentamálanevdnini um at kommunuskúlin verður mentunar- og virksemishús.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu: Elin Lindenskov .

**Ískoyti:**
Skúlaumboðini í arbeiðsbólkinum, sum viðgerð samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum, vísa á, at tað er órealistiskt og skúlapolitiskt ein vánalig loysn at leggja skúlarnar saman at minka heilt niður í tvey spor, tí notat dagfest 31. mars 2014. Skúlaumboðini mæla tí staðiliga til nýggja viðgerð soleiðis, at nýggi Vesturskúlin verður trý-sporaður.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin samtykti at broyta arbeiðssetningin soleiðis, at Vesturskúlin er trý spor í lægru floksstigunum og fimm í framhaldsdeildini, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

[Lagre]

# 88/14 Articon : Ætlan av um- og útbygging av Hotel Hafnia matr. nr. 89a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 108/14 | 14/00514-13 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 88/14 | 14/00514-13 |

## Umsókn frá MAP arkitektar, vegna Hotel Hafnia, um byggiloyvi til nýggjan hotelbygning

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Við umsókn, dagfest 01.05.2013, søkja MAP arkitektar, vegna Hotel Hafnia, um byggiloyvi til nýggjan hotelbygning har partur av verandi Hotellinum er.

Í umsóknini verður m.a. sagt, at tað loysir seg ikki longur at pjøssa uppá tann gamla partin av hotellinum, har partar eru eldri enn fimti ár. Krøvini eru nógv broytt og niðurstøðan er, at best er at taka tann elsta partin av gistingarhúsinum niður og byggja nýtt, lítið størri enn ídag.

Umframt at fáa betri og fleiri kømur, ber til at umskipa gistingarhúsið til eitt nýmótans hotell við øllum hentleikum sum krevjast í dag. Ætlanin leggur upp til at flyta matstovu og køkin niður á veghædd, so tað er lætt bæði fyri gestir og havnarfólk at vitja frálíku matstovuna á Hafnia. Øll niðasta hædd verður ein opin og livandi framsíða, sum skal hýsa hotelvirksemi. Hetta fer at gera Áarvegin enn meira livandi enn í dag.
Á ovastu hædd verður eitt nýtt Panorama, sum avloysari fyri verandi Parnass og Panorama. Eftir ætlan skal tað nýggja Panorama kunna hýsa einum 150 gestum, sum hava eitt einastandandi útsýni yvir býin.

Ætlanin er at økja talið av hotelkømrum við 19 til 76, harav tey 48 eru nýggj rúmlig dupultkømur við rúmligum vesum. Tilsamans verða 12 einkultmanskømur, 2 svitur og 55 dupultmanskømur. Íalt 126 sengur, við eyka uppreiðing ber til hýsa 180 gistandi.

Samlaða fermetratalið er í dag 3.298m², og eftir um- og tilbyggingina verður samlaða fermetratalið 3.415m², ella eitt sindur meira.

Hæddin á bygninginum verður góðar 24 metrar, sum er 75 cm hægri enn verandi bygningur.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í serstøku byggisamtyktini nr. 5, økið millum Áarvegin, Húsabrúgv og Bringsnagøtu.

Í grein 5 stk. b er ásett, at: *Innan økið kann bert verða umbygt og bygt afturat eftir heildarbyggiskipanum, ið eru góðkendar av býráðnum.*

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Vísandi til ásetingarnar í serstøku byggisamtyktini, er í fyrstu atløgu talan um at fáa eina heildarbyggiskipan góðkenda av býráðnum, sum vísir stødd, staðseting, hædd, útsjónd o.a.
Tilfarið, sum umsøkjarin hevur latið inn, kemur at verða grundarlagið fyri eini heildarbyggiskipan, sum verður at leggja fyri býráðið.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Tað er, sum er, torført at meta um ætlanin fær fíggjarligar avleiðingarnar fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Er ikki sent øðrum deildum enn.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Er ikki sent øðrum myndugleikum enn.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j.nr. 2013-1803/5 og 6.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til, at umsitingin, saman við umsøkjaranum, ger uppskot til heildarbyggiskipan fyri økið, at leggja fyri býráðið.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tann 6. mars 2014 fær kommunan enn einaferð tekningar av eini nýggjari ætlan viðvíkjandi um- og útbyggingum av Hotel Hafnia. Í hesum sambandi hava teir keypt ogninar matr. nr. 86 og 87 umframt nakrar av teimum smáu matrikklunum hinumegin Húsabrúgv ímóti ognini hjá Havnar kirkju. Hesar smáu matrikklar ynskir Hafnia at lata kommununi, samstundis sum kommunan letur ein geira, sum er vístur við grønum. Hetta er eisini á skrá til henda fundin og hevur j. nr. 14/02150.
18. mars er aftur fundur við MAP Arkitektar um heildarbyggiskipanina, og nú 9. apríl er hon so mikið klár, at hon saman við frágreiðing og dagførdum tekningum kann leggjast fyri Teknisku nevnd til góðkenningar.

Ætlanin er at fara undir ein part av verkætlanini í ár, sí viðheftu frágreiðing og tekningar.
Heildarbyggiskipanin er send Fornminnissavninum til ummælis.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at góðkenna heildarbyggiskipanina at leggja fyri býráðið til fundin tann 15. mai, saman við møguligum viðmerkingum frá Fornminnissavninum.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 89/14 Hotel Hafnia : Umsókn um makaskifti av lendi litra y við lendi hjá Hafnia í sambandi við útbygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.03.2014 | 85/14 | 14/02150-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 87/14 | 14/02150-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 153/14 | 14/02150-2 |
| 4 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 89/14 | 14/02150-2 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Hotel Hafnia hevur ætlanir um at um- og útbyggja hotellið í miðbýnum í Tórshavn.

Sum lið í hesum ætlanum hevur Hotel Hafnia keypt matr.nr.85,86 og 95, 96, 99 og 100. Í samband við ætlaðu um- og útbyggingina hevur Hotel Hafnia áhuga í matriklinum litra Y, sum Tórshavnar Kommuna eigur, og sum liggur mitt í økinum hjá Hotel Hafnia.

Á matr. 95 er ein ástandandi hjallur, sum Hotel Hafnia ætlar at brúka. Hinvegin er Hotel Hafnia áhugað í at skifta um matr. 96, 99 og 100 við matr. "litra Y", og søkt verður tí Tórshavnar Kommunu um hetta makaskiftið. Um umsóknin verður gingin á møti, verður eisini søkt um samanlegging av matr.nr. 85, 86 og litra Y. Við hesum makaskiftið fær Hotel Hafnia møguleika at fremja ætlaðu um - og útbyggingina av hotellinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla til at taka undir við makaskiftinum soleiðis, at kommunan letur Hotel Hafnia litra Y, ið er til víddar 70 m² treytað av, at kommunan fær matr. nr. 96, 99 og 100, ið eru til víddar ávikavist 6, 5 og 11 m², íalt 22 m² og treytað av, at Hotel Hafnia rindar kr. 1.000/m² fyri munin millum 22 m² og 70 m², íalt kr. 48.000.

Málið beint í teknisku nevnd við atliti til at avgreiða teknisku og matrikuleru viðurskiftini.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti :**
Ongar tekniskar bindingar eru á økinum matr 85-86 og litra Y í sambandi við samanlegging av matriklinum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við fíggjarnevndini 19. mars 2014, og mæla til at taka undir við makaskiftinum.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 90/14 Umsókn frá Havnar Judofelag og Borðtennisfelagnum Tór viðvíkjandi venjingarumstøðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 18/14 | 14/00737-6 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 63/14 | 14/00737-6 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 116/14 | 14/00737-6 |
| 4 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 90/14 | 14/00737-6 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar kommuna yvirtók Badmintonhøllina frá Badmintonfelagnum í Havn 1. januar 2008. Í skrivi, dagfest 4. oktober 2008, heittu Havnar Judofelag og Borðtennisfelagið TÓR á Tórshavnar kommunu um at taka hølisviðurskifti og venjingarumstøður teirra við í ætlanirnar fyri Badmintonhøllina, um høllin skuldi umvælast ella umbyggjast.

Feløgini vístu á møguleikan at byggja eina lon, 326 $m^2$, við borðtennishøll, judohøll, felagshøli, goymslu og skrivstovu aftur at Badmintonhøllini norðanfyri. Byggifrøðingur hevði gjørt skitsutekningar og kostnaðarætlan fyri hesa loysn, og í oktober 2012 fekk kommunan skitsutekningar og kostnaðarætlan, dagfestar 10.01.2011. Kostnaðurin varð mettur til kr. 5.662.225,50 u/ mvg.

Í skrivi 13. september 2013 venda Borðtennisfelagið Tór og Havnar Judofelag sær aftur til Tórshavnar kommunu við áheitan um eina varandi loysn á hølis- og venjingarumstøðunum. Tey vísa til fyrra skrivið, tekningar og kostnaðarætlan, sum tey hava sent kommununi. Í hesum skrivi stendur m.a.: ” Í verandi støðu venja vit í fimleikahallum - (á nýggjum borðum við vælvild frá Tórshavnar Kommunu, skal viðmerkjast) - men ynski okkara er ein varandi loysn, har ítróttur og sosiala arbeiðið í ítróttarfeløgum smelta saman.”

Á fundi 14. januar 2104 vísa feløgini aftur á umsóknina. Eingi játtan er sett av til endamálið á samtyktu íløguætlanini fyri 2014. Tó verður mett viðkomandi at viðgera loysnina um eina felags ella kombihøll fyri badminton, borðtennis og judo í verandi Badmintonhøll og uppskotinum um útbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til prinsippiella viðgerð.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at útvega kostnaðarmeting fyri ætlanina.

**Ískoyti:**
Sambært endurskoðaðu íløguætlanini fyri 2014 eru settar av kr. 7 mió av til at byggja út Badmintonhøllina til eisini at vera høll til judo og borðtennis.

Avvarðandi feløg hava latið gera skitsutekningar fyri hesa útbygging, men gerast skal prosjekttilfar sum grundarlag fyri politiskari góðkenning og fyri útbjóðing.

Um farið verður undir at byggja høllina út eigur eisini at verða umhugsað, hvørt gomlu umklæðingarrúmini skulu dagførast, tá nýtslan væntast at vaksa.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimilað umsitingini at fáa til vega útbjóðingartilfar við kostnaðarmeting at byggja út Badmintonhøllina til judo og borðtennis við grundarlagi í fyriliggjandi skitsuuppskotið, og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión. Somuleiðis verður mælt til at játta kr. 7 mió av íløguætlanini fyri 2014 kontu 5775 Ítróttaranlegg til verkætlanina.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 91/14 Umlegging av ferðslu- og parkering á Vestaru bryggju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 10.02.2014 | 1/14 | 14/00821-2 |
| 2 Vinnunevndin | 14.04.2014 | 12/14 | 14/00821-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 120/14 | 14/00821-2 |
| 4 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 91/14 | 14/00821-2 |

**Málslýsing:**

Fyri at bøta um ferðslu- og parkeringviðurskiftini á Vestaru bryggju er neyðugt at umleggja vegin, sum fer út á Viðarnes, at burturbeina gomlu kranahøllina og at gera parkeringsbásar.

**Umlegging av vegnum og ger av túni fram við Sjóvinnuhúsinum:**
Tað er nógv tung ferðsla oman á økið. Aftan á at gasstangarnir eru burturbeindir, er tað nú møguligt at bøta munandi um omankoyringina, við at spreingja hornið við gomlu gasstangarnar burtur.

Fyri at halda ferðsluna leysa av Sjóvinnuhúsinum, er neyðugt at gera tún fram við bygninginum, og samstundis leggja nýggjar leiðingar í lendið.

Tórshavnar havn hevur gjørt uppskot til at umleggja vegin og at gera tún við tilhoyrandi instalatiónum, sum er klárt at bjóða út.

**Burturbeining av gomlu kranahøllini:**
Tá Tórshavnar havn keypti bygningin, sum nú eitur Sjóvinnuhúsið, bleiv verkstaðið og garagan flutt úr kranahøllini og í Sjóvinnuhúsið. Ætlanin var tá at taka kranahøllina niður, fyri at gera meira pláss á økinum, men tá hetta kom í drag, bleiv bygningurin leigaður til Tórshavnar Maskinverkstað, sum enn er í bygninginum.
Tá Sjóvinnuhúsið verður endaliga innrættað og tikið í brúk, stendur húsið sera árent, og tá verður tørvur á nógvum parkeringsplássum.
Uppsagnartíðin av leigaranum, sum er inni, er ein mánaði. Tað er ikki neyðugt at taka húsið niður beinanvegin, tí kann uppsagnartíðin gott verða 6 mðr.

**Skipan av parkering.**
Bara ein partur av økinum eru skipaður við parkeringsbásum. Í løtuni eru umleið 100 uppmerktir parkeringsbásar. Hetta ger, at bilar blíva settir ymsastaðni á økinum, og eru í vegin fyri størri arbeiðsamboðum.
Uppskot er gjørt til plasering og uppmerking av 100 nýggjum parkeringsbásum.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at:

**Umlegging av vegnum og ger av túni fram við Sjóvinnuhúsinum:** Mælt verður til at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Burturbeining av gomlu kranahøllini:**
Mælt verður til at uppsiga leigumálið við 6 mánaðar freist. Eisini verður mælt til at burturbeina bygningin.

**Skipan av parkering:**
Mælt verður til at taka undir við uppskotinum til parkering.

**Vinnunenvndin 10. februar 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umlegging av vegnum og ger av túni fram við Sjóvinnuhúsinum hevur verið boðið út.
Inn komu 4 tilboð:

| | |
|---|---|
| Maskingrevstur v/Frank Hellisdal: | 3.471.258,- |
| Maskinkoyring v/Karl Patursson: | 4.638.695,- |
| Plan v/Jóannes Hellisdal: | 3.361.965,- |
| Tórhallur Hansen: | 2.409.198,- |

Kostnaðurin fyri trygging, príshækkingar og óvantað er mettur til kr. 500.000,-

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka av lægsta tilboðnum frá Tórhalli Hansen upp á kr. 2.409.198,-.
At avseta kr. 500.000,- til trygging, príshækkingar og óvantað.
At játta kr. 2.909.198,- av íløguætlanini fyri Tórshavnar havn 2014, til endaliga liðugtgerð av arbeiðinum.

**Vinnunevndin 14. apríl 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina..

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 92/14 Serstøk byggisamtykt fyri F-økið við Hoydalsá millum Villingardalsvegin og Sundsvegin- broyting av byggisamtykt (2013-1839)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 94/14 | 14/00851-9 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 92/14 | 14/00851-9 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Júst Rubeksen søkti í juni 2012 um gerð av nýggjum frítíðarøki við Hoydalsá millum Villingadalsvegin og Sundsvegin, nakað omanfyri Undir Brúnni (j. nr. 2012-1474).

Fleiri fundir hava verið við umsøkjaran, og málið hevur verið viðgjørt á fundi í teknisku nevnd, seinast 15. mai 2013, har samtykt var, at byggisamtyktin skal broytast (j. nr. 2013-1788) og at býarskipanardeildin arbeiðir víðari í samstarvi við umsøkjaran við endaligari skipan og serstakari byggisamtykt fyri F-øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við serstøku byggisamtyktini fyri F-øki við Hoydalsá millum Villingadalsvegin og Sundsvegin.

**Tekniska nevnd 4. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Serstaka byggisamtyktini fyri F-økið við Hoydalsá millum Villingadalsvegin og Sundsvegin er nú endaliga góðkend av Fiskimálaráðnum.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Kunnað varð um málið, sum verður beint í býráðið til kunningar.

**Býráðið 22. mai 2014:** Kunnað varð um málið.

# 93/14 Hallarætlanir fyri Landavegin, Gundadal og Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 30.01.2014 | 17/14 | 14/00942-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 7/14 | 14/00942-5 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 42/14 | 14/00942-5 |
| 4 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 62/14 | 14/00942-5 |
| 5 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 92/14 | 14/00942-5 |
| 6 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 93/14 | 14/00942-5 |

Málslýsing:

**Hallarætlanir fyri Landavegin, Gundadal og Argir**

- Upprit kemur til fundin**.**

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at útvega kostnaðarmeting fyri dupulthøll við Landavegin, sum lýkur ásetingar í mun til altjóða dystir og krøv til multi funktionalitet innanfyri eina viku.

**Ískoyti:**
Í íløguætlanini fyri 2014 eru settar kr. 9 mió av til tvíhøll (dupulthøll) við Landavegin. Sambært samtyktini hjá mentamálanevndini skal talan verða um fleirfunktionella høll, sum lýkur ásetingar til altjóða dystir. Hugsað er her um serstakliga hondbólt og flogbólt, ið krevja ávísa hædd.

Frælsafeløgini Bragdið og Hvirlan eins og sersambandið fyri frælsar ítróttir í Føroyum (FÍF) hava víst kommununa á ynski um at tryggja frælsu ítróttini innandura umstøður í høllini, tí tørvurin á støðugari venjing um veturin uttan mun til illveður og hálku er alneyðugur. Feløgini vísa á loysnir í eitt nú Svøríki, sum ikki krevja so nógv pláss og sum kunnu skipast saman við høllini (vøllunum) og ítróttavirkseminum annars.

Tað samlaða grundøkið matr. nr. 917 er lutvíst planerað. Til eina tvíhøll skal allur matrikkulin planerast, og hetta arbeiðið kann gerast nær sum helst. Økið er skipað sum D2 øki, tvs. ítróttaøki. Talan kann gerast um skipa økið í serstakari byggisamtykt, alt eftir, hvussu stór høllin verður.

Neyðugt er at viðgera nærri og ítøkiligera, hvat høllin skal rúma bæði av ítróttaumstøðum, felagshølum, fleirfunktionalietum so sum flytførar tribunir, skilja/leggja saman hallir, sjónvarping, stevnir, parkerings- og atkomuviðurskifti v.m., eins og møguleikan at byggja og taka í nýtslu bygningin í stigum. Harumframt at fáa gjørt eina kostnaðarmeting.

Til tess at ítøkiligera ætlanina er neyðugt við játtan at fyrireika eitt konseptuppskot at leggja fyri nevndina aftur sum grundarlag at útvega byggiskrá og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 0,5 mió av íløguætlanini fyri 2014 konta 5775 Ítróttarhøll við Landavegin til fyrireikingar.

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. januar 2014:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti, at beina málið aftur í mentamálanevndina við tí setningi, at gera eina heildarætlan sum eisini umfatar Argir, Hoyvík og Gundadal.

- Forkvinnan ynskir viðgerð av møguligari raðfesting av hallarbyggiætlanum.

**Býráðsfundir 30. januar 2014**: Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti, at beina málið aftur í mentamálanevndina við tí setningi, at gera eina heildarætlan sum eisini umfatar Argir, Hoyvík og Gundadal.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at útvega kostnaðarmeting fyri at byggja høll uppí Gundadalshøllina.

**Ískoyti:**
Sambært endurskoðaðu íløguætlanini fyri 2014 eru kr. 19 mió settar av til yvirtøku og at byggja út Gundadalshøllina til tvíhøll.

Feløgini Neistin, Kyndil og Fleyr eiga og reka verandi Gundadalshøll. Í skrivi dagf. 18. februar 2014 boða tey frá, at tey taka fult undir við ætlanini at útbyggja Gundadalshøllina og avhenda verandi høll við ávísum treytum til tess at tryggja feløgunum innivist í høllini.

Sett verður sum treyt, at býráðið ognar sær verandi høll fyri kr. 600.000 til hvørt felagið sær, sum er tað, sum Gundadalshøllin er bókførd fyri í roknskapunum hjá feløgunum, og at bygd verður dupulthøll við felagshølum til Neistan, Kyndil og Fleyr í norðara enda á nýggju høllini. Hvørt felagshøli skal rúma 40 fólkum at sita og haraftrat tekøkur, skrivstovuhøli, vesi og internet. Og at í høllini verða rúm til bóltar, ítróttaútgerð annars og fysioterapi umframt vektrúm, og at skilaveggur, sum er ljóðdoyvdur, verður ímillum báðar vøllirnar, smu kann dragast frá.

Harumframt treyt, at feløgini og kommunan avtala skrivliga, at feløgini hava heimarætt í høllini og fáa atgongd til fleiri kommunalar tímar enn nú. Víðari, at hallarvørður eigur burturav at verða settur at røkja Gundadalshøllina og mæla til, at hetta verður núverandi hallarvørður. At enda, at lýsingarinntøkur av lýsingum í og uttan á høllini hava feløgini rætt til.

Á fundi 5. mars 2014 við kommununa vórðu omanfyri nevndu viðurskifti umrødd. Feløgini vóru tá sinnað at lækka yvirtøkuprísin til kr. 300.000 til hvørt felagið, men at hallarvørðurin hevur fast starvsstað í Gundadalshøllini.

<u>Viðv. yvirtøkugjaldi:</u>
Tá kommunan hevur yvirtikið aðrar ítróttarhallir, tvs. Badmintonhøllina, fimleikahøllina á Stórheyggi og Høllina á Hálsi, hevur yvirtøkan verið kostnaðarfrí, tvs. kr. 1,00 uttan mun til bókført virði. Við yvirtøkuni átekur kommunan sær allan kostnað av rakstri, øllum viðlíkahaldi og øllum umvælingum framyvir. Í mun til Gundadalshøllina er støðan eisini tann, at kommunan umframt yvirtøkuna eisini byggir høllina út til dupulta stødd, sum tey trý upprunafeløgini fáa beinleiðis ágóða av við fleiri tímum.

Vísandi til praksis við undanfarnum yvirtøkum og vísandi til, at kommunan samstundis byggir høllina út og veitir feløgunum fleiri tímar, eigur kommunan ikki at gjalda feløgunum serstakt fyri yvirtøkuna.

Viðvíkjandi heimarætti og fleiri tímum:
Tey trý feløgini hava søguligt tilknýti til Gundadalshøllina, og tí er rímiligt at avtala, at tey hava heimarætt har. Heimarætturin eigur tó ikki at merkja einkarættur, tí onnur ítróttarfeløg skulu eisini hava rætt til tímar í Gundadalshøllini eins væl og heimarætt. Ásetast kann heldur ikki ávísur serrættur til tímar, tí tillutan av tímum verður eftir mannagongdini, har tað m.a. verður hugt eftir tørvi, støðd á felag, ítróttargrein, tímum í øðrum høllum v.m.

Í hesum sambandi eigur meting at vera gjørd, hvørja ávirkan ein høll aftrat hevur á tímatørvin hjá ítróttarfeløgum.

Viðvíkjandi hallarvørði:
Við yvirtøkuni av høllini bindur kommunan set til at yvirtaka skyldur og rættindi hjá starvssetta hallarvørði. Framyvir verður hann starvssettur í hallarumsitingini og harvið partur av hallarvarðatoyminum. Hann verður tí í útgangsstøðinum ikki at hava fast starvsstað í Gundadalshøllini.

Viðvíkjandi felagshølum v.m.:
Mett verður, at kommunan í sambandi við byggiverkætlanina kann taka atlit til felagshøli og onnur høli knýtt til sjálva ítróttarhøllina uttan tó at binda seg til kostnaðin, eisini tí, at samlaða yvirtøkan og útbyggingin hevur ein avmarkaðan fíggjarkarm uppá kr. 19 mió. Feløgini eiga at bera kostnaðin til innrætting, amboð, útgerð v.m. av møguligum felagshølum.

Viðvíkjandi nýtslu av høllini og lýsingar:
Sum tvíhøll er Gundadalshøll framvegis fyrst og fremst ein ítróttarhøll, men er eyðsæð eisini væl egnað til onnur tiltøk so sum vinnuframsýningar v.m. Reglugerð eigur at áseta aðrar almennar nýtslumøguleikar enn ítrótt, har hædd er tikin fyri, at hetta virksemi ikki skaðar høllina.

Tá um lýsingarrætt og lýsingarinntøkur í og uttan á kommunalum høllum ræður, eigur ein reglugerð at verða gjørd, sum fevnir um allar kommunalar hallir bæði innan og uttan, so reglurnar eru eins fyri allar hallir og øll feløg.

Samanumtikið
Yvirtøka av verandi høll og harvið greið ognar- og rakstrarábyrgd má metast fortreyt fyri ætlanini um Gundadalshøllina sum tvíhøll. Støðutakan til sjálva byggiverkætlanina eigur tí at bíða, til yvirtøkan er framd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gera yvirtøkuavtalu við feløgini Neistan, Kyndil og Fleyr soleiðis:

- Yvirtøkuprísurin er kr. 1,00 til hvørt felagið
- At feløgini fáa heimarætt til Gundadalshøllina, men ikki einkarætt, tvs., at eisini onnur ítróttarfeløg hava møguleika at hava heimarætt og fáa tímar í Gundadalshøllini
- At tímatillutanin verður skipað eftir galdandi mannagongd
- At kommunan yvirtekur skyldur og rættindi hjá hallarvørðinum, og at hann verður settur í hallarumsitingini, men ikki við ávísari høll sum starvsstaði
- At kommunan í sambandi við byggiverktætlanina tekur atlit til tørv á felagshølum

- At reglugerð verður gjørd um virksemið og nýtslu av Gundadalshølini
- At reglugerð verður gjørd um lýsingar í øllum kommunalum høllum innan og uttan og býtið av inntøku

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Jógvan Arge var ikki við í viðgerðini av hesum máli.

Samtykt at taka undir við tilmælinum tó so, at avtalast kann ein yvirtøkuprísur upp til kr. 250.000 til hvørt felagið og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Jógvan Arge var ikki við í viðgerðini av hesum máli.

Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri viðmerking, at yvirtøkukostnaðurin skal rindast av løgukonto og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Jógvan Arge var ikki við í viðgerðini av hesum máli.

Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at býráðið tekur undir við tilmælinum til mentamálanevndina tann 10. apríl 2014, tí býráðið hevur ábyrgd og skyldur at viðgera øll ítróttarfeløg eins. Somuleiðis sum mælt verður til at ein støðulýsing av høllini verður gjørd. Tilmæli fall við einari atkvøðu fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Rúni Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Heðin Mortensen.

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen, Rúni Djurhuus og Heðin mortensen

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

# 94/14 Málslýsing Reinsaríið í Tórsgøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 2/14 | 14/00944-61 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 21/14 | 14/00944-61 |
| 3 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 37/14 | 14/00944-61 |
| 4 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 78/14 | 14/00944-61 |
| 5 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 109/14 | 14/00944-61 |
| 6 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 94/14 | 14/00944-61 |

**Málslýsing:**
Vísandi til undanfarna samtykt í málinum, har játtaðar eru kr. 450.000 til kanningar og ráðgeving at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu, hevur arbeiðið higartil leitt fram til, at mælt verður til at broyta leist fyri hetta arbeiðið.

Orsøkin er, at kanningarnar av bygninginum hava víst, at umvælingararbeiðið í stóran mun best kann skipast sum smáar einkult standandi arbeiðstøkur, sum noyðast at fremjast í stigum, fyri at kunna taka støðu til, hvussu farast skal víðari fram. Hetta er serstakliga grundað á, at talan er um ein gamlan bygning, sum fyrst hevur havt nógva og skiftandi nýtslu, og síðan hevur staðið tómur. Hetta hevur havt sína ávirkan á týðandi bygningslutir, og neyðugt er sostatt at bróta niður partar fyri at fáa eina hylling á, hvussu farast skal víðari fram.

Tá talan er um slíkt arbeiði, sum nærum kann samanberast við restaureringsarbeiði, verður ofta mett, at tað er sera óheppið at binda seg til eina høvuðsentreprisu í sáttmála. Vandi er fyri at koma í ta støðu, at eitt av arbeiðunum avdúkar so týðandi trupulleikar, at neyðugt kann verða við munandi fleiri pengum fyri at fremja lidnu loysnina eftir avtaluni, sum er sáttmálabundin. Og tá hevur byggiharrin ringar møguleikar at annaðhvørt steðga á ella skifta loysn uttan stórar eykakostnaðir.

Skotið verður tí upp at brúka annan leist, at samlaða íløgujáttanin, ið eftir er, kr. 1.050.000, verður játtað til verkætlanina, og at bjóða arbeiðið út í smærri arbeiðstøkur sum undirhondsboð, so hvørt sum ein arbeiðstøka er avklárað.

Kostnaðarmeting fyri fyrsta umbyggingarstig verður løgd fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.050.000 av kontu 5376, L53002 Reinsaríið stigvis umbygging, og at einstøku arbeiðstøkurnar verður bodnar út sum undirhondsboð.

**Mentamálanevndin 9. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi við Tórshavnar kommunu 16. november 2011 vísti Felagið MenTón á vantandi tónleikaumstøður í Havn, og ynski varð sett fram um, at Reinsaríið í Tórsgøtu verður spælistað. Teirra meting er, at tann núverandi ætlanin ikki er nøktandi til teirra virksemi. Í hesum sambandi er neyðugt at kanna, um til ber at laga verkætlanina til tørvin hjá tónleikarunum, herundir ljóðviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 75.000 av kontu 5366 Stuðul annars til at kanna, hvussu bygningurin best verður lagaður til tørvin hjá tónleikinum.

**Mentamálanevndin 30. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Mikael Viderø, býararkitektur, varð biðin um at kanna um Reinsaríið eisini kann brúkast til rytmiskt spælistað.

Kontrast Arkitektar hevur gjørt nýtt uppskot av Reinsarínum.

Í nýggja uppskotinum, januar 2012, verður m.a. sagt:

" Reinsaríið verður í dag eina mest nýtt til konsertir. Uppruna uppskotið var, at húsið skuldi nýtast til fleiri ymisk endamál, til tónleikaframførslur, almen tiltøk, bókakafe, uppihaldsstað fyri ungdómar á útferð, herundir dag- og frítíðarstovnar. Tað hevur verið eitt ynski, at broyta ætlanina, soleiðis at møguleiki er at brúka húsið til rytmiskt spælistað. Tískil eru ávísar broytingar gjørdar í mun til fyrra uppskotið. Meira luft er nú millum hæddirnar fyri at økja um rúmd (volumen). Men annars er tankin tann sami, við einum gjøgnumgangandi multifunktionaliteti.

Byggilistarliga hugskotið byggir uppá, at samantvinna tað gamla við nakað nýtt. Innan verður tað gamla varðveitt, sum er merkisvert í sær sjálvum, og við nýggjari innrætting og nútíðar sniði fæst ein meira tíðarhóskandi og nýtiligur bygningur. Hugskotið byggir eisini uppá at fáa ein polyvalentan bygning, sum við sínum mongu tiltøkum kann broyta funktión eftir tørvi. Hetta, at hava rúmini so opin sum møguligt og funktiónirnar mobilar. Rýmingartrappa í norðurskjøldrinum er eisini hugsað sum brúkstrappa.

Veghæddin skal kunna nýtast til rytmiskan tónleik, men eisini er møguleiki fyri øðrum framførslum. Pallurin verður í vestursíðuni á fyrstu hædd, við sitiplássum kring pallin, samstundis sum sitipláss verða kring opið á aðru hædd."

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at arbeiða víðari eftir uppskotinum frá januar 2012, til eisini at gera Reinsaríið til eitt rytmiskt spælistað og samstundis varðveita multifunktionalitetin.

Á íløguætlanini 2012 konto 5375 eru avsettar 1 mió. kr.

Mælt verður til at játta 1 mió. kr. av íløgum 2012 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Mentamálanevndin 11. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina partin um peningajáttina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1 mió. av íløguætlanini 2012 konto 5375 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Ískoyti:**
Samsvarandi viðmerkingum frá húsaumsitingini og byggideildini hevur Kontrast tillagað uppskotið frá januar 2012, har dentur varð lagdur á at fáa viðurskifti í lagi í sambandi við bruna, funktión, kloakk, umhvørvi, trygd, lyftu, rørslutarnað o.a.

Gjørd er tí nýggj kostnaðarmeting, har samlaði kostnaðurin nú er mettur til 6,8 mió. kr. við mvg.

Ætlanin hevur verið at gera arbeiðið í stigum og í fyrsta umfari at fremja kjallarahæddina og miðhæddina. Hesin partur er mettur at kosta 3,5 mió kr. við mvg.

Á kontu 5375 L53002 eru 2,1 mió kr. tøkar til endamálið. Á íløguætlanini fyri 2013 konta 5375 eru avsettar 3 mió kr. aftrat.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 3 mió. kr. av íløgukontu 5375 til kontu 5375 L53002 Reinsaríið til at arbeiða víðari við liðugtgerðini.

**Mentamálanevndin 27. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og harumframt til at mæla býráðnum til at játta 2 mió. kr. afturat til liðugtgerð, ið verður at fíggja soleiðis: kr. 1.660.000 av konto 5375 Skálatrøð og kr. 340.000 av konto 5175 Musikkskúlin. Játtanin upp á 2 mió. kr. til liðugtgerð er treytað av undirtøku frá mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 20. mars 2013:** Samtykt at taka undir við fíggjarnevndar-samtyktini 13. mars 2013.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatiónsúrslit:
Í sambandi við arbeiðið at at gera Reinsaríið til spælistað, var fyri uml. 2 mánaðum síðani arbeiði við niðurtøku og ísblásing av gamla timbrinum boðið út og sett í verk, meðan restin av útbjóðingartilfarinum var gjørt klárt. Tilboðini upp á hesi arbeiðini upp á uml. kr. 520.000 u/mvg.

Lisitatión í sambandi við restina av arbeiðinum, var hin 16. juli 2013. Fimm virkir vóru innboðin at lata inn tilboð, og trý teirra lótu inn tilboð.

Tilboðini vóru hesi:

Húsavarðartænastan: 4.947.191,- u/mvg
Træsmiðjan: 6.449.032,- u/mvg
Articon: 7.966.393,- u/mvg

Arkitekturin hevur eftirkannað tilboðini, og mælir til at taka av lægsta tilboðnum, frá Húsavarðatænastuni.

Fíggjarviðurskifti:
Við grundarlagi í omanfyri nevndu tilboðum upp á niðurríving, ísblásing og høvuðsarbeiðstøku, umframt keyp av elevatorstóli, verða samlaðu handverkaraútreiðslurnar mettar til kr. 5.772.000 u/mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til fylgjandi:

1. at taka av lægsta tilboðnum, og heimila umsitingini at gera sáttmála við Húsavarðatænastuna

**Mentamálanevndin 2. august 2013:** Nevndin samtykti at mæla til at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Býráðslimir tóku um teldupost undir við at seta samtyktina hjá mentamálanevndini í verk at formliga góðkenna á seinni fundi í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á íløguætlanini fyri 2014 eru avsettar 2. mió, til Reinsaríið, til tess at fáa til vega fullfíggjaða hátalaraskipan, ljósskipan, innbúgv, o.a. Útvegan av hesum skal í gongd beinanvegin, til tess at halda tíðarætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 2 mió. kr. av íløgukontu 5375 til kontu 5375 L53002 at fyrireika útvegan av hátalaraskipan, ljósskipan, innbúgvi o.ø.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 19. februar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 4. mars 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kringvarpið hevur sett upp ynski at fáa 63 amp streym o.a. inní Reinsaríið til sjónvarps- og útvarpsupptøkur.

Í sambandi við hetta hevur el-ráðgevin mett neyðugt at leggja 160 amp tilsamans inní Reinsaríið. Sum er, eru 80 amp á staðnum, og 80 amp afturat kosta kr. 94.800 uttan mvg. Síðani skal kaðal, el- talva og stállúka veitast og monterast, sum kostar tilsamans kr. 171.225 uttan mvg.

Afturat hesum hevur SEV sett sum krav, at einasti møguleiki at veita 160 amp inn í Reinsaríið, er at grava ein strong til ein 70mm Cu kaðal frá Reinsarínum oman til transformarastøðina niðri við Hotel Tórshavn. Mettur kostnaður fyri hetta arbeiðið er kr. 222.010 uttan mvg

Samlaði kostnaðurin fyri hetta er kr. 393.235 uttan mvg, við 6,25% mvg er kostnaðurin kr. 417.812.

Lagt er ikki upp fyri hesum kostnaði í íløgujáttanini til Reinsaríið.

Mett verður gevandi fyri Reinsaríið sum tónleikastað, at Kringvarpið ger útvarps- og sjónvarpssendingar í og frá Reinsarínum í høgari góðsku. Hinvegin er spurningur, um kommunan skal bera allan henda kostnað sjálv, og um Kringvarpið tí eisini skuldi goldið part av hesum.

Av tí at málið hevur skund í mun til byggiarbeiðið annars, verður mett neyðugt við støðutakan til fígging av hesi meirútreiðslu til fleiri amp nú, og at møguligt mál um býti av kostnaði við Kringvarpið verður tikið upp seinni.

Mett verður, at til ber at játtað upphæddina av íløgukontu ætlað Múllers pakkhúsi. Har er kr. 1 mió tøk, sum kortini er ov lítil til at fáa lagt hitaskipan inn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 417.812 av íløgukontu 5375 L53003 Múllers pakkhús til kontu 5375 L53002 Reinsaríið til tess at gera nevnda el-arbeiðið og leggja ein kaðal oman á transformarastøðina við Hotel Tórshavn.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 95/14 Skúla- og ítróttarhøll í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 67/14 | 14/00984-27 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 117/14 | 14/00984-27 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 95/14 | 14/00984-27 |

**Málslýsing:**
Víst verður til mál nr. 2003-0389.

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í skrivum frá 21. og 28. januar 2004 søkir Advokatskrivstovan, vegna Hallarstuðlar, Tórshavnar kommunu um at hava bygginginа av høllini um hendi.

Í umsóknini frá Christiani Andreasen, adv., frá 28. januar 2004 verður m.a. tikið soleiðis til:

”Undir hesum broyttu umstøðum skal eg vegna Hallarstuðlar við hesum søkja Tórshavnar býráð um, at kommunan játtar at rinda allan byggikostnaðin í sambandi við bygging av høllini, sjálvsagt við frádrátti av nevnda innskoti og við frádrátti av sjálvbodnum arbeiði. (Viðmerkingar frá kommunustjóranum: 500 tús. kr. í innskotspeningi goldið kontant og 4 mió. kr. í sjálvbodnum arbeiði).

Undir hesum umstøðum - har kommunan rindar allan byggikostnaðin - er einki í vegin fyri, at býráðið fær meirvirðisgjaldið afturgoldið eftir teimum reglum, sum eru galdandi fyri kommunur.

Eftir hesum leisti verður tað býráðið, sum stendur sum byggiharri, og tað verður býráðið sum kontraherar høllina og sum hereftir kemur at hefta fyri tí byggiarbeiði, sum skal gerast.

Hallarstuðlar kunnu vegna býráðið hava sjálva bygginginа um hendi, sjálvsagt undir neyðugum eftirliti av kommununi.

Veljast skal ein bygginevnd at standa fyri byggingini, og kommunan kann somuleiðis velja eitt byggieftirlit, sum m.a. skal tryggja, at tað ongantíð verður útgoldið meira enn bygt er fyri, alt sambært vanligum reglum.

Kostnaðarmetingin viðvíkjandi bygging av høllini sær soleiðis út (tølini eru uttan mvg):

| | |
|---|---|
| byggikostnaður | kr. 11.930.000 |
| innbúgv | - 1.000,000 |
| eftirlit | - 500.000 |
| tilsamans umframt mvg. | kr. 13.430.000 |
| innskotspeningur | - 500.000 |
| kostnaður | kr. 12.930.000 |

(Viðmerkingar frá kommunustjóranum: kommununnar partur av mvg kr. 839.375,00).

Annars verður víst til lýsing av projektinum. Í hesum tilfari liggur eisini ein endalig kostnaðarmeting og ein uppgerð yvir sjálvboðið arbeiði.

Eg kann upplýsa, at Hallarstuðlar hava verið í Íslandi og hugt eftir eini høll, og felagið er av teirri áskoðan, at nevnda kostnaðarmeting í hvussu so er kemur at halda.

Felagið hevur móttikið eitt sáttmálauppskot frá Íslandi, men sjálvandi verður eingin sáttmáli undirskrivaður, fyrr enn øll viðurskifti í sambandi við bygging av høllini eru avklárað.

Henda umsókn hevur sum fyritreyt, at gjørd verður ein avtala við Hallarstuðlar um teirra rættindi í samband við nýtslu av høllini, herundir hvørji rættindi felagið skal hava í sambandi við teirra veitingar til samlaða projektið."

**Fíggjarnevndin 29. januar 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til

at ganga umsóknini frá Hallarstuðlum á møti,
at taka upp nærri samráðingar um arbeiðs- & uppgávubýti,
at vald verður ein bygginevnd har
býráðið velur 1 lim
hallarstuðlar velja 1 lim, og
býráðið og hallarstuðlar í felag velja 1 lim
at fíggja byggikostnaðin við kr. 13.769.375,00 av framtíðar íløgum sambært samtyktu ársfíggjarætlanini fyri 2004.

**Býráðið 29. januar 2004:** Meðan málið varð viðgjørt, fór Jákup Suni Joensen av fundi.

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini við tí ískoyti, at eingin fær frammíhjárættindi til at fáa arbeiði og nýtslu av høllini.

Eisini varð samtykt at velja Mikael Viderø og Christan Andreassen í bygginevndina.

**Ískoyti:**
Hallarstuðlar hava arbeitt við ætlan um at innrætta tvey høli í ovaru hæddunum í vestara endanum, sum ikki vórðu gjørd liðug í sambandi við sjálva bygningina. Talan er um eitt samkomuhøli í fyrstu hædd uml. 170 m2 stórt við hartil hoyrandi hølum til wc, goymslur, reingerð, køk v.m. Á aðru hædd er eisini eitt stórt rúm uml. 140 m² stórt. Umframt trappur skal lyfta setast í.

Ætlanin er, at loftshæddirnar kunnu hýsa fjøltáttaðum virksemi bæði til ítrótt, ítriv, ungdómsvirksemi, fundir, samkomur eins og annað virksemi, og á henda hátt koma øllum bygdarlívinum í Kollafirði til gagns.

Í fíggjarætlanini 2011 eru kr. 700.000 tøkar til endamálið. Sambært fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2012 verða ætlandi játtaðar kr. 2.300.000 aftrat, tvs. tilsamans kr. 3.000.000.

Hallarstuðlar hava ynskt at halda fram við sama leisti, sum varð brúktur, tá høllin varð bygd, sí omanfyri. Í hesum sambandi skal støða takast til kommunalu umboðini í bygginevndina. Setast skal sama treyt, sum varð sett í sambandi við byggingina av høllini, nevniliga, at eingin fær frammíhjárættindi til at fáa byggiarbeiðið og nýtsluna av hølunum.

Mett verður, at tær tøku kr. 700.000 skulu játtast til at fáa til vega tekningar og prosjekt fyri ætlaðu innrættingina, herundir kostnaðarmeting fyri í fyrsta lagi at innrætta 1. hædd, og í øðrum lagi bæði 1. og 2. hædd, at leggja fyri mentamálanevndina aftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at játtaðar verða kr. 700.000 av kontu 5775 Ítróttahøllin í Kollafirði til at fáa til vega tekningar, prosjekt og kostnaðarmeting fyri í fyrsta lagi at innrætta 1. hædd, og í øðrum lagi bæði 1. og 2. hædd, at leggja fyri mentamálanevndina aftur. Somuleiðis verður mælt til at seta sum treyt, at eingin fær framíhjárættindi til byggiarbeiðið og nýtsluna av hølunum. At enda verður mælt til, at Mikael Viderø og Christian Andreasen halda fram í bygginevndini.

**Mentamálanevndin 9. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Gjørt verður vart við, at hesin leistur víkur frá politisku/fyrisitingarligu mannagongdini fyri verkætlanir, fíggjaðar av íløgum, samtykt av býráðnum í 2006, og tí skal avtalast serstøk mannagongd fyri váttan og ávísing av rokningum.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Hallarbólkurin hevur latið tekningar og kostnaðarmeting í sambandi við at innrætta loftshæddirnar. Tekningarnar fevna eisini um trappuuppgongdina og lyft frá forhøllini í niðastu hædd.

Innrættingin á fyrstu hædd hevur eitt forsamlingshøli à uml. 170 m2. Til hetta eru wc og garderoba, 2 goymslur umframt høli til køli-/frystigoymslu og rúm til uppvask/reingerð. Eisini er køkur. Í erva er opið óinnrættað rúm og goymsla.

Kostnaðarmetingin er kr. 2.990.000 u/mvg og uttan rentu- og príshækkingar. Kostnaðarmetingin fevnir ikki um útgerð til køkin, køli-/frystigoymsluna og liðugtgerð av aðru hædd.

Uppskotið til innrættingarendamál sýnir annars rættiliga fleksiblar karmar, ið kunnu nýtast til ymisk endamál.

Samlaði íløgukarmurin til endamálið er kr. 3.000.000. Áður eru játtaðar kr. 700.000 til fyrireikingarnar at fáa til vega tekning, prosjekt og kostnaðarmeting. Til tess at seta byggiarbeiðið í gongd, er neyðugt at játta tær írestandi kr. 2.300.000 til endamálið.

Vísandi til, at kostnaðarmetingin uppá kr. 2.990.000 er uttan mvg og rentu- og príshækkingar, verða álagt hallarbólkinum at gera tillagingar í kostnaðarmetingini soleiðis, at hesar útreiðslur verða hildnar innanfyri samlaða játtanarkarmin uppá kr. 3.000.000.

Tað áliggur somuleiðis hallarbólkinum at fáa til vega øll neyðug loyvi frá avvarðandi myndugleikum, herundir góðkenning av lyft m.a. til fólk við breki.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna innrættingarendamálið og játta kr. 2.300.000 av íløguætlanini fyri 2012 kontu 5775 Høllin í Kollafirði til arbeiðið sambært omanfyri nevndu treytum.

**Mentamálanevndin 8. februar 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina partin um fíggingina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndnii

**Býráðið 23. februar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ætlanin at innrætta tær báðar loftshæddirnar hevur víst seg trupul at fáa framda serliga vegna kostnaðarmikil brunakrøv. Í sambandi við endurskoðanina av íløguætlanini 2014 er játtanin lækkað til kr. 1.089.000. Umrødd er onnur ætlan um at byggja høllina út, so at goymsluumstøðurnar hjá ítróttarhøllini kunnu betrast. Um peningurin røkkur til tað, er eisini ynski um at fáa gjørt millumbygningin millum skúlan og høllina lidnan.

Gerast skal uppskot til útbygging og prosjektering sum grundarlag fyri útbjóðing.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.089.000 av íløguætlanini konta 5775 Ítróttaranlegg L57013 Skúla- og ítróttarhøll í Kollafirði til at útbyggja ítróttarhøllina við goymslurúmi, og um peningurin røkkur til tað, eisini at gera millumbygningin millum skúlan og høllina lidnan, og í hesum sambandi fáa til vega prosjekttilfar og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 96/14 Høgni Jacobsen : Viðvíkjandi endurgjaldi í sambandi við ognartøku av vegi við Dvørgastíg í Tórshavn (2006-1323)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 53/14 | 14/01397-101 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 103/14 | 14/01397-101 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 96/14 | 14/01397-101 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Málið um ognartøkuna av parti av Dvørgastígi var avgreitt, tá Hægstirættur staðfesti ognartøkuna í 2006. Høgni Jacobsen hevur í sambandi við staðfestingina, í skrivi dagf. 31.mars 2006 til kommununa, gjørt vart við endurgjaldskrav.

Hetta málið um endurgjald hevur sín uppruna í øðrum málum um Dvørgastíg og eru tey hesi:

- Mál nr. 2005-1996
  Viðv. ferðsluviðurskiftunum í Dvørgastígi - parkeringsviðurskifti ísv virki í gøtuni (matr. nr. 789x)
- Mál nr. 2004-1700
  Bjarki Jacobsen vegna Ottar Jacobsen : Viðv. vatn sum rennur frá Dvørgastígi inn í urtagarðin hjá Ottari Jacobsen. Heitir á kommununa um at gera nakað við málið.
- Mál nr. 2004-1005
  Alment innlit í málið matr. 789x viðvíkjandi ognartøku Dvørgastígur - umsókn frá Advokatvirkinum og skriv frá Løgtingsins Umboðsmanni viðv. klagu frá Oddvør Jacobsen
- 2001-2328
  Advokatar Poul Hansen og Jónfinn Thomsen: Viðv. ognartøku av Dvørgastígi
- 1999-1153
  Dvørgastígur yvir í Vættrastígur nýggj kloak
- 1999-0998
  Ottar Jacobsen: Viðvíkjandi ferðsluviðurskiftunum í Dvørgastígi

Í skrivinum, dagf. 31. mars 2006, verður m.a. kravt, at ognartikna lendið verður endurrindað við at kommunan letur annað lendi, eitt nú grundstykki. Í tí sambandinum verður víst til § 20 í býarskipanarlógini. Í øðrum lagi verður kravt endurgjald fyri handilsvirðið á ognini, og at hetta verður sett samsvarandi virðinum á byggilendi.

Víst verður á, at nú kommunan hevur ognartikið part av Dvørgastígi, sum gongur fram við matr. nr. 789n, og 789m, verður eisini kravt, at kommunan yvirtekur restina av vegnum. Í tí sambandinum verður víst til § 14, stk 1, í býarskipanarlógini.

Harumframt verður sett fram krav um, at kommunan rindar endurgjald fyri mist handilsvirði av ognini umframt endurgjald vegna virðisminking av resterandi ogn og endurgjald vegna ampar. At enda verður kravt, at ognartikni vegurin verður settur í stand og at kommunan letur gera hegn og garð fram við vegnum. Í skrivinum verður eisini biðið um fund við kommununa um at fáa avgreitt nevndu spurningar.

Nógv samskifti hevur verið millum Høgna Jacobsen og umsitingina, at fáa greiðu á hvussu ein virðilig loysn kann verða funnin á endurgjaldsspurninginum.

Umsitingin hevur í tí sambandi latið gera ein handlingsplan, ið tekur støði í at ovari partur av Dvørgastígi verður knýttur í Heiðavegin, meðan niðari partur verður knýttur í Varðagøtu. Hetta vil føra við sær, at niðari partur av Dvørgastígi einans skal verða nýttur av matr. nr. 789c, nr. 789e , nr. 789f Tórshavn, meðan restin – tann ovari parturin verður knýttur at eini framtíðar atkomu frá Heiðavegnum, tvørtur um matr. nr. 789n, ið er ogn hjá kommununi. Men av tí at henda ogn í løtuni verður nýtt sum fríøki, er ynskiligt, um tann parturin av Dvørgastígi, ið upprunaliga var ætlaður til veg at binda í Heiðaveg, verður latin kommununi at leggja saman við fríøkinum ella at nýta sum fríøki, soleiðis at fríøki verður báðu megin íbindingina í Heiðaveg. Tað vil siga, at ímillum Dvørgastíg nr. 5 og 7 verður sperra at seta upp soleiðis, at tað ikki verður koyrandi millum ovara og niðara part á Dvørgastígi. Afturfyri verður skotið upp, at kærarin fráfellur nevndu krøv í skrivi til kommununa.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Kommunan kemur undir øllum umstøðum at rinda eitt ávíst gjald fyri ognartøkuna av niðara parti av Dvørgastígi. Eftir sum partarnir ikki kunnu koma ásamt um virðið á ognartikna lendinum, eru ikki aðrir møguleikar enn at velja ein metingarmann.

Tað fyriliggur eingin fíggjarlig meting av teimum krøvum, ið Høgni Jacobsen hevur gjørt vart við. Heldur ikki er nøkur meting gjørd fyri kostnað av arbeiðinum at gera neyðugar ábøtur á Dvørgastíg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeitt verður við at gera semju við Høgna Jacobsen, um at hann letur kommununi restina av Dvørgastígi afturfyri at kommunan fer undir omanfyri nevndu arbeiði, treytað av at kærarin fráfellur nevndu krøv.

Mælt verður eisini til at játta kr. 150.000 av reguleringskontoini at gera eitt skitsuuppskot við kostnaðarmeting av:

- nýggjum atkomuvegi millum Dvørgastíg og Heiðaveg
- fríøki við Heiðavegin
- gera ábøtur á niðara part av Dvørgastígi.

Peningur er ikki avsettur á íløguætlan fyri 2007.

**Tekniska nevndin 10. mai 2007:** Nevndin samtykti at fáa gjørt meting av endurgjaldsspurninginum fyri tann partin av Dvørgastígi, ið er ognartikin.

- Borgarstjórin ynskir at viðgera málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 8. november 2007:** Nevndin samtykti at senda málið um møguliga vegaatkomu millum Heiðaveg og Varðagøtu til hoyringar í grannalagnum.

- Umsitingi hevur móttikið skriv frá borgarum í grannalagnum, sum vóru send nevndarlimunum undan fundinum.

**Tekniska nevnd 7. februar 2008:** Nevndin var á staðnum og kunnaði seg um málið.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal og Leivur Hansen, samtykti at eingin atkomuvegur verður gjørdur millum Heiðaveg og Dvørgastíg.
Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til at gera eitt skitsuppskot, sum tekur støði í at steingja Dvørgastíg frá Varðagøtu og at binda Dvørgastíg í Heiðaveg.

Ein samd nevnd samtykti at seta metingarnevnd at avgreiða endurgjalds-spurningin.

**Ískoyti:**
Eigarin av ovara parti av Dvørgastígi hevur lagt moldrúgvu uppi við endan av vegnum og hevur hetta ført við sær truplari atkomuviðurskifti hjá grannalagnum. Av terirri grund hevur formaðurin í nevndini ynskt at viðgjørt málið enn eina ferð. Umsitingin kunnar annars um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 3. apríl 2008:** Kunnað varð um málið.

- Spurningurin viðv. moldrúgvuni er ikki loystur enn eins og tilgongdin av málinum um endurgjaldsspurningin er drigin eitt sindur út. Umsitingin kemur, saman við Julionnu Klett, sakførara, at greiða frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Julianna Klett greiddi frá gongdini í málinum.

- Umsitingin kemur saman við løgfrøðingi at kunna um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Julianna Klett greiddi frá gongdini í málinum.
- Umsitingin kemur saman við Julionnu Klett, sakførara, at greiða frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Kunnað var um málið. Víst verður til j. nr. 2006-1323/61.

- Borgarstjórin ynskir at umrøða málið við nevndina.

**Tekniska nevnd 24. september 2009:** Málið umrøtt.

- Borgarstjórin ynskir at umrøða málið við nevndina.

**Tekniska nevnd 7. juni 2011:** Tikið av skrá.

- Skriv er komið frá Advokatskrivstovuni, dagf. 22. august 2011, við áheitan um fund viðvíkjandi umvæling av Dvørgastígi. Spurt verður um hvørjar ætlanir kommunan hevur viðvíkjandi dagføringini av vegnum, sum nú er yvirtikin. Kunnað verður annars um gongdina í málinum frá tí at málið um endurgjald av vegnum var kært til Landsrættin og eftirfylgjandi at býráðið avgjørdi at taka kæruna aftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin vísa til tilmæli 10. mai 2007, ella at nevndin tekur støðu til dagføringina av Dvørgastígi, herundir umfangið av eini slíkari dagføring. Somuleiðis verður mælt til, at játtan verður raðfest á komandi íløguætlanum til at gera arbeiðið, uttan mun til hvørja loysn avgjørt verður at fremja.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Borgarar hava gjørt vart við, at tað ríðir undan vegnum á vegamótinum oman fyri hjá Ottari Jacobsen, sála, og vísa á, at tørvur er á at dagføra vegin. Játtanin fyri árið 2012 til Dvørgastíg/undir Borgarhálsi álj. kr. 2 mió. er sett av til Borgarháls. Neyðugt er tí at útvega fígging til arbeiðið at dagføra Dvørgastíg.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin var á staðnum og kunnaði seg um viðurskiftini.

Nevndin samtykti, at umsitingin letur gera eitt skitsuuppskot við kostnaðarmeting av hvussu Dvørgastígur kann gerast tryggur, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin ætlar at heita á ráðgeva um at útvega skitsuuppskot við kostnaðarmeting av hvussu Dvørgastígur kann gerast tryggur, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 250.000,- av íløgujáttanum til vegir 2013, kto. 8175, til at útvega skitsuuppskot við kostnaðarmeting av hvussu Dvørgastígur kann gerast tryggur, at leggja fyri nevndina aftur, og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykkir at beina málið aftur í teknisku nevnd við atliti til at útvega skitsuprojekt við kostnaðarmeting av, hvussu niðari partur av Dvørgastígi við ábótum kann gerast trygg farleið við nýggjari atkomu frá Heiðavegi. Eisini samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 250.000 av íløgujáttanum til vegir 2013, kto. 8175 til endamálið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 21. februar 2013:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Halla Samuelsen og Marin Katrina Frýdal

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge og Jákup Dam.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá teknisku nevnd, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Hóast niðari partur av Dvørgastígi er somikið brattur og smalur, at stór og tung akfør ikki sleppa um niðasta trongan, so vísir tað seg at tilfarið undir verandi asfalti er somikið vánaligt, at hóast lítlu og løttu ferðsluna, so ferst asfaltið og undirlagið skjótt og krevur tí javnan eftirbøtingar.

Eisini er garðurin, sum stuðlar uppundir niðara part av vegnum, farin at smokka undan og eru gøtuljós og avvatning av vegnum er heldur ikki nøktandi.

Dvørgastígur er vegtekniskt í somikið ringum standi, at ábøturnar/dagføringin av vegnum kemur, fyri at henda skal verða nøktandi, at svara til nýgerð av vegi við øllum tilhoyrandi tekniskum installatiónum so sum kloakkum og gøtuljósum v.m.

Umsitingin hevur útvegað skitsuuppskot við kostnaðarmeting frá ráðgeva, sambært samtykt í býráðnum 21. febr. 2013.

Kostnaðarmetingin er í tveimum pørtum:
1) Dagføring av niðara parti (brekkan) av Dvørgastígi (sí j. nr. 2013-0570/6).
2) Dagføring av øllum Dvørgastígi (sí j. nr. 2013-0570/3).

Ad1.
Út frá fyriliggjandi skitsuuppskoti verður mett, at samlaðu útreiðslurnar at dagføra niðara part (brekkuna) av verandi Dvørgastígi verða uml. kr. 1.481.00,- íroknað MVG (sí j. nr. 2013-0570/5). Arbeiðið fevnir bert um niðara part av vegnum og er sostatt einginupphædd sett av til dagføring av ovara parti, tvs frá Dvørgastígi nr. 3 til 9.
Áður eru við býráðssamtykt tann 23. februar 2013 játtaðar kr. 250.000,- til arbeiðið.
Sostatt er metti fíggjartørvurin til at dagføra niðara part av Dvørgastígi, kr. 1.231.000,-, tá undanfarin játtan til skitsuprosjektering er íroknað.

Ad2.
Út frá fyriliggjandi skitsuuppskoti verður mett, at samlaðu útreiðslurnar at dagføra allan Dvørgastíg verða uml. kr. 3 mió. íroknað MVG (sí j. nr. 2013-0570/5). Arbeiðið fevnir um dagføring av øllum vegnum – íroknað fyribils atkomuveg frá Heiðagøtu meðan arbeiðið verður framt.

Áður eru við býráðssamtykt tann 23. februar 2013 játtaðar kr. 250.000,- til arbeiðið.
Sostatt er metti fíggjartørvurin til at dagføra niðara part av Dvørgastígi, kr. 2.750.000,-, tá undanfarin játtan til skitsuprosjektering er íroknað.

Vísandi til samtykt í teknisku nevnd 6. februar 2013 og í býráðnum 21. februar 2013, verður skitsupppskot við kostnaðarmeting framlagt á fundinum.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Skitsuuppskot og kostnaðarmeting varð framlagt.

**Ískoyti:**
Tekniska nevnd skal taka støðu til fígging av at dagføra niðara part av Dvørgastígi vísandi til at tað sambært íløguætlan kommununar fyri 2013 eru settar 1 mió. kr. til Dvørgastíg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fyrireika útbjóðing í innbodnari lisitatión av at dagføra niðara part av Dvørgastígi, at játta 1 mió. kr. av markaðum íløgum til vegir (§6, 8175 Dvørgastíg) og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 25. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti**

Umsitigin hevur saman við ráðgeva latið gera útbjóðingartilfar, skjal nr. 14/-01387-10 við samlaðari kostnaðarmeting skjal nr. 14/-01387-11. Tilfarið er klárt at bjóðast út í innbodnari lisitatión.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Samlaður kostnaður fyri at dagføra allan Dvørgastíg er mettur til 3,36 mió kr. Hiðartil eru játtaðar kr. 250.000,- til projektering tann 21.02.2013. Sostatt er neyðugt at játta 3,11 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta írestandi kr. 750.000,- frá markaðum íløgum fyri vegir í 2013 (8175 Dvørgastíg) og kr. 2.000.000,- frá markaðum íløgum fyri vegir í 2014 (8175 Dvørgastíg) og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Jógvan Arge, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við teknisku nevnd og tekur støðu á seinni fundi.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við teknisku nevnd og mælir til, at innkoman til Dvørgastíg verður frá Heiðavegnum.

**Býráðið 22. mai 2014:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus og Heðin Mortensen

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein.

**[Lagre]**

# 97/14 Kommunala Brennistøðin : Útskifting av skrottpressu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 82/14 | 14/01624-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 129/14 | 14/01624-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 97/14 | 14/01624-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Skrottpressan til bil- og jarnskrott hjá Kommunalu Brennistøðini er frá 1998. Pressan varð høvuðsumvæld í 2007/2008 fyri uml 0,6 mió. Í 2013 vóru eisini nógvir tekniskir trupulleikar, ið kostaðu nógv at umvæla, og sum viðførdu, at nógv rakstrartíð varð mist. Tað er óheppið, at rakstrartíð verður mist, tí bilar og jarnskrott hópar seg upp beinanvegin, og tá ber ikki til at arbeiða rationelt, umframt at tað viðførir tørv á eyka fólki og yvirtíð at arbeiða tilfari undan aftur, tá ið pressan aftur er í lagi.

Pressan, sum er 16 ára gomul, er nú í rættiliga ringum standi, og serfrøðingar hava mett, at tað ikki longur loysir seg at umvæla, men at rættast er at útskifta pressuna við eina nýggja.

Skrottpressan er eitt sera týdningarmikið amboð í rakstrinum á jarnplássinum. Við at pressa bilvark og skrott, minkar rúmdin nógv, og harvið verður eisini nógv spart uppá flutningsútreiðslur.

Hetta er avgerandi fyri, at fíggjarliga úrtøkan burturúr jarnskrotti er á hampuliga góð, og at tað harvið ber til at lata kundunum eitt hampuliga stórt gjald fyri at innlata jarnskrott.

Ein nýggj skrottpressa kostar umleið 4 mió umframt flutning, uppseting, mvg o.a., so alt í alt kemur kostnaðurin at vera umleið 5 mió. Soleiðis sum rakstrarjáttanin hjá KB er samansett, ber ikki til at fíggja kostnaðin av rakstri.

**Tilmæli:**
Vísandi til týdningin av skrottpressuni sum partur av fíggjarliga rakstrinum av brennistøðini, og sum tænastuveiting, umframt at verandi skrottpressa er ov gomul og slitin til at blíva umvæld, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini til, at kr. 5 mió. til nýggja skrottpressu verður raðfest á íløguætlanini, so nýggj pressa kann útvegast sum skjótast.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 98/14 Møguligt samstarv við IRF um viðgerð og burturbeining av rottangaevju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 83/14 | 14/01625-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 104/14 | 14/01625-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 98/14 | 14/01625-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fyrispurningur er komin til TK/KB frá IRF, um at ganga saman um at finna loysnir til viðgerð og burturbeining av rottangaevju. IRF skrivar, at tey eru í ferð við at leita eftir og kanna meiri haldgóðum loysnum til viðgerð og burturbeining av rottangaevju, enn tær ið nýttar verða í dag, og heitir á TK/KB um at vera við at kanna, um tað fíggjarliga og í aðrar mátar loysir seg best at byggja og reka eitt ella fleiri anlegg og at kjølfesta loysnirnar í felag ella hvørt felag sær, og hvar slíkar loysnir mest høgliga kunnu leggjast. IRF hevur leysliga kanna onkra alternativa viðgerðarskipan.
Víst verður til skriv frá IRF, j.nr. 14/0625-5.

Stjórin í IRF, Poul Andrias Joensen, er til reiðar at koma á fund í teknisku nevnd, at greiða nærri frá fyrispurninginum.

Sum støðan er í løtuni, er átroðkandi at fáa ein loysn á spurninginum um nýtt rottangapláss, í staðin fyri verandi rottangapláss í Húsahaga.
Nýtt rottangapláss, ið byggir á somu viðgerð av evjuni við kálkstabilisering, men við goymslutangum, er nærum liðugt projekterað, men eingin loysn er í eygsjón viðvíkjandi staðsetingini.

Umboð fyri KB og formansskapurin í teknisku nevnd, hava á arbeiðsferð í DK saman við IRF verið og hugt eftir tílíkum annleggi, sum IRF vísir á, og verið á óformligum kunningarfundi við umboð fyri Krüger, ið hevur bygt annleggið.
At síggja til tykist hendan tøknin rættiliga áhugaverd og vælegnað til føroysk viðurskifti. Eyðsýndir fyrimunir eru í, at skipanin er lokað og luktur er nærum eingin. Sambært teimum upplýsingum, ið eru fingnir til vega higartil, er kostnaðurin á einum rættiliga rímiligum støði, helst lægri enn tann loysnin við goymslutangum, sum arbeitt hevur verið við higartil.

Áðrenn umsitingin kann arbeiða áfram at kanna møguleikarnar fyri eini slíkari loysn saman við IRF, er neyðugt at fáa heimild og fígging til tess. Í fyrsta umfari má heimild og fígging fáast til at gera skitsuprojekt saman við IRF, sum skal vera grundarlagið undir eini støðutakan til, um eitt tílíkt annlegg skal byggjast. Kannast og lýsast skal m.a.:

1. Hvat ið "endaliga produktið" er og kann vera, og hvussu sleppast kann av við hetta
2. Hvørjar teknisku loysnir eru bestar til at koma fram til "endaliga produktið"
3. Hvørjir eru møguleikarnir og hvørjar eru treytirnar fyri at viðgera og "sleppa av við" tí frásoldaða tilfarinum, við vætufrárensl, við eftirverandi evjuna (endaliga "produktið") ella við øsku frá møguligari brenning av evjuni.
4. hvørt tað loysir seg best fíggjarliga og rakstrarliga fyri partarnar at byggja eitt felags annlegg, ella um partur av annlegginum skal vera felags og aðrir partar hvør sær, ella um talan skal vera um hvør sítt annlegg.

5. Tekniskar/rakstrarligar treytir fyri staðseting av annleggi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til:

- At umsitingin fær heimild at gera skitsuprojekt og kanningar annars, til tess at lýsa grundarlagið undir eini tílíkari loysn.
- At játtaðar verða 426.000 kr. av framfluttari løgujáttan á konto 7175-L71001til kanningar og projektering.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 99/14 Kommunala Brennistøðin : Endurnýggjan av ketlinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 131/14 | 14/01698-78 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 107/14 | 14/01698-78 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 99/14 | 14/01698-78 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ketilin á KB er frá 1987, og er nú sostatt umleið 22 ára gamal. Partar av ketlinum vórðu skiftir í 1989, vegna framleiðslufeil. Livitíðin á einum ketli er natúrliga avmarkað, tó uttan at til ber við vissu at siga, hvussu long livitíðin er.

Í 2006 varð ovnurin høvðusumvældur, eins og framkomin roykreinsiskipan varð bygd. Ímillum hesar báðar høvðuspartar er triði høvuðspartur í annlegginum, nemliga ketilin, sum einki varð gjørt við í.s.v. høvuðsumvælingina.

**Grundarlag og uppgávulýsing**
KB hevur seinastu árini gjørt kanningar og metingar fyri at kunna finna fram til røttu loysnina og røttu løtuna at endurnýggja ketilin. Grundarlagið ella fortreytirnar fyri kanningunum og metingunum eru hesar "uppgávulýsingar":

- At aldur og slit á ketlinum viðføra:
- Rakstrarsteðgir vegna umvælingar, sum minka um tøka brennitíð
- Brenniorkan minkar, tá ið rør verða proppað vegna lekar
- Um illa vil til, kunnu álvarsamir feilir leggja annleggið lamið í longri tíð
- At tekniskir trupulleikar eru við rakstrinum av filtrinum, vegna ov høgan hita á roykinum úr ketlinum.
- At núverandi ketil krevur manuella reinsing umleið 10. hvønn dag. Hetta ber til, við niðursettari last, men minkar um brennitíðina og harvið mongdina, sum kann brennast.
- At annleggið verður fyrireikað tekniskt og í mun til brenniorku til eina hóskandi restlivitíð, soleiðis at gjørdar íløgur í ovn og filtur verða gagnnýttar sum longst.

<u>Viðv. 1: Aldur og slit.</u>
Seinastu árini eru hesar uttanhýsis kanningar av ketlinum gjørdar (j.nr. 2009-2549/1):

- 2004: Babcock & Wilcox Vølund : Tilstandsrapport
- 2006: Force Technology: Ultrasonic Thickness Examinination (IRIS)
- 2008: Babcock & Wilcox Vølund : Inspektions- og tykkelsesmålerapport

Kanningin frá 2004 vísti, at ketilin sum heild er í góðum standi, men at innanfyri eitt tíðarskeið á uml 6 ár kann roknast við at rørini skulu skiftast.

Í kanningin frá 2006 varð tjúktin á rørunum máld við stikkroyndum (54 av 414 rørum). Minst málda rørtjúkd var 2,8 mm.

Í kanningini frá 2008 vórðu eisini gjørdar tjúkdarmátingar (stikkroyndir), og minst málda rørtjúkd var 2,8 mm. BWV metti tá, at ketilin var í sera góðum standi, og at vænta, at ketilin kann vera í rakstri í nøkur ár aftrat (einki áramál "garanterað"!). Mett varð, at neyðugt er ikki at skifta rørini í løtuni.

Seinastu árini hava nakrir lekar verið á ketlinum. Serliga seinasta árið hava fleir lekar verið. Hesir lekar benda á, at livitíðin nú er avmarkað til rættiliga fá ár aftrat. Tað serliga við slíkum trupulleikum við eldri ketlum, ið byrja at leka er, at lekar koma títtari og títtari fyri, og bráddliga kann støðan gerast álvarsom.

Kommunala Brennistøðin hevur heitt á Rambøll um, við støði í gjørdu kanningunum, at meta um støðuna og livitíðina hjá ketlinum (j.nr. 2005-2549/9). Teirra niðurstøða er, at livitíðin er fá ár, og at 5 ár ikki kunnu garanterast.

Tekniski leiðarin og rakstrarleiðarin á KB hava sjálvsagt eisini loypandi mett um støðuna á ketlinum, sí frágreiðing tekniska leiðarans (j.nr. 2009-2549/10). Teirra meting og niðurstøða er, at livitíðin er avmarkað til 3-5 ár aftrat, og at renovering má vera byrjað innan 3 ár. Í frágreiðingini verður eisini sagt, at 2% av rørunum eru proppað vegna lekar, umframt at aðrir lekar hava verið. Proppaðu rørini viðføra minni kapacitet á ketlinum, hægri roykhita, sum aftur gevur trupulleikar í filtrinum.

<u>Viðv.2: Tekniskir trupulleikar við rakstrinum av filtrinum</u>
Hitin á roykinum frá ketlinum er í hægra lagi, í mun til raksturin av roykreinsiskipanini. Neyðugt er at sproyta nógv vatn inn í roykin fyri at køla, og tað vísir seg at vera sera trupult tekniskt at fáa hetta at rigga nóg væl. Úrslitið gerst, at øska byggist upp í konditioneringstorninum, sum at enda kann loypa niður og steingja fyri roykrásini, og tað er ein sera álvarsom støða, tí heitu roykgassini sleppa ikki burtur vanliga vegin, men mugu út gjøgnum op o.t. í ovninum.

Hetta viðførir

- Rakstrarsteðg (mist brennitíð)
- Yvirupphiting av ketli og ovni, sum aftur er orsøk til at ketilin verður termiskt belastaður og harvið slítist meira
- Dálking av ovnhøll og filturhøll
  Fyri at loysa hendan trupulleika er neyðugt at lækka hitan á roykinum frá ketlinum, og tað kann gerast antin við einum størri ketli ella við einum "economisara" millum ketilin og filtrið.

<u>Viðv. 4:</u>
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini heldur, at rættast er at gagnnýta gjørdu íløgurnar í 2006 sum longst, áðrenn eitt heilt nýtt annlegg verður bygt. Í hesum sambandi eru tvey ymisk tíðarskeið (planperiodur) mett, eitt stutt (5-10 ár) og eitt longri (12-18 ár). Væntast kann, at nøgdirnar at brenna økjast líðandi við tíðini, og tí er neyðugt at fremja tiltøk, sum kunnu økja um brenniorkuna, fyri at kunna nøkta tørvin, sum verður mettur til minst 20.000 T/ár í longra tíðarskeiðnum. Somuleiðis er væntandi, at brennivirðið økist komandi árini, og ávirkar hetta brenniorkuna negativt.

**Loysnir**
Kommunala Brennistøðin hevur í samráð við Rambøll biðið veitaran av annlegginum Babcock & Wilcox Vølund um at koma við uppskotum til loysnir og kostnaðarmetingum uppá áður nevndu "uppgávulýsingar". Rambøll hevur síðani mett um hesi uppskot og skrivað eitt notat við tilmæli um hvørja loysn Rambøll metir vera ta bestu.

Uppskotini til loysn eru hesi (sí uppskotini í síni heildí málinum, j.nr. nevnd niðanfyri, eins og meting hjá Rambøll, j.nr. 2009-2549/9):

- **Renovering av verandi ketli** (útskifting av roykrørum), j.nr. 2009-2549/3:
  *Uppskot 1 er einans ein stuttskygd høvuðsumvæling av ketlinum (styttra tíðarskeiðið, 10 ár), men loysir ikki trupulleikan við ov høgum hita til filtrið, ella við manuellu reinsingini av rørunum. Partar av ketlinum verða ikki skiftir, og er tí framvegis eins gamal og áður. Loysnin gevur ikki øktan kapacitet. Við hækkandi brennivirði kann væntast, at brenniorkan fellur til 15.000 T/ár. Orkuframleiðslan verður ikki økt.*
  *Kostnaðarmeting: 2,0 mió. (Rambøll).*

- **Innseta Economisara millum ketil og filtur**, j.nr. 2009-2549/6:
  *Uppskot 2 loysir trupulleikan við ov høgum hita til filtrið, umframt tað sum er nevnt undir uppskot 1. Brenniorkan kann við hesi loysn økjast við 1000 T/ár. Orkuframleiðslan verður økt umleið 10-15 %.*
  *Kostnaðarmeting: 7,5 mió, íroknað uppskot 1, renovering av ketli. (Rambøll).*

- **Útskifta ketilin við ein nýggjan størri av somu typu**, j.nr. 2009-2549/4:
  *Uppskot 3 loysir trupulleikan við ov høgum roykhita til filtrið, men ikki manuellu reinsingina av rørum. Allur ketilin verður skiftur. Brenniorkan verður økt til 20-22.000 T/ár, sjálvt við hækkandi brennivirði. Orkuframleiðslan verður økt 10-15%. Loysnin kann nýtast til longra tíðarskeiðið.*
  *Kostnaðarmeting: 10,0 mió. (Rambøll).*

- **Útskifta ketilin við ein nýggjan vatnrørsketil**, j.nr. 2009-2549/5:
  *Uppskot 4 loysir nevndu trupulleikar við ov høgum roykhita til filtri og manuellu reinsingini av ketlinum. Brenniorkan kann økjast til 24.000 T um árið. Orkuframleiðslan verður økt. Við 10% størri íløgu kann Brenniorkan økjast til 30.000 T, um ovnurin seinni verður um- og útbygdur. Kostnaðarmeting: 30.0-35.0 mió. (Rambøll).*

**Niðurstøða og tilmæli hjá Rambøll:**
Rambøll mælir til, at loysn nr. 3 (útskifta ketilin við ein størri av somu typu) verður vald. Hendan loysnin lýkur krøvini til brenniorkutørv í longru planperioduni (12-18 ár), eins og hendan loysnin loysir mest átrokandi trupulleikan við ov høgum hita til filtrið.

**Meting og niðurstøða hjá leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini.**

| Loysn | Fyrimunir | Vansar |
|---|---|---|
| 1 | - Lágur kostnaður<br>- Stutt umbyggingartíð (2-3 vikur) | - Partar av ketlinum framvegis gamlir og kunnu fara at leka<br>- Loysir ikki trupulleikan við ov høgum hita til filtrið<br>- Manuell reinsing neyðug<br>- Økir ikki um brenniorkuna.<br>- Økir ikki um orkuframleiðsluna.<br>- Hóskar bert til styttru planperioduna |
| 2 | - Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur<br>- Brenniorkan økist (eitt sindur)<br>- Orkuframleiðslan økist eitt | - Partar av ketlinum framvegis gamlir og kunnu fara at leka<br>- Hóskar bert til styttru planperioduna<br>- Ein eyka partur, sum ikki er kendur frammanundan, skal |

| | | |
|---|---|---|
| | sindur (FHF)<br>- Stutt umbyggingartíð (3-4 vikur) | byggjast inn í skipanina.<br>- Manuell reinsing neyðug<br>- Neyðugt við eyka kølikapaciteti |
| 3 | - Allur ketilin verður skiftur, harvið gerst rakstrartryggleikin stórur<br>- Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur<br>- Brenniorkan økist<br>- Orkuframleiðslan økist (FHF)<br>- Hóskar bæði til styttru og longri planperiodu | - Manuell reinsing neyðug<br>- Neyðugt við eyka kølikapaciteti |
| 4 | - Allur ketilin verður skiftur, harvið gerst rakstrartryggleikin stórur<br>- Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur<br>- Ikki neyðugt við manuellari reinsing<br>- Brenniorkan økist nógv<br>- Orkuframleiðslan økist nógv (FHF)<br>- Hóskar bæði til styttru og longri planperiodu | - Kostnaðurin ov høgur í mun til nyttuna<br>- Ketilin er stórur (høgur) og krevur bygningsbroytingar<br>- Ketilin er torførari at reka, tí hann er meiri avanseraður. Umbyggingartíð 3-4 mánaðir.<br>- neyðugt við eyka kølikapaciteti |

Samanumtikið metir leiðarin á Kommunalu Brennistøðini, at loysn nr. 3 (útskifta ketilin við ein størri av somu typu) er nógv tann besta loysnin, sæð í mun til kostnaðin og nyttuna, tá talan um um bæði styttru og longru planperioduna.

Vísandi til, at livitíðin á ketlinum verður mett at vera avmarkað til 3, kanska 5 ár enn, mælir leiðarin á Kommunalu Brennistøðini, at arbeiðið at endurnýggja ketilin eigur at vera gjørt í 2011. Tað er ikki rætt at bíða sum longst, grundað á hesi viðurskifti:

- vandi er fyri, at sum tíðin gongur, fer ketilin at leka meira, harvið koma rakstrarsteðgir, rør mugu proppast, og kapaciteturin fellur, og hitin hækkar til filtrið, sum fær enn størri trupulleikar
- Útskiftingin má ikki draga út, so at tað bráddliga gerst neyðugt at útskifta heil rørbunt ella øll rørini, beint frammanundan at ketilin skal útskiftast.
- Tað er best at fáa gjørt endurnýggjanina meðan rusknøgdirnar eru minst, og tað er í krepputíðum, annars vaksa rusknøgdirnar gjarna fyri hvørt ár sum gongur.
- Ein nýggjur ketil heldur gjarna í umleið 20 ár, og verandi annlegg verður neyvan í rakstri longri enn tað, og fyri at gagnnýta ein nýggjan ketil mest møguligt, ræður um at fáa hann í rakstur sum skjótast.

Framleiðslutíðin av einum nýggjum ketli er umleið 6-8 mánaðir, harumframt kemur tíð til planlegging, sáttmálasamráðing við veitara o.t. á umleið 6 mánaðar, so samanlagt tekur verkætlanin umleið 1-1,5 ár at fremja.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at tikið verður undir við at uppskot nr. 3 (Útskifta ketilin við ein nýggjan størri av somu typu) verður valt, og at útskiftingin verður gjørd í 2011. Samstundis verður mælt til, at nevndin tekur upp spurningin um fígging sum partur av langtíðaríløguætlan kommununar, soleiðis at fyribils kr. 10,0 mió. u/mvg verða tøkar til útskifting av ketlinum í 2011.

**Heilsu- og Umhvørvisnevndin 6. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina spurningin um fíggingina í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Umrøtt, og verður viðgjørt í sambandi við langtíðaríløguætlanina.

**Ískoyti:**
Síðani málslýsing og tilmæli í hesum máli bleiv gjørt á heysti 2009, hevur brennistøðin á Bornholm, ið er nærum meinlík brennistøðini á Hjalla, havt útbóð og gjørt sáttmála um tekniska dagføring av støðini, herundir eisini ketlinum. Framleiðsla av nýggjum ketli til Bornholm er nú í gongd, og verður hann skiftur í september 2011.

Ráðgevi hjá BOFA var Rambøll, sum sostatt hevur nýggjar dagførdar upplýsingar viðvíkandi tekniskum loysnum og kostnaðum. Við støði í nýggju dagførdu upplýsingunum hevur Rambøll gjørt eina dagføring av notatinum frá september 2009, eins og nýtt tilmæli er gjørt, j.nr. 2009-2549-13.

Royndirnar frá útbjóðingini á Bornholm vísa at tann áður tilmælta loysn 3 er nú mett at kosta kr. 13 mió., í mun til áður mett kr. 10 mió.

Útbjóðingin vísti eisini, at at tað er gjørligt at fáa ein vatnrørsketil (loysn 4) fyri umleið kr. 16 mió., í mun til áður mett kr. 30-35 mió, og sum ikki krevur stórar bygningsbroytingar, sum áður hildið. Í fyrra notatinum var júst tikið fyrivarni fyri, at óvissan í.s.v. kostnaðurmetingin av hesi loysnini var størri enn viðvíkjandi hinum loysnunum, serliga tí loysnin varð mett at krevja bygningsbroytingar, og tí at neyðugt var við neyvum tilboðum frá veitarum av ketlum. Henda loysnin samsvarar einum nýmótans forbrenningsketli.

Grundað á hesar dagførdu upplýsingarnar, mælir Rambøll til, at velja loysn 4, sum er útskifting av ketlinum til ein vatnrørsketil, soleiðis sum gjørt er á Bornholm.

**Tilmæli:**
Grundað á nýggju upplýsingarnar í málinum, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini nevndini til at:

- Velja at fremja loysn 4, sum er útskifting av verandi ketli til ein vatnrørsketil eins og gjørt er á Bornholm og
- Heita á býráðið, um fíggjarnevndina, at raðfesta játtan á umleið kr. 16 mió. (u/mvg) til ketil, umframt umleið 0,5 mió. til ráðgeving á íløguætlanini, soleiðis at ketilin kann bíleggjast, skiftast og verða tikin í nýtslu innanfyri í mesta lagi 2 ár.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. september 2011:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal og Maria Hammer Olsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í heilsu- og umhvørvisnevndini og játta kr. 0,5 mió. kr. av konto 7175, renovasjón (íløgur), til ráðgeving og útbjóðing.

**Býráðið 20. oktober 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sáttmáli um heildarráðgeving, í sambandi við útskifting av verandi ketli til ein vatnrørsketil, verður í næstum gjørdur við ráðgevarafyritøkuna Rambøll.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Kommunalu Brennistøðini mæla, við grundarlagi í fylgiskjali 1 í ráðgevarasáttmálanum, j. nr. 2009-2549/18, til, at arbeiðið, at gera ketilin, verður boðið út í innbodnari licitatión.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. mars 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
TK hevur móttikið 1. uppskot til útbjóðingartilfar uppá ketilin frá Rambøll, j.nr. 2009-2549/20. Samandráttur av útbjóðingartilfarinum og tilmæli frá Rambøll um útbjóðingarhátt og ketlaveitarar, verður sent limunum saman við skránni. Umsitingin hevur gjørt ymsar viðmerkingar til tilfarið, j.nr. 2009-2549/21.
Týdningarmestu høvuðstáttirnar í útbjóðingartilfarinum eru:

- Útbjóðingarháttur: Undirhondsboð sambært donsku ”tilbudsinhentningsloven” (Løgdeildin er biðin um at kanna/viðmerkja løg-grundarlagið)
- Grundarlag fyri tillutan av ordra: ”Det økonomisk mest fordelagtige tilbud” sambært donsku ”tilbudsindhentningsloven”.
- Metingarstøði undir ”Det økonomisk mest fordelagtige tilbud”:
  - Pris 60 Point
  - Teknisk kvalitet 30 Point
  - Tidsplan for færdiggørelse af leverancen 10 Point
  - Maksimum pointantal 100 Point
- Høvuðspunktir í uppksoti til tíðarætlan (kann samráðast um partar av tíðarætlan sambært útbjóðingartilfari):
  - 01/07-2012: Útbjóðingartilfarið sendast út
  - 31/08-2012: Tilboðsfreist
  - 01/11-2012: Undirskriva sáttmála
  - 15/07-22/09: Installatión / uppstart
  - 23/09-23/12: Royndarkoyring
  - 23/12-2013: Fyribils yvirtøka
- Uppskot til gjaldsætlan (kann samráðast sambært útbjóðingartilfari):
  - 1. rata (við ordra): 01/11-2012: 20% av sáttmálaupph.
  - 2 .rata (veitan av komponentum) 15/07-2013: 30% av sáttmálaupph.
  - 3 .rata (start royndarkoyring) 23/09-2013: 40% av sáttmálaupph.
  - 4. rata (fyribils yvirtøka) 23/12-2013: 10% av sáttmálaupph.

Umframt veitingina av ketlinum, sum ketlaveitarin skal veita sambært umrødda útbjóðingartilfari, verða aðrar neyðugar byggiharraveitingar umfataðar av samlaða projektinum: Byggiharraveitingarnar eru í høvuðsheitum:

- Niðurtøka av verandi vatnkøliskipan og tilhoyrandi útgerð (s.s. kølarum)
- Gera rørgrøv fyri rørum til Fjarhitafelagið
- Veitan og uppsetan av vatnrørum frá bygningi og yvir til Fjarhitafelagið (og retur)
- Gera fundamentir til nýggjar kølarar og rørberarar
- Inniloka verandi kølaraøki, sum verður neyðugt at nýta til maskinútgerð (leggja tak á, skera hol í betongvegg fyri dupulthurð inn til verandi ketilrúm, seta hurðar og vindeygu í, og møguliga innbyggja hems/stáldekk við trappu)
- Møguliga nýtt trýstluftannlegg (sum eisini er optión í ketlaveitingini)
- Neyðugt verður helst eisini at gera nýggja El-innlegging til Jarnplássið, soleiðis at skrottpressan verður tikin av høvuðs el-talvuni á Brennistøðini, fyri at fáa nóg mikið av tøkum el-mátti á talvuna.

Til tess at kunna byrja fyrireikan av nøkrum av omanfyristandandi byggiharraveitingum, sum skulu samskipast við ketlaveitingina, hevur leiðslan á KB mett tað verið neyðugt at fáa gjørt visuellar skitsur av nýggju vatnkøliskipanini og tilhoyrandi útbúnaði (s.s. staðseting av kølarum, pumpum og kompressarum).

Skitsurnar verða ætlandi latnar ketlaveitarunum sum vegleiðing um, hvussu KB ynskir at køliskipan og komponentar verða staðsettir, og av tí at tær skuldu verða lidnar samstundis sum útbjóðingartilfarið, vóru ikki stundir at leggja mál um serstaka játtan fyri nevnd til støðutakan, áðrenn tær vóru bílagdar.
Skitsurnar eru gjørdar av Sofus M. Jacobsen, ráðgevandi verkførðingi, og vóru av SMJ mettar at kosta 40-50.000 kr. Leiðarin á KB metir ikki, at gerð av tílíkum visuellum skitsum eru partar av arbeiðnum hjá Rambøll, og tí verður biðið um at peningur verður játtaður til hetta arbeiðið av íløgum innan renovatiónsøkið.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu brennistøðini mæla til at:

- góðkenna útbjóðingartilfarið við viðmerkingum, sum umsitingin ger
- bjóða veitingina av ketlinum út sambært tilmælta útbjóðingarháttinum og til teir veitarar, sum Rambøll mælir til
- góðkenna uppskot til tíðarætlan og gjaldsætlan og samstundis fyrireika úutvegan av neyðugari játtan til 1. ratugjald, sum er 20% av sáttmálaupphædd (upphæddin er ikki kend enn, tí tilboð fyriliggja ikki, men verður væntandi um 2-3 mió. kr.), sum skal gjaldast 1. november 2012.
- játta kr. 60.000 + mvg til gerð av visuellum skitsum av §7, konto 7175 íløgur fyri renovatión 2012.
- beina málið um fíggjarnevnd í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2012:** Bárður Michelsen, leiðari á kommunalu brennistøðini, kunnaði um útbjóðingartilgongdina.

Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal, Jan Christiansen og Maria Hammer Olsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og játta kr. 60.000 umframt mvg til gerð av visuellum skitsum av §7, konto 7175 íløgur fyri renovatión 2012.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tilboð uppá útskifting av ketlinum og tilhoyrandi skipanum frá báðum veitarunum DPCT ávíkavist B&W eru móttikin tann 31/8-2012. Bæði tilboðini lógu væl hægri enn mett. Tískil varð í tveimum umførum roynt at fáa nýggj og endurskoðaði tilboð frá báðum veitarunum, fyri at kanna møguleikar fyri at fáa lækkað kostnaðin. Seinastu tilboðini vórðu móttikin ultimo nov./primo des. 2012, men úrslitið av royndunum broytti ikki munandi uppá prísin, meðan góðskan á veitingini lækkaði munandi. Hóast DPCT hevur funnið sparingar fyri ávíkavist áleið 1,5 og 2,5 mió., eru seinnu tilboðini tí minni áhugaverd enn tey fyrstu.

Víst verður til j.nr 2009-2549-44, sum er notat frá ráðgevaranum RAMBØLL *“Beslutningsnotat efter gennemgang af tilbud for renovering af TKKF’s kedel og tilhørende udstyr”*, dagfest 20-01-2013, fyri eina neyva lýsing av útbjóðingargongdini, lýsing og sammeting av tilboðunum, grundgevingum fyri niðurstøðu og tilmæli um víðari framferð.

Niðurstøðan og tilmæli í nevnda notati er, at arbeiða víðari við tilboði 1 frá DPCT, sum verður mett at vera tað besta tilboðið, út frá einum heildarsjónarmiði grundað á teknisk, fíggjarlig og ábýrgdarviðurskifti (ábyrgd av samskipan, projekt- og byggileiðslu, processábyrgd, garantiskyldur), umframt at hetta tilboðið gevur bestu samlaðu framtíðartryggjaðu loysnina.

Tilboðini frá hinum veitaranum B&W eru væl hægri enn tilboðini frá DPCT á felags sammetingargrundarlagi, og tískil verður mælt til í fyrsla lagi at arbeiða víðari við DPCT.

Rambøll vísir á møguleika fyri at fremja útskiftingina yvir 2 fíggjarár (2013 og 2014), og hevur gjørt uppskot til tíðarætlan og cash-flow í hesum sambandi (í áðurnevnda notati, j.nr. 2009-2549/44).

Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting av øllum projektinum, j.nr. 2009-2549/45. Samlaður kostnaður fyri øll arbeiðir í.s.v. útskiftingina av ketlinum og tilhoyrandi skipanum, verður sambært kostnaðarmetingini kr. 28,7 mió. u/mvg ella 30,4 mió. v/6,25 % mvg. Í 2011 og 2012 er játtað í alt kr. 0,564 mió. Av tí at ávísir partar av arbeiðnum (múrverksarbeiði og útskifting av skakt) kann metast sum viðlíkahald/rakstur, verður mælt til at fíggja hesar partar av rakstrinum hjá KB. Tískil verður samlaði tørvurin at fíggja av íløgum kr. 29,034 mió. v/6,25 % mvg.

**Viðmerking frá Brennistøðini.**
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini tekur undir við niðurstøðuni og tilmælinum frá Rambøll, um at tilboð 1 frá DPCT er besta tilboðið og at hendan “totala” loysnin samlað sæð er tann besta loysnin fyri Brennistøðina og Tórshavnar kommunu. Loysnin er teknisk góð, viðførir betri plássviðurskifti, betri arbeiðsumhvørvi og er ein framtíðartryggjað heildarloysn, sum einans fæst við at fremja alla loysnina undir einum.
Sera týdningarmikið er eisini, at í mun til seinnu tilboðini eru viðurskiftini í fyrsta tilboðnum viðvíkjandi processábyrgd, koordinerings- og projektleiðsluábyrgd, og garantiábyrgd greiðari og tryggari.

**Fíggjarlig viðurskifti:**

Avgerðin hjá heilsu- og umhvørvisnevndini 27. sept. 2011 tók støði í kostnaðinum av eini loysn, sum varð framd á einari brennistøð á Bornholm, sum er meinlík henni hjá Tórshavnar kommunu. Tað hevur tó víst seg, at veitarin hevur undirmett kostnaðin av ketilsloysnini á Bornholm, sum gjørdist munandi hægri. Tilboðið, sum Tórshavnar kommuna hevur fingið, svarar sambært Rambøll væl til tann kostnaðin, sum ketilin á Bornholm skuldi havt kostað. Tað er tískil púra ósannlíkt, at kommunan kann fáa eina loysn sum liggur nærhendis tí kostnaðinum, sum tað tá var mett at koma at kosta, at utskifta ketilin. Tilboðini geva eisini týðiliga ábending um tað.

Hetta broytir tískil fíggjarligu fortreytirnar munandi.

Málið um endurnýggjan av ketlinum varð reist í 2009, við tilmæli um at skifta ketilin í 2011. Fíggjarnevndin samtykti 18. november 2009 at viðgera tað í sambandi við langtíðaríløguætlanina. Útskiftingin bleiv tó útsett og ikki gjørd í 2011, orsakað av øðrum átrokandi íløgum.

Hóast kostnaðurin nú kortini vísir seg at gerast áleið tann sami, sum mett varð av Rambøll í 2009, (j.nr. 2009-2549/9), so er veruleikin tann, at kommunan hevur ikki nakað veruligt val, tí verandi ketil kann bert koyra í stutta tíð afturat, og gerst minni og minni effektivur, so hvørt sum alt fleiri og fleiri rør verða “proppaði” vegna lekar, eins og útskiftingin longu er útsett. Ketilin er frá 1987, og er nú sostatt 25 ára gamal.

Á fíggjarætlanini fyri 2013 eru avsettar kr. 10 mió. til útskiftan av ketli á Brennistøðini.

Neyðugt er tí hjá býráðnum at viðgera málið við atliti til eina tekniska og eina fíggjarliga loysn, og kann umsitingin í hesum sambandi vísa á hetta sum ein møguleiki:

1. At projektið verður framt yvir 2 fíggjarár (2013 og 2014), við einum íløgukarmi í alt á kr. 29,034 mió. íroknað 6,25% mvg,
2. At játtaðar verða kr. 10 mió. av íløgum fyri renovatión 2013, konto 7175
3. At játtaðar verða kr. 19,034 mió. av íløgum fyri renovatión í 2014, kto 7175.

Av øðrum møguleikum sum kunnu umhugsast er lántøka ella at gera eina avgjaldsavtalu við veitaran. Í báðum førum koma rentuútreiðslur afturat, sum ikki eru íroknaðar omanfyri nevnda fíggjartørv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur málið um fígging upp til politiska viðgerð.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Ásannandi at tað er átrokandi at fáa eina loysn, mælir nevndin til at játta kr. 10 mió. av íløgum í 2013 og at avsettar verða kr. 19,1 mió. á íløguætlanini fyri 2014 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Somuleiðis samtykti nevndin at mæla til, at umsitingin og ráðgevin fáa heimild at taka upp samráðingar og gera sáttmála um besta tilboðið, áðrenn tilboðsfreistin gongur út 31. mars 2013.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Samtykt at heimila umsitingini og ráðgevanum at taka upp samráðingar við atliti til at gera sáttmála, ið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina á fyrstkomandi fundi.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Samráðingar um sáttmála við DPCT vóru hildnar ultimo februar við Rambøll sum okkara samráðingarráðgeva. Semja varð funnin um nærum øll evni, og bert smálutir restaðu í at fáa uppá pláss eftir fundin. Við støði í samráðingunum var DPCT somuleiðis sinnað at lækka kostnaðin nakað, og var endaligur kostnaður upplýstur av umboði fyri DPCT eftirfylgjandi.

DPCT fór tó í likvidatión 28/2. Síðani hevur Rambøll loypandi haft samband við umboð fyri búgvið, og vóru ábendingar um eina danska yvirtøku/rekonstruktión av felagnum

Medio apríl komu boð um, at Danstoker A/S hevur yvirtikið partar av búnum eftir DPCT, og at fyritøkan vil halda áfram sum eitt dóttirfelag hjá Danstoker við navninum Boilerworks A/S, sum eisini var gamla navnið á fyritøkuni.

Fyrst í mai bað Danstoker/Boilerworks um fund við TK/Rambøll um projektið, sum DPCT hevði givið tilboð uppá, og sum Danstoker sigur hóskar til framtíðar strategi felagsins.

Fundur við Danstoker/Boilerworks varð hildin á høvuðssætinum hjá Danstoker í Herning tann 23/5 (j.nr. 2009-2549/51). Niðurstøðan á fundinum var, at samráðingarúrslitið við DPCT, herundir endaligi kostnaðurin á kr. 23,1 mió., ið var upplýstur av umboðum fyri DPCT eftirfylgjandi, verður grundarlag fyri sáttmála millum Tórshavnar kommunu og Boilerworks A/S um endurnýggjan av ketlinum.

Avtalað var, at Rambøll eftir fundin ger neyðugar rættingar av sáttmálaskjølunum, m.a. broytt nøvn og neyðuga tillaging av tíðarætlan v.m., soleiðis at sáttmálin kann góðkennast í nevndum og býráðnum í juni og síðani undirskrivast ultimo juni.

Kostnaðarmetingin er dagførd, við støði í dagførda tilboðsprísinum hjá Boilerworks. Harumframt eru smærri broytingar í metingini, m.a. at eyka ráðgevaraútreiðslur á 0,1 mió. eru komnar aftrat vegna serligu støðuna, og at metingin av kostnaðinum til burturkastviðgerð í umbyggingartíðini er økt 0,2 mió.
Kostnaðarmetingin fyri alt projektið er nú áljóðandi 30,174 mió., og fíggingartørvurin av íløgum er 28,339 mió. við 6,25 % MVG.

Fyriliggjandi skjøl:
J.nr. 2009-2549/51: Fundarfrágreiðin frá fundi við Danstoker /Boilerworks
J.nr. 2009-2549/52: Danstoker: Hensigtserklæring
J.nr. 2009-2549/53: Útkast til sáttmála (verður væntandi endaliga liðugt 7/6)
J.nr. 2009-2549/54: Dagførd kostnaðarmeting fyri alt projektið

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti til sáttmála (j.nr. 2009-2549/53), og at heitt verður á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, um at játta kr. 10,0 mió. av markaðum íløgum fyri 2013 og kr. 18,4 mió. av íløgum fyri 2014 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og vísir eisini til samtyktina í teknisku nevnd 6. februar 2013 og beinir málið í býráðið um figgjarnevndina.
Eisini samtykti nevndin at heita á býráðið um at velja bygginevnd til verkætlanina.

**Ískoyti:**

Arbeiðið uppá ketilin er í gongd og verður liðugt í 2014. Í íløguætlanini fyri 2014 eru avsettar kr. 19 mió. til verkætlanina, sambært sáttmálum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin óg leiðarin á Verkætlanardeilini mæla til, at játta kr. 19 mió. av avsetta íløgukarminum fyri 2014 til verkætlanina og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 100/14 Planlegging í 2013 av at savna kloakkir út á sjógv í Kaldbak og Kaldbaksbotn, smb. spillivatnsætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 51/14 | 14/01988-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 101/14 | 14/01988-2 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 100/14 | 14/01988-2 |
| 4 Kaldbaksnevndin | 21.05.2014 | 16/14 | 14/01988-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá TK, er ætlanin at fara undir arbeiðið at savna kloakkirnar Á Bø í Kaldbak í skipaða leiðing út á streymasjógv. Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum at skipa kloakkirnar so tær ikki renna í áir og løkir og beina tær út á streymasjógv eftir forskriftum sum US setur.

Fíggjarlig viðurskifti:
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 1,62 mio. sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 14/01988-3, og er ynski um at fáa heimild at fáa SMJ, ráðgevandi verkfrøðingar, at gera útbjóðingartilfar, bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og seta arbeiði í verk. Ætlanin er at arbeiðið skal byrja í summar.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2014 er 4 mió. kr. og er ætlanin at nýta kr. 1,62 mio. til dagføring av útleiðingunum Á Bø í Kaldbak

## Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 1,62 mio.kr. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2014, konto 6875 (Kloakkir) L68017 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Kaldbaksnevndin 21. mai 2014:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 101/14 Planlegging í 2013 av at savna kloakkir út á sjógv í Kollafirði, smb. spillivatnsætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 52/14 | 14/01989-8 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 102/14 | 14/01989-8 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 101/14 | 14/01989-8 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá TK, er ætlanin at fara undir arbeiðið at savna kloakkirnar Við Sjógv í Kollafirði í skipaða leiðing. Talan er um at skipa kloakkleiðing frá Botnavegnum, Við Sjógv, Bøgøtu og Steinsgøtu og leiða tær út á streymasjógv. Sí tekning j.nr. 14/01989-6.

Fíggjarlig viðurskifti:
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 1.950 mio. kr,- sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 14/01989-7, og er ynski um at fáa heimild at fáa Sp/f Martin E. Leo at gera útbjóðingartilfar, bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og seta arbeiði í verk. Ætlanin er at arbeiðið skal byrja í summar.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2014 er 4 mió. kr. og er ætlanin at nýta 1,95 mio. kr. til dagføring av útleiðingunum Við Sjógv í Kollafirði.

## Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 1,95 mio.kr. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2014, konto 6875 (Kloakkir) L68018 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 102/14 Stuðul til felagshús á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 64/14 | 14/02134-13 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 110/14 | 14/02134-13 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 102/14 | 14/02134-13 |

**Málslýsing:**
Argja Bóltfelag arbeiðir við ætlanum um at innrætta hæddina undir áskoðaraplássunum í AB-skýlinum, har gerast skulu umklæðingarrúm, goymslurúm og felagshøli. Í hesum sambandi hevur Argja Bóltfelag søkt um stuðul frá Fótbóltssambandi Føroya, og í skrivi, dagfest 13. desember 2012, varð boðað frá, at Fótbóltssambandið stuðlar AB við kr. 600.000 til nýtt felagshús á Argjum.

Síðani vendi Argja Bóltfelag sær til Tórshavnar kommunu um stuðul til arbeiðið. Tórshavnar kommuna hevur fingið kostnaðarmeting og tekningar frá Argja Bóltfelag, og samlaði kostnaðurin verður sambært kostnaðarmetingini kr. 8.264.239,50, íroknað 25% mvg.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at viðgera málið saman við íløguætlanini 2014.

**Ískoyti:**
Argja Bóltfelag heitir á kommununa um at fáa stuðul til at gera partar av arbeiðinum at innrætta skýlið til tess ikki at missa stuðulin frá FSF kr. 600.000.

Felagið hevur fingið tilboð uppá planering, stoypa gólv, múra rest av útveggum til almenn wc og goymslu/fýrrúm í báðum endunum, allar hurðar og øll vindeygu, øll innandura kloak- og frárensluviðurskifti og hitarør, og lutvíst rør til heitt og alt vatn. Tilboðið er kr. 1.178.530 u/mvg. Arbeiðið er mett at vera liðugt síðst í januar 2014.

Felagið bjóðar sær standa fyri arbeiðinum og søkir um kr. 600.000 í stuðli.

Tá hetta arbeiðið er gjørt, verður næsta stig liðugtgerð av báðum endunum, herundir at gera almennu wc-ini, hitaverk og rottanga. Eftir tað kunnu umklæðingarrúm v.m. gerast so hvørt fíggingin er tøk.

Treyt fyri stuðli er, at kommunan fær endaligan byggiroknskap til góðkenningar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 600.000 í stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 27. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 4. desember 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 600.000 í stuðli av konto 5370 Stuðul til íløgur og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 12. desember 2013:** Einmælt góðkent, at Sjúrður Olsen fór av fundi, meðan málið varð viðgjørt.

Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at stoypa, planera v.m. sum omanfyri lýst er gjørt. Harumframt hevur kommunan grivið nýggja leiðingsgrøv til kloakk, vatn, el, fipur v.m. umframt annað lendisarbeiði fyri kr. 660.000, sum ætlanin hevur verið skal býtast javnt millum íløgujáttan til AB-skýlið og rakstrarkontu á teknisku fyrisiting.

AB søkir nú um at halda fram við arbeiðinum við at innrætta sjálvan bygningin, samlað kostnaðarmeting við innheintaðum tilboðsprísum er kr. 5,4 mió u/mvg. Talan er um fýra umklæðingarrúm, dómararúm, almenn wc v.m. og felagshøli. Partur av útreiðslunum er til innbúgv o.a. uml. kr. 200.000. Upplýst er kommununi, at AB hevur søkt FSF um stuðul til liðugtgerð av skýlinum.

Á íløguætlanini fyri 2014 er játtan kr. 4,2 mió tøk til ítróttarøkið á Argjum. Helvtin av teim áðurnevndu kr. 660.000 ætlast fíggjað av hesi játtan, eftir eru sostatt kr. 3.870.000, sum íroknað kommunalt mvg er 67% av tilboðskostnaðinum.

Skal AB standa fyri arbeiðinum, er neyðugt at fáa upplýst, hvussu felagið ætlar at fíggja írestandi upphæddina kr. 1,5 mió. Umframt stuðul frá FSF, hevur felagið lagt upp til fígging við sjálvbodnum arbeiði.

<u>Treytir:</u>
Kommunan skal tí seta sum treyt fyri fígging ella stuðli, at talan er um endaligan stuðul til byggingina, at felagið upplýsir, hvussu írestandi upphæddin verður fingin til vega, og at øll neyðug byggiloyvi og myndugleikaloyvi annars eru fingin til vega, áðrenn byggingin byrjar.

Eisini verður at seta sum treyt, at umboð fyri kommununa tekur lut á øllum projektfundum, og at stuðul verður goldin út à conto eftir umbøn fyri gjørt og váttað arbeiði. Harumframt er krav, at stuðul verður fluttur bert um serstaka byggikontu uttanfyri raksturin hjá felagnum annars, og at endaligur byggiroknskapur verður latin kommununa at góðkenna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til

- at játta kr. 3.870.000 til at innrætta hølini undir AB-skýlinum og kr. 330.000 til gjørt leiðingsarbeiði, sum tekniska fyrisiting hevur staðið fyri, í alt kr. 4,2 mió av íløgukontu 5775 ítróttaranlegg, og
- at AB stendur fyri at fremja arbeiðið at innrætta hølini eftir omanfyri nevndu treytum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 1. mai 2014**: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 1. mai 2014**: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 103/14 Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin - víðkan av gravøki móti Sandá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 125/14 | 14/02585-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 105/14 | 14/02585-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 103/14 | 14/02585-1 |

**Lýsing av málinum-samandráttur:**
Seinast í nitiárunum varð farið undir at grava í nýtt graviøki suðurvestanvert Kapellið. Hetta økið varð tá mett tilsamans at rúma 1355 gravum. Verandi bruttovíddartørvur á einari grøv er uml. 4,5 m². Tá eru vegir og gøtur íroknað, og svarar tað til 560m² av nýggjum øki um árið. Tørvur er á at fara undir at fyrireika nýtt grevstrarøki.

Talið á jarðarferðum her er uml. 140 um árið. Mett verður at nýtt gravøki skal vera tøkt at grava í um 2-3 ár. Talið á jarðarferðum veksur ár um ár, og við tí eisini víddartørvurin. Mælt verður til víðkanar projektið fevnir um í minsta lagi 10.000 m².
Arbeitt hevur verið á býarskipanardeildini við uppskotum um, hvussu økið kann skipast.

Matr.nr.: Partar av 1073,1071, 1068 og 1067
Eigari: Tórshavnar kommuna
Staðseting : Millum Glyvursveg, Vegin í Vika og Sandá
Vídd samlað økisvídd: uml. 40.000 m²
Verandi víddartørvur : 10.000 m²
Friðingar: Náttúrufriðing
Verandi brúk: Traðarbrúk, beitilendi og leigumál
Kloakk: Høvuðskloakk gongur gjøgnum økið
Atkomuviðurskifti: Velbastaðvegur og vegurin í Vika.
P-pláss: Verandi p-rkering við kirkjugarðin og skipan av nýggjum
Áskot/mold: Tørvur á áskoti 25%
Fíggjarlig binding: 23-25 mill.

**Lendiseyðkenni:**
Vestur–eysturgangandi áardalur sum rennur út i Sandagerði. Landslagið horvir suðurvestureftir oman móti Sandá. Sunnanfyri ánna, Argjamegin, liggja sethúsaøki digst oman til ánna. Frítt útsýni er av Kongavarða og vesturargjum oman í kirkjugarðåin, meðam hann ikki sæst væl frá Havnasíðuni. Kirkjugarðurin kemur at liggja millum Glyvursvegin, Vikavegin og Sandá. At Glyvursvegur og brúgvin verða bygd fyri vestan, fer væntandi at skapa eitt betri veðurlag á kirkjugarðinum. Nakað av lívd fyri vestanættunum, ið liggja tráðar oman gjøgnum Havnardal.
Verandi nýtsla er traðarbrúk. Økini eru leigað út við sáttmálum til traðarbrúkarar. Mest til beiti fyri seyð, ross og flogfenað. Hesir sáttmálar mugu sigast upp í góðari tíð framman undan.

Ávirkan á nærøkini verður mett lítil, liggur ikki áloypandi í lendinum. Og hædd verður tikin fyri nærleika til Sandá.

Víðkananmøguleikar: Samlaða økisvíddin er uml. 40.000 m². Skotið verður upp at arbeiða vestanífrá Glyvursvegi, og harfrá suðureftir í stigum. Í fyrstu atløgu at byrja við 10.000 m².

**Lógir og ásetingar o.a.:**

Umhvørvisárin verður flokka í umhvørvisbólki??
Náttúrufriðingarlógin Sandá er á, sum er breiðari enn 4. m í botninum, og krevur viðgerð av friðingarrnevndunum,

Matriklarnir liggja í umráðispartinum D1, í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Verandi kirkjugarður er eisini merktur D1.
Atkomuviðurskifti: Góðir og stórir vegir føra til kirkjugarðin. Parkeringin skal viðgerast og útbyggjast.

Skotið verður upp at fremja víðkanina í fýra stigum umleið 10.000 m² hvørt umfar, so sum higartil er farið fram. Samlað bruttovídd á víðkanarøki er 40.000 m²
Søkt verður um at fara undir projektering, og at arbeiðið verður boðið út í innbodna lisitatión.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarskipanardeildin mæla nevndini til at góðkenna fyriliggjandi heildarskitsuuppskot til staðseting og skipan. Harumframt at veita loypandi 3 mill. kr. um árið av íløgum, til projektering, útbjóðingartilfar og fremjing av ætlan, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 104/14 Gøtuljósíløgur 8275 – Orkusparandi tiltøk Gøtuljósíløgur 8275 – Orkusparandi tiltøk

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 126/14 | 14/02612-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 106/14 | 14/02612-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 104/14 | 14/02612-1 |

**Málslýsing:**
Fyri at tálma tí støðugt hækkandi elprísi, hevur býráðið avsett kr. 1 millión til orkusparandi tiltøk innan gøtuljós á íløgum fyri 2014.

Slík tiltøk kunnu vera LED-ljós og tráðleys stýring. LED ljós lækka orkunýtsluna við 60 - 70 %. Ikki er so lætt at seta tal á sparing í smb. við tráðleysu stýringina, men roknast kann við 10-15 %. Hinvegin fær ein nógv neyvari stýring, so at ljósini tendra og slókna tá tey skulu, og hetta er borgarin glaður fyri.

Fyri at fáa sum mest burturúr játtanini mælir leiðarin fyri vatn- og gøtuljósdeildunum mæla til at býta upphæddina í helvt, og keypa u.l. 175 LED armaturir fyri kr. ½ mill., og u.l. 14 stýringar fyri kr. ½ mill.

Árliga sparingin við LED ljósunum verður u.l. 175 stk x 0,15 kW x 3.500 h x 0,6 x kr. 1,43 x 1,0625 = kr. 83.756.

Árliga sparingin við stýringum verður mett til : 14 stk x 40.000 kWh x 0,1 % x kr. 1,43 x 1,0625 = kr. 85.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býðarverkfrøðingurin og leiðarin fyri vatn- og gøtuljósdeildunum mæla til at játta kr. 1 mill. av markaðu íløgunum fyri 2014, kto 8275 «orkusparandi tiltøk innan gøtuljós», til íløgur samsvarandi omanfyri standandi, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 105/14 Pauli Dam Joensen : Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 135 og 32a á Argjum - broyting av byggisamtykt (2006-3482)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 128/14 | 14/02618-30 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 105/14 | 14/02618-30 |

**Útstykking, matr. nr. 135a og 32a, Argir, umsókn frá Paula Dam vegna eigararnar Malla Dam o.fl.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsókn er komin frá Paula Dam, dagfest 15. juli 2009, sum vegna eigararnar av matr. nr. 135a Mallu Dam, Kjartan Dam Joensen og Paula Dam Joensen og eigaran av matr. nr. 32a Hans Petur Dánjal Dam, søkir um loyvi at útstykkja ognina matr. nr. 135 og 32a, á Argjum.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í A1 í 3. grundumráði.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Matr. nr. 135a er 7.078 m² til víddar.
Matr. nr. 32a er 7.557 m² til víddar.

Ætlanin er at býta stykkini sundur, soleiðis at tað verða 13 grundstykkir til sethús sum eru 500-656 m², umframt verandi hús. Tvey grundstykkir á 1690 og 1673 m² sum hvør sæar hava 4 raðhús. Harumframt verður parkering og fríøki.

Innkoyring verður frá Garðsgøtu.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarligt:**
Onga fíggjarliga binding fyri kommununa.

**Skjøl:**
Umsókn j.nr. 2006-3482/12
Revideráð tekning j.nr. 2006-3482/16

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin, í samráð við umsøkjaran, ger uppskot til serstaka byggisamtykt, at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur í samráði við umsøkjaran gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið. Talan er um eina útstykking uml. 17.300m² til støddar í einum øki, sum liggur í umráðisparti A1 í 3. grundumráði, og umfatar matr. nr. 32a, 135a, 135e og 135f, Argir.

Útstykkingin umfatar 13 grundstykkir til stakhús og 2 grundstykkir til tvíhús, umframt 2 grundstykkir hvørt til 4 samanbygd hús, eitt fríøki umframt felags parkeringspláss.
Tvey av grundstykkjunum til stakhús eru ábygd.
Vegatgongdin verður frá Garðsgøtu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini at góðtaka uppskotið til serstaka byggisamtykt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. november 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Eisini samtykti nevndin, at tá ið útstykkingin er liðug og góðkend, skal kommunan yvirtaka vegir og felagsøki uttan kostna fyri kommununa.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Paula Dam søkti, í juli 2009, vegna eigararnar av matr. nr. 135a og 32a, Argir, Malla Dam o.fl. (gamalt j.nr. 2006-3482), um sundurbýti av ognunum matr. nr. 135a og 32a, Argir. Býarskipanardeildin gjørdi eina serstaka byggisamtykt saman við umsøkjaranum, sum var samtykt av býráðnum tann 16. desember 2010. Serstaka byggisamtyktin var endaliga góðkend av Innlendismálaráðnum tann 10. mai 2011.

Nú eru eigararnir farnir í gongd við at projektera útstykkingina og ynskja nakrar smærri broytingar í hesum sambandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at broyta byggisamtyktina sambært uppskotið dagfest 8. apríl 2014.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**22. mai 2014** | Blað nr.: 66<br>Formansins merki: |

# 106/14 Millumtjóðagrunnur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 96/14 | 14/02801-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 106/14 | 14/02801-1 |

**Málslýsing:**
Talan er um eina broyting, sum er neyðugt at gera í 2014, tí endamálslýsing fyri konto 5361 ikki er nøktandi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at flyta kr. 200.000,- av konto 5361, millumtjóðagrunnar, á konto 7312, vinnutiltøk, at fíggja átøk í sambandi við samstarvið millum Tórshavnar kommunu og Stavanger.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 107/14 Frítíðarskúlin Spírin í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 3/14 | 14/01091-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 60/14 | 14/01091-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 15.05.2014 | 122/14 | 14/01091-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 142/14 | 14/01091-1 |
| 5 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 107/14 | 14/01091-1 |

**Málslýsing:**
Frítíðarskúlin í Hornabø var settur á stovn í 1996 og er bert normeraður til 40 børn. Barnatalið vaks tó so skjótt, at hann rættiliga tíðliga gjørdist ov lítil. Tí bleiv Spírin, sum verandi frítíðarskúli í Havnardali eitur, boðin okkum í 2005 sum eitt alternativ eftir ætlan eitt stutt tíðarskeið.

At byrja við fóru 20 børn út í Spíran, men barnatalið vaks støðugt, og tí var gjørt av at hava allan 2. flokk har úti, meðan 1. flokkur varð verandi í Hornabø.

Í 2010, tvey ár eftir at ein varandi loysn av røttum skuldi verið gjørd, var vorðið so trongt í Spíranum, at neyðugt varð at leiga níggju arbeiðsbingjur frá byggifelagnum TG Verk at hava afturat leigaðu hølunum hjá Føroya Ríðingarfelag.

Við børnunum í 3. flokki eru nú 70-75 børn til samans í Hornabø og í Spíranum, og tað er umleið tvífalt so nógv, sum frítíðarskúlin upprunaliga varð normeraður til.

Sæð úr einum námsfrøðiligum sjónarhorni og fyri trivnaðin hjá børnunum var tað sera beinrakið í síni tíð at stovnseta úti-frítíðarskúla Spíran úti í Havnardali. Børnini trívast óføra væl har úti, har tey sleppa at vera úti í náttúruni, at fáast við djórini og spæla bóndur, og har dentur annars er lagdur á fysiskt virksemi. Tey læra um náttúruna við at brúka hana og virka í henni. Her er felags ábyrgd av djórahaldinum, jarðardyrkanini, hegning og bygging.

Í Spíranum verður tað stutt sagt lagt í børnini at fara væl við náttúruni og vera góð við kríatúrini, samstundis sum tey fáa eina rætta, ópyntaða mynd, sum er í samsvar við veruleikan, av, hvussu náttúran og dýrini verða gagnnýtt av okkum menniskjum. At børnini trívast sera væl í Spíranum sæst serliga við, at børn, ið annars hava trupult við at tillaga seg, klára seg fínt her. Eisini vísa kanningar, at børn, sum eru nógv úti, eru minni sjúk enn børn, ið eru nógv inni.

Við at byggja ein nýggjan frítíðarskúla í Havnardali kunnu bráfeingis trupulleikarnir við plásstroti fáa eina varandi loysn, samstundis sum hann kann verða øllum børnum í kommununi, frá skúlaaldri og upp í 18 ár, til fragd og frama.

Eftir ætlan verður frítíðarskúlin í Hornabø/Spíranum, sum í dag hevur børnini í Venjingarskúlanum, partur av nýggja Vesturskúlanum. Tað er tó átrokandi at fáa gjørt umstøðurnar í Havnardali nøktandi til nýggj loysn fyriliggur.

Í mun til fyrireikingar at gera heildarætlan fyri frítíðarskúlaøkið hevur verið nevnt sum uppskot at byggja ein úti-frítíðarskúla ella náttúruskúla, sum eftir eini skipan var felags fyri allar frítíðarskúlar/skúlar í kommununi, so at øll børn fingu lut í hesum øðrvísi tilboði. Spírin er í dag staðsettur í D2 øki, ítróttarøki, men ein meira hósandi staðseting er hinumegin

ríðibreytina fram við vegnum inn í Havnardal. Hetta økið er tó D1 øki, frílendi. Ein bygging á økinum krevur broyting í byggisamtyktini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til prinsippiella viðgerð av uppskotinum um at byggja ein úti-frítíðarskúla ella náttúruskúla í Havnardali, og í hesum sambandi taka støðu til at heita á teknisku nevnd um broyting í byggisamtyktini.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Umrøtt og avgjørt at skipa ein temadag um frítíðarskúlaøkið í Tórshavnar kommunu 5. mars 2014, kl. 12.00.

**Ískoyti:**
Temadagur um frítíðarskúlaøkið var 26. mars 2014.

Støðan hjá Spíranum í Havnardali er í løtuni tann, at leigusáttmálin um bingjurnar er uppsagdur, tí bingjurnar vóru í sera ringum standi.

Harumframt hevur Arbeiðseftirlitið í skrivi til kommununa staðfest, at vælferðarskipanin fyri starvsfólkini í leigaðu hølunum hjá Ríðingarfelagnum er ikki nøktandi, og kommunan er biðin um at greiða frá, hvussu ætlanin er at loysa málið.

Víst verður annars til málslýsingina omanfyri bæði um framtíðar ætlan fyri Spíran, sum síggjast skal saman við byggiætlanin um nýggjan Vesturskúla, og bráðfeingis tørv á hølum til frítíðarskúla ætlað børnunum í 2. og møguliga 3. flokki í Venjingarskúlanum.

Eingin játtan er tøk til bráðfeingis loysn, og sum støðan er, kann kommunan ikki veita trygd fyri frítíðarskúlaplássi til onnur enn børnini í 1. flokki í Venjingarskúlanum, og sum halda til í Hornabø.

Mest nærliggjandi bráðfeingis loysn í Havnardali er modulloysn antin leigað ella keypt at seta á tann partin av økinum, sum er D2 ítróttarøki, tvs. á sama stað ella í nánd av har, sum Spírin hevur hildið til. Hølistørvurin er størri, um kommunan eisini sigur upp leiguavtaluna við Ríðingarfelagið. Neyvari meting um hølistørv og kostnaðarmeting skal gerast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til, at játtan verður fingin til vega at útvega Spíranum fyribilshøli í Havnardali, og at tað í hesum sambandi verður gjørd neyvari meting um hølistørv.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin er samd um at finna eina loysn, eins og kostnaðarætlan fyri hølistrupulleikunum hjá frítíðarskúlanum í Havnardali at leggja fyri aftur mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 15. mai 2014:** Umsitingin legði fram ætlan og kostnaðarmeting fyri fyribilsloysn áljóðandi kr. 3,7 mió við øllum. Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrún Mohr og Bogi Andreasen mæla til at játta 3,7 mió til endamálið av kontu 5775 L57016 golfvøllur, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at játta upphæddina av íløguætlanini fyri 2014 til golfvøllin, umframt at upphæddin til golfvøllin verður játtað á íløguætlanini 2015. Málið beint í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 108/14 Hoyvíkar skúli - høvuðsumvæling og dagføring

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 61/14 | 14/01124-8 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.05.2014 | 123/14 | 14/01124-8 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 143/14 | 14/01124-8 |
| 4 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 108/14 | 14/01124-8 |

## Málslýsing:

Hoyvíkar skúli, er upprunaliga bygdur í 1976. Síðan er hann útbygdur í 1992 og 2001.

Hoyvíkar skúli er eyðkendur við eini stórari glaspyramidu upp úr takinum. Skúlin er býttur upp soleiðis, at tvær hallir eru við skúlastovum rundanum. Í gomlu høllini er námsfrøðiligur tænastudepil. Í kjallaranum eru smíðstova og evningsstova, og á loftinum eru hondarbeiðsstova, køkur, sangstova og heilsusystir. Í nýggjasta partinum av skúlanum eru alis- og evnafrøði og lívfrøði. Í smábarnaskúlanum eru 1. og 2. flokkur og frítíðarskúli.

Í Hoyvíkar skúla ganga næmingar úr 1. upp í 9. flokk. Skúlin er ætlaður til tveir flokkar í hvørjum árgangi. Í skúlanum eru haraftrat næmingar í serflokkum, tørvur er á trimum stovum til henda bólkin.

Í skrivi frá skúlastýrinum dagfest 3.september 2013 verður víst á, at neyðugt er at umvæla og dagføra skúlan. Skúlastýrið ger vart við, at karmarnir eru ótíðarhóskandi á fleiri hættir. Umstøðurnar til handverk og list eru ikki nóg góðar, sum dømi verður evningsstovan nevnd. Starvsfólkarúmið er ov lítið, og umstøðurnar hjá lærarunum til fyrireiking og fundir eru ikki nøktandi.

Mentamálanevndin hevur samtykt ein yvirskipaðan skúlapolitikk í Tórshavnar kommunu, sum eisini setur krøv, tá nýggir skúlar verða bygdir, og tá verandi skúlar verða um- ella útbygdir ( mál 2007-0504/4). Í samtyktini stendur m.a. , at umstøðurnar hjá næmingum og lærarum skulu verða góðar til eina fjølbroytta undirvísing við atliti at undirvísingarhølum, serstovum, fakhølum, arbeiðsrúmum hjá lærarum og næmingum og felagshøll til undirvísingartiltøk og sosiala samveru.

Høvuðsumvæling og dagføring av Hoyvíkar skúla eigur at verða framd sambært hesi samtykt. Mett verður, at høvuðsumvælingin kann ikki bíða longur, og tí eiga fyrireikingar av bráðfeingis umvæling og dagføring av Hoyvíkar skúla at verða settar í verk nú.

Í 2005 bleiv ein støðulýsing gjørd av skúlanum, og vísti hendan, at tørvur er á stórum ábótum í bygninginum.

Niðurstøðan í hesi støðulýsing var greið. Har stóð m.a. : “Sum heild kann sigast, at 1. og 2. byggistig treingja til størri ábøtur, serliga útveggurin og vindeyguni krevja stórar ábøtur. Meðan í 3. byggistigi er neyðugt við broytingum í gólvinum. Mest átrokandi er at umvæla 2. byggistig.”

Húsaumsitingin hevur gjørt ávísar umvælingar út frá støðulýsingini. Men orsakað av, at skúlanum tørvar so stórar og umfatandi umvælingar serliga á útveggunum, eigur leisturin, ið brúktur er í høvuðsumvælingararbeiðnum í Eysturskúlanum, at verða nýttur.

Í fíggjarætlanini fyri 2013 á konto 4175 Dagføring av skúlum eru tvær milliónir settar av til Hoyvíkar skúla.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til, at umboð fyri mentamáladeildina, húsaumsitingina og skúlaleiðsluna saman við ráðgeva gera eitt kostnaðarmett upplegg fyri høvuðsumvælingina. Uppleggið verður gjørt við støði í støðulýsingini frá 2005 og viðmerkingum frá skúlaleiðslu og umsiting. Síðani verður umvælingarætlanin løgd fyri mentamálanevndina.

Í fíggjarætlanini fyri 2013 á konto 4175 Dagføring av skúlum eru 2.000.000 kr. settar av til Hoyvíkar skúla. Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til at játta 200.000 kr. av hesi upphædd til ráðgevarauppgávuna.

**Mentamálanevndin 6. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. november 2013:** Samtykt.

**Býráðið 28. november 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Tað er ikki pláss fyri øllum núverandi virksemi í skúlanum. So skal Hoyvíkar skúli halda fram sum nú, er neyðugt at økja um fermetrarnar. Haraftrat er umráðandi, at hann verður dagførdur, so hann lýkur krøv til nútíðarundirvísing.

Hetta skúlaárið er undirvísing í tónleiki flutt í Hoyvíkar kirkju, og í 9. árgangi er bert ein flokkur. Men komandi skúlaár eru tveir flokkar í hvørjum árgangi og at hava tónleik í kirkjuni, er ikki ein haldgóð loysn. Sostatt er neyðugt at útvega eina tónleikastovu og eitt vanligt undirvísingarhøli til skúlaárið 2014/2015.

Í sambandi við høvuðsumvæling av Hoyvíkar skúla er neyðugt at fáa greiði á, um talan er um umvæling og dagføring í verandi kørmum, ella um útbygging kann koma upp á tal, so rúm verður fyri øllum virkseminum, sum nú er í skúlanum.

Umboð fyri mentamáladeildina, verkætlanardeildina og leiðslu skúlans vísa á tveir møguleikar at víðka karmarnar í skúlanum.

Annar er, at lítli skúlabygningurin, har eisini frítíðarskúlin og Klubb 188 halda til í dag, verður brúktur til skúlavirksemi burturav við plássi til forskúla, 1., 2. og 3 flokk. Á ovaru hæddini í lítla skúlanum eru tvær dupultstovur, har 1. og 2. flokkur eru. Her kunnu 2. og 3. flokkur hava sínar heimastovur. Í niðaru hæddini skulu so høli innrættast til forskúla og 1. flokk.

Fyrimunur við hesi loysn er, at øll innskúlin verður savnað á einum stað, men fortreyt er, at nýggjur bygningur verður bygdur til frítíðarskúlan og Klubb 188.

Hin møguleikin er, at mittasti parturin av skúlanum verður tikin niður og bygdur upp aftur í tveimum hæddum. Skúlin flytur tá úr lítla skúlanum, so at hann kann brúkast til frítíðarskúla og Klubb 188 burturav. Pláss verður tá eisini til frítíðarskúla til forskúlabørn.

Við hesi loysn verður pláss fyri tí virksemi, sum er í skúlanum í dag, og møguligt verður at hava ein dagførdan skúla, sum ikki stendur aftan fyri hinar skúlarnar í høvuðsstaðarøkinum.

Mett verður, at høvuðsumvælingin er so umfatandi, at prísmunurin ímillum at høvuðusmvæla miðpartin á skúlanum og at taka hann niður og byggja av nýggjum er ikki so stórur.

Harumframt fer tað neyvan at bera til at hava alla undirvísingina í skúlanum, meðan umvæling, møgulig bygging og dagføring fer fram. Mett verður, at frægasta loysn fyri skúlagongdina er at fáa til vega fyribilshøli, soleiðis at ein partur av skúlanum húsast har, meðan arbeitt verður.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at arbeiða víðari eftir ætlan, har bygt verður uppí sjálvan skúlan, so at alt skúlavirksemið rúmast har. Í mun til bráðfeingis tørvin á hølum verður mælt til at kanna møguleikar fyri fyribilshølum.

Tað er ikki pláss fyri øllum núverandi virksemi í skúlanum. So skal Hoyvíkar skúli halda fram sum nú, er neyðugt at økja um fermetrarnar. Haraftrat er umráðandi, at hann verður dagførdur, so hann lýkur krøv til nútíðarundirvísing.

Hetta skúlaárið er undirvísing í tónleiki flutt í Hoyvíkar kirkju, og í 9. árgangi er bert ein flokkur. Men komandi skúlaár eru tveir flokkar í hvørjum árgangi og at hava tónleik í kirkjuni, er ikki ein haldgóð loysn. Sostatt er neyðugt at útvega eina tónleikastovu og eitt vanligt undirvísingarhøli til skúlaárið 2014/2015.

Í sambandi við høvuðsumvæling av Hoyvíkar skúla er neyðugt at fáa greiði á, um talan er um umvæling og dagføring í verandi kørmum, ella um útbygging kann koma upp á tal, so rúm verður fyri øllum virkseminum, sum nú er í skúlanum.

Umboð fyri mentamáladeildina, verkætlanardeildina og leiðslu skúlans vísa á tveir møguleikar at víðka karmarnar í skúlanum.

Annar er, at lítli skúlabygningurin, har eisini frítíðarskúlin og Klubb 188 halda til í dag, verður brúktur til skúlavirksemi burturav við plássi til forskúla, 1., 2. og 3 flokk. Á ovaru hæddini í lítla skúlanum eru tvær dupultstovur, har 1. og 2. flokkur eru. Her kunnu 2. og 3. flokkur hava sínar heimastovur. Í niðaru hæddini skulu so høli innrættast til forskúla og 1. flokk.

Fyrimunur við hesi loysn er, at øll innskúlin verður savnað á einum stað, men fortreyt er, at nýggjur bygningur verður bygdur til frítíðarskúlan og Klubb 188.

Hin møguleikin er, at mittasti parturin av skúlanum verður tikin niður og bygdur upp aftur í tveimum hæddum. Skúlin flytur tá úr lítla skúlanum, so at hann kann brúkast til frítíðarskúla og Klubb 188 burturav. Pláss verður tá eisini til frítíðarskúla til forskúlabørn.

Við hesi loysn verður pláss fyri tí virksemi, sum er í skúlanum í dag, og møguligt verður at hava ein dagførdan skúla, sum ikki stendur aftan fyri hinar skúlarnar í høvuðsstaðarøkinum.

Mett verður, at høvuðsumvælingin er so umfatandi, at prísmunurin ímillum at høvuðusmvæla miðpartin á skúlanum og at taka hann niður og byggja av nýggjum er ikki so stórur.

Harumframt fer tað neyvan at bera til at hava alla undirvísingina í skúlanum, meðan umvæling, møgulig bygging og dagføring fer fram. Mett verður, at frægasta loysn fyri

skúlagongdina er at fáa til vega fyribilshøli, soleiðis at ein partur av skúlanum húsast har, meðan arbeitt verður.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at arbeiða víðari eftir ætlan, har bygt verður uppí sjálvan skúlan, so at alt skúlavirksemið rúmast har. Í mun til bráðfeingis tørvin á hølum verður mælt til at kanna møguleikar fyri fyribilshølum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 15. mai 2014:** Umsitingin legði fram ætlan og kostnaðarmeting fyri fyribilsloysn áljóðandi kr. 2,7 mió við øllum. Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrún Mohr og Bogi Andreasen mæla til at játta 1,8 av íløgukontu til Hoyvíkar skúla og kr. 0,7 mió av íløgukontu til Vesturskúla til endamálið, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

## 109/14 Kvøldskúlin - hølisviðurskifti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.03.2014 | 56/14 | 14/01802-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 70/14 | 14/01802-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 119/14 | 14/01802-1 |
| 4 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 109/14 | 14/01802-1 |

**Málslýsing:**

**Mentamálanevndin 6. mars 2014:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri, kunnaði um málið.

Sigrun Mohr varð ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Býráðið keypti í mai 2013 ovaru sjónvarpsbygningarnar í Vørðsluni, t.e. matrikklarnar 537b, 538b og 538a. Ætlan við hesum var at savna størri part av Kvøldskúlavirkseminum har. Í sambandi við keypið varð greitt, at bygningarnir tørvaðu ábøtur.

Kvøldskúlin hevur ynski um at taka partar av bygningunum í nýtslu sum skjótast, og hevur skotið upp, at framflyting av rakstri hjá kvøldskúlanum kr. 1,5 mió verður brúkt til at gera klár høli til tónleik og veving. Hetta vísir seg tó ikki at vera so lætt at fremja.

Arkitektavirki hevur gjørt skitsuppskot til innrætting av bygningunum til kvøldskúla eins og kostnaðarmeting fyri umvælingum v.m. frá oktober 2013, samlað mett til uml. kr. 8,5 mió við øllum. Tekniska fyrisiting tekur stór fyrivarni við hesi kostnaðarmeting m.a. vísandi til, at talan er um renoveringsprojekt, og kostnaðarmetingin tí er uml. 13 mió umframt mvg, ókent og ráðgeving. Til at koma víðari verður mett neyðugt við neyvari prosjekteringsgrundarlagi og heildarætlan viðvíkjandi bygningunum.

Annað ivamál eru útreiðslur í sambandi við brúnna yvir um M.A. Winthersgøtu. Ynski hjá Starvsmannafelagnum er at taka hana niður í summar, men bygningurin hjá Starvsmannafelagnum veitir ognini hjá Tórshavnar kommunu streym. Hetta er ikki vanlig mannagongd, og støða skal tí eisini takast til nýggja streymleiðing.

Harumframt er í frágreiðing staðfestur soppur í bygninginum. Tilráðing frá teknisku fyrisiting er ikki at taka bygningin í brúk til kvøldskúla, fyrr enn soppatrupulleikin er loystur.

Tá so er, er at meta nyttuleyst at brúka 1,5 mió uppá innrættingar júst nú. Heldur eigur arbeiði at vera sett í gongd at útgreina, hvat loysir seg best at gera, hvat skal gerast av funktiónsmessigum ávum, og hvat kostnaðurin verður.

Mett verður, at fyrireikandi arbeiðið fer at kosta uml. kr. 150.000. Eingin játtan er sett av á íløguætlanini til kvøldskúlan. Mett verður ikki rætt, at kvøldskúlin av rakstri rindar fyri projektfyrireikingar, og tí eigur játtan at verða fingin til vega um íløguætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og tekniski stjóri mæla til at játta kr. 150.000 til:

- At gjørd verður byggitøknilig støðulýsing at fáa greiðu á, hvørjir bygningslutir mugu høvuðsumvælast ella skiftast

- At gjørd verður kravspesifikatión viðvíkjandi nýtslu, hølum o.l. í samstarvi við kvøldskúlan, umframt byggitøknilga kravspesifikatión og myndugleikakrøv
- At gjørd verður umvælingarætlan í stigum, innihaldandi tíðarætlan og kostnaðarmeting sum grundarlag fyri fígging at seta í verk byggiætlanina.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina um at selja bygningarnar.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge, taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, mælir til, at gjørd verður heildarætlan fyri bygningarnar.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

# 110/14 Eigarafelagið undir Kongavarða : tilmæli: Viðtøkur fyri Eigarafelagið undir Kongavarða (2012-1672)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 124/14 | 14/02433-7 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 110/14 | 14/02433-7 |

**Lýsing av málinum:**
"Eigarafelagið undir Kongavarða" biður um góðkenning av grein 16 í viðtøkum fyri Eigarafelagið undir Kongavarða.

Grein 16 ásetur*:*

*Grein 16. Tryggingarviðurskifti*

*Nevndin tekur vegna Eigarafelagið vanliga trygging av hesum bygningum felagsins:*
- *Íbúðarblokkunum*
- *Hitamiðstøð, og*
- *Uttanduraøki, sum er ogn felagsins.*

*Tryggingargjaldið fyri íbúðarblokkarnar verður býtt ímillum og goldið av teimum limum felagsins, sum eiga íbúðir í búðarblokkunum, samsvarandi býtistalinum ásett sambært grein 21. Onnur tryggingargjøld verða býtt millum og goldin av øllum limum felagsins samsvarandi býtistalinum ásett sambært grein 21. Tryggingjargjøldini verða kravd inn frá limum felagsins áðrenn tey fella til gjaldingar"*

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini og byráðnum til at góðkenna grein 16 í viðtøkunum fyri Eigarafelagið undir Kongavarða.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 111/14 Umbýtið millum 135fe, 135ct og 135cø skúlin við Løgmannabreyt, Hoyvík og sundurbýtið av parti av ovara parti við Karlamagnusarbreyt matr. nr. 138a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 54/14 | 14/02447-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 87/14 | 14/02447-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 111/14 | 14/02447-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna biður Umhvørvisstovuna um umbýti, so Skúlin við Løgmannabreyt fær sjálvstøðugt matrikul nummar.
Umbýtið er millum matr. 135fe,135ct 135cø Hoyvík.

Og at sundurbýta ein part av ovara parti við Karlamagnusarbreyt matr. 138a.
Á Karlamagnusarbreyt skal stykki nr. 49-44-47-og 42 sundurbýtast av øki 6.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Karlamagnusarbreyt vinnustykkir liggur í eini sertakari byggisamtykt øki 6.
Skúlin við Løgmannabreyt liggur í A3 í almennari byggisamtykt fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
SMS hevur søkt um byggiloyvi til stykki 42 til at byggja eitt bakarí.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Fíggjarlig viðurskifti**
Kostnað fyri matrikuleringina til Umhvørvisstovuna.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Viðmerkingar frá býarskipanardeildini um at avgerð ikki er tikin heilt um, hvussu fótbóltøkið kemur at síggja út, og tí vil man bíða við teimum niðaru stykkjunum.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**

**Skjøl**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini viðmæla at sundurbýta vinnustykki nr. 49-47-44 og 42 burtur av matr. 138a og at umbýta 135fe, 135ct og 135cø til Skúlan við Løgmannabreyt.

**Tekniska nevnd 30. april 2014**: Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó verður mælt mentamálanevndini til at útvega stykkini nr. 47 og 49 á yvirlitskortinum til serstøku byggisamtyktina, at leggja afturat skúlaøkinum til skúlan við Løgmannbreyt.

Nevndin mælir somuleiðis býráðnum til at broyta byggisamtyktina fyri Karlamagnusarbreyt soleiðis, at stykkini nr. 46, 48, 50, 51, 52 og 53 oman fyri Rólantsgøtu verða løgd til bústaðarbygging.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 7. mai 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd um at útvega sær stykkini nr. 47 og 49.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 112/14 Dagstovnurin Birkilund inniklima

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 07.04.2014 | 25/14 | 14/02485-17 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 139/14 | 14/02485-17 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 112/14 | 14/02485-17 |

Málslýsing:
Í sambandi við eftirlitsvitjan á Dagstovninum Birkilund hevur Arbeiðseftirlitið tikið loftsplátu til nærri kanningar. Kanningarúrslitið gevur ábendingar um, at bygningurin kann vera fongdur við blámusoppi. Eftirlitsvitjanin staðfesti fleiri lekar undir loftinum í bygninginum, og at blettir eru á fleiri loftsplátum. Arbeiðseftirlitið hevur í skrivi givið kommununi boð um at seta í verk støðukanning av fukti og blámusoppi í bygingingum.

Kommunan hevur biðið HMP Consult gera hesa kanning, sum væntandi bera okkum úrslitið um tríggjar vikur.

Fyri tíð síðan, tá ítøkiliga varð arbeitt við at stovnurin skuldi gerast kommunalur, varð gjørd ein støðulýsing til tess at staðfesta, hvørjum standi bygningurin var í. Heitt varð á HMP Consult at gera støðulýsingina, sum varð liðug í mars 2009. Sum avtalað hevur HMP Conslut raðfest og staðfest hvørjar ábøtur vóru átroðkandi, minni átroðkandi og ábøtur, sum mælt varð til blivu gjørdar. Hesar raðfestingar vóru kostnaðarmettar, og sum sæst niðanfyri eiga munandi ábøtur at verða gjørdar á bygningin.

Fyrsta raðfesting inniheldur í høvuðsheitum at skifta takið og alt sum har til hoyrir, eisini loftsklæðingin innanfyri. Eisini eru ábøtur á ventilatiónina við í hesum. Raðfesting 2 inniheldur útvendiga bjálving og klæðing av betongveggunum, og raðfesting 3 er millum annað at skifta hvítvørur og gera aðrar ábøtur á m.a. gólvini.

Niðanfyri er ein uppseting út frá støðulýsingini og tí, sum mett er kemur afturat.

| | |
|---|---|
| Raðfesting 1 | kr 4.683.882 |
| Raðfesting 2 | kr 445.000 |
| Raðfesting 3 | kr 475.000 |
| Samlað | kr 5.603.882 |

Hesi tøl eru uttan ókent, uttan mvg, uttan ráðgeving og eftirlit, uttan prístalsviðgerð og projektumsiting.

Verður Birkilund samanborin við Dagstovnin í Hoyvík, eru ávís viðurskifti, ið ganga aftur. Báðir stovnarnir eru tiknir í brúk í 1983 sum sjálvsognarstovnar, báðir hava havt lekar frá takinum í fleiri ár, betongútveggir eru partvís í báðir bygningunum.

Brúka vit eina samlaða kostnaðarmeting við støði í støðulýsingini frá 2009, kann hetta roknistykkið setast upp:

| | |
|---|---|
| Samlað kostnaðarmeting | kr. 5.603.882 |
| Ókent 30% | kr. 1.681.164 |
| Prístalsviðgerð | kr. 200.000 |
| Samlað | kr. 7.484.046 |

Ráðgevara útreiðslur 12% kr. 898.085
Projektumsiting hjá TK kr 200.000
Samlað uttan mvg kr 8.582.131
Samlað við 6,25% mvg (536.383) **kr 9.118.514**

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri, kunnaði um málið.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
HMP Consult hevur latið kommununi omanfyri nevndu kanning við fleiri tilmælum, sum kommunan síðani hevur virkað eftir. Bráðfeingistilmæli var at tetta allar lekar í tekjuni og við vindeygabond v.m., og at gera eina høvuðsreingerð at fáa sonevndu MM-tølini niður á nøktandi støði. Harumframt at fáa luftskifti at virka optimalt. Eisini var rátt frá at nýta 3 høli.

Hetta eru tó at meta sum fyribils átøk, og sum lýst omanfyri er neyðugt við umfevnandi høvuðsumvæling. Í hesum sambandi hevur umsitingin mett rættast at steingja bygningin í summar, og at børnini fáa dagstovnapláss í øðrum hølum.

Eftir umbøn hevur HMP Consult gjørt kostnaðarmeting fyri høvuðsumvæling. Sum alternativ til hetta er eisini gjørd kostnaðarmeting av at taka bygningin niður og byggja nýggjan stovn í somu stødd.

Høvuðsumvæling av verandi bygningi, við nýggjari tekju, nýggjum klædningi og nýggju tekniskum installatiónum íroknað kravdar dagføringar í m.a. neyðhurðar og rýmingarleiðir er mett til kr. 20-21 mió v/mvg.

Ein niðurtøka og burturbeingin av verandi bygningi, byggja nýggjan bygning í somu stødd og nýgerð av uttanumøki er mett at kosta kr. 33-34 mió v/mvg. Tá er roknað við einum miðal fermetraprísi á kr. 20.000.

Hóast broytingar í barnatalinum, er tørvur á júst hesum stovninum. Hann er millum størstu stovnar í kommununi, og harumframt er hann einasti stovnur aftrat Lítlaskógi, sum serliga hevur eysturbýin sum upptøkuøki.

Ein høvuðsumvæling við nøkrum dagføringum av eitt nú brunaviðurskiftum, konstruktiónstrupulleikum og líknandi er fyribils mett til kr. 20-21 mió v/mvg. Ein høvuðsumvæling vil tó ikki loysa uppá fleiri minni heppin viðurskifti viðvikjandi funktiónum, hvussu góður bygningurin er fyri rørslutarnað, orkunýtslu o.ø.

Ein nýbygging er dýrari, men tá fæst ein stovnur, sum lýkur øll nútíðar krøv, eins og tað eisini gevur møguleika fyri at skipa bygningin á grundini øðrvísi, soleiðis at betri umstøður fáast á útiøkinum.

Neyðugt er tí við prinsippavgerð um, hvørt bygningurin skal høvuðsumvælast ella takast niður og nýggjur byggjast upp í staðin á sama stað. Tað er lítil ivi um, at besta framtíðartryggjaða loysnin bæði í mun til kostnað og funktiónir er at taka bygningin niður og byggja nýggjan stovn, sum er normeraður til nakað sama tal av børnum.

Neyðugt er eisini at gera ætlan fyri, hvussu arbeiðið skal raðfestast í mun til íløguætlanina í øllum førum frá 2013. Eingin íløgujáttan er tøk á grein 3 Børn og ung.

Í mun til at seta fígging av til at fyrireika eina verkætlan, hvørt tað so er høvuðsumvæling ella nýbygging, so kann játtast fáast til vega frá sparingini í sambandi við pedagogverkfallið konta 3215 Aðrar útreiðslur. Har eru kr. 3.673.085 tøkar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á húsaumsitingini mæla til at taka burtur verandi bygning og byggja nýggjan bygning til dagstovnin Birkilund á sama grundøki. Harumframt verður mælt til at játta kr. 3 mió av kontu 3215 Aðrar útreiðslur til at fyrireika byggiverkætlan, og at sett verður bygginevnd.

**Mentamálanevndin 16. mai 2012:** Leiðarin á húsaumsitingini kunnaði um málið. Samtykt at biðja umsitingina um eina gjølla fakliga frágreiðing um støðuna á stovninum til næsta fund.

- Frágreiðing løgd fram.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Nevndin samtykti at mæla til at taka burtur verandi bygning og byggja nýggjan bygning til dagstovnin Birkilund á sama grundøki. Harumframt mælir nevndin til at játta kr. 3 mió av kontu 3215 Aðrar útreiðslur til at fyrireika byggiverkætlan, at sett verður bygginevnd og at avseta pening til byggingina á fíggjarætlanini 2013 og 2014 og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. juli 2012:** Einmælt samtykt.

**Trivnaðarnevndin 7. april 2014:** Samtykt at seta í verk býráðssamtyktina frá 26. juli 2012, at bjóða arkitektauppávuna út alment, at játta tøku upphæddina á íløguætlanini til endamálið og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at mæla býráðnum til at bjóða arbeiðið at høvuðsumvæla bygningin út sum undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar.

**Býráðið 22. mai 2014:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen, Rúni Djurhuus og Heðin Mortensen

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

# 113/14 Søla av matr. nr. 22s, Kaldbak.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 132/14 | 14/02867-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 113/14 | 14/02867-1 |

**Málslýsing:**
Grundstykkið.matr. nr. 22s, við Krossá 5, Kaldbak.

Grundstykkið er ikki útgrivið. Vídd 519 m².

Talan er um grundstykki, sum liggur væl fyri við góðum útsýni.

Stykkið verður mett at vera rættiliga dýrt at gera byggibúgvið.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Prísuppskot | kr. | 200.000,00 | kr. |
| Boð | kr. | 200.000,00 | kr. |

Býráðið samtykti 2. mai 2012 at lýsa stykkini til sølu í fríari sølu og at selja tey, um hóskandi boð fæst.

Í útstykkingini eru 10 grundstykki, harav 6 óbygd grundstykki eru til sølu hjá meklarafelagnum INNI.

Prísuppskot kr. 200.000 pr. grundstykki.

Inni upplýsir at sera fáir fyrispurningar hava verið, men nú er ein áhugaður keypari, sum hevur lagt boð inn upp á stykkið.

Boðið er galdandi til endan av mei 2014.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til, at fíggjarnevndin tekur støðu til innkomið boð.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við innkomnum boði áljóðandi kr. 200.000.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 114/14 Nýggj høli til Kommunufelagið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 115/14 | 14/02980-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 114/14 | 14/02980-1 |

**Málslýsing:**
Stýrið í Føroya Kommunufelag mælir til at farið verður undir at byggja Kommunufelagnum eitt nýtt høvuðssæti. Felagið hevur í boði at keypa eitt grundstykki við Konmansmýru, beint við síðuna av komandi høvuðsbygninginum hjá Bank Nordik.

Ætlanin er, at bygningurin skal verða á leið 650 m2. Samlaði kostnaðurin er mettur at verða uml. 15 mió. kr.

Stýrið mælir somuleiðis til, at bygningurin verður fíggjaður uttan lántøku, men í staðin verður goldin umvegis limagjaldið í 2015 og 2016.

Hetta merkir, at limagjaldið verður áleið tvífalda tvey tey komandi árini.

Talva sum vísir limagjaldið í 2014, umframt limagjaldið í 2015 og 2016 um so er, at íløgan á 15 mió. kr. verður fíggjað umvegis limagjaldið hesi bæði komandi árini, og at limagjaldið annars verður sum í inniverandi ári.

| Kommunur | Limagjald 2014 | Limagjald 2015 | Limagjald 2016 |
|---|---|---|---|
| Tórshavnar | 3.310.107 | 6.396.237 | 6.396.237 |

**Tilmæli:**
Kommunstjórin mælir til at taka undir við at fíggja íløguna umvegis limagjaldi hesi bæði komandi árini og at limagjaldiið annars verður sum í inniverandi ári, sambært omanfyristandandi.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðið 22. mai 2014:** Atkvøtt varð um tilmæli í fíggjarnevndini, ið var samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen, Rúni Djurhuus og Heðin Mortensen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Helena Dam á Neystabø og Tróndur Sigurðsson.

# 115/14 Útleigan av Fríðrik Petersensgøtu 9. Ognin takast fyribils av sølulista

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 140/14 | 14/02986-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 115/14 | 14/02986-1 |

**Málslýsing:**
Fr. Petersensgøta  9 – Avtala um tíðaravmarkað leigumál

Meðan umvælingarnar fara fram í Sjóvinnuhúsinum, mugu leigarar flyta úr Sjóvinnuhúsinum.

Nakrir teirra eru teir áhugaðir í at leiga Fr. Petersensgøtu, meðan umvælingin fer fram.

Talan er um:

Norske Veritas Classification A/S ( Dánjal Vang )
Sp/f Navit. ( Trygdarskeið á sjónum – Sjúrður Guðjónsson )
A/S Knud E Hansen. Skipsverkfrøðingar. ( Maria á Lava )

Teirra verandi leigumál í Sjóvinnuhúsunum umfata í alt 330m2. leiga 500kr/m2/ár. + ljós og hita.

Kommunan hevur ikki verið í realitetssamráðingum við leigararnar enn, men er upplýst at leigararnir hava tørv á leið sama areali sum verandi.

Bygningurin í Fríðrik Petersensgøtu er 3. hæddir á 148 m2 = í alt. 444 m2, men kann viðmerkjast at ein partur av hølunum fer til innanveggja trappuuppgongd +  rá goymsluhøli.

Viðmerkjast kann, at áhugin fyri at keypa Fr. Petersensgøtu hevur verið eingin.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til fyribils at steðga søluna og at leiga FR. Petersensgøtu út til umrøddu leigarar, sambært vanligum treytum, til Sjóvinnuhúsið er liðugt

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at leiga út fyri kr. 900/fermeturin. Málið beint í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 116/14 Møgulig søla Læknahúsini. Matr. nr. 853c, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 145/14 | 14/02991-2 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 116/14 | 14/02991-2 |

**Málslýsing:**
Inni hevur móttikið boð 3. mill. kr. galdandi til 21.05.2014 kl. 16:00

Boðið umfatar:
Læknahúsini matr. nr. 853 c., og
Grannagrundstykkið matr. nr. 853aa.( vídd 824 m2. Er partur av fríøkinum millum Bispagarðin og læknahúsini )

Treytirnar fyri boðnum eru, at boðið verður givið fyri báðar ognirnar undir einum.

At boðgevarin sleppur at sýna og góðtaka húsini áðrenn yvirtøkudag. Um boðgevarin ikki sleppur at sýna húsini, ella ikki metur at húsini liva upp til tað boðgevarin hevur væntað, fellur boðið burtur.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til ikki at taka av boðnum áljóðandi 3. mio. kr, tí mett verður at boðið er ov lágt og grundstykkið matr nr . 853aa er ikki til sølu.

**Fíggjarnevnd 19. mai 2014**: Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka av innkomnum boði og selja ognina, matr. nr. 853C, fyri kr. 3 mió. Samstundis samtykt at boða áhugaða keyparanum frá, at matr. nr. 853aa er ikki til sølu.

**Býráðið 22. mai 2014:** Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Einmælt samtykt.

# 117/14 Tórshavnar Musikkskúli - staðseting av musikkskúlanum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.03.2014 | 54/14 | 14/00918-116 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 65/14 | 14/00918-116 |
| 3 Fíggjarnevnd | | | 14/00918-116 |
| 4 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 117/14 | 14/00918-116 |
| 5 Mentamálanevndin | 22.05.2014 | 126/14 | 14/00918-116 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar Musikkskúla tørvar betri hølisumstøður. Nevndin fyri Musikkskúlan hevur áhaldandi gjørt vart við hendan spurningin, og býráðið hevur javnan havt málið til umrøðu.

Nú er ætlanin at taka málið uppaftur. Í hesum umfarinum verður miðað eftir at fyrireika ætlanir at útvega Musikkskúlanum hølir, sum eru ætlað til endamálið, og at gera av, hvar hesi hølir skula vera.

Áhugin fyri at fáa frálæru í Musikkskúlanum er ovurstórur, og ikki er gjørligt at ganga øllum umsóknum á møti. Hetta er m.a. ein spurningur um, hvørja rakstrarjáttan skúlin hevur. Sum er rinda Mentamálaráðið og kommunan raksturin.

Musikkskúlin húsast í dag í mongum ymsum hølum kring um í býnum. Miðstøðin á Frúutrøð er ein gamal barnaskúli, sum hjálpt er uppá, men sum ikki gevur nøktandi umstøður.

Til tess at fáa gongd á fyrireikingar til at útvega Tórshavnar Musikkskúla tíðarhóskandi karmar verður mælt til at játta pening at fara undir neyðugt fyrireikingararbeiði.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 1041-90-41002, Læknamiðstøð í Hoyvík, til staðseting/fyrireiking av musikkskúla, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyrireikingararbeiðið higartil hevur fevnt um møguliga staðseting av nýggjum Musikkskúla og lýsing av hølistørvi.

Samskiftið hevur verið við Norðurlandahúsið um staðseting á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Norðurlandahúsið tekur væl undir við hesi staðseting, sum tó ikki skal ganga Norðurlandahúsinum ov nær.

Samskiftið hevur eisini verið við Musikkskúlan – bæði leiðara, umboð fyri lærarar og umboð fyri musikkskúlanevndina – um hølistørvin eins og um krøv til slíkan nýbygning sum heild. Skúlin hevur sent umsitingini meting um dagførdan hølistørv.

Til tess at koma meira ítøkiliga víðari skal avtala gerast við ráðgeva um at fáa gjørt dagførda byggiskrá og skitsuuppskot, sum lýsir ymsar loysnir bæði viðvíkjandi staðseting, skapi og byggilistarligum hugskoti. Fyrireikingararbeiðið er grundarlag fyri viðgerð og avgerð um endalig staðseting og víðari tilgongd. Játtan er til endamálið. Setast skal eisini ein bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at sett verður bygginevnd fyri nýggjum Musikkskúla, og at gjørd verður ráðgevaraavtala um byggiskrá, skitsuuppskot v.m.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. juni 2010:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Gunnar Mohr

Í bygginevndina vórðu valdir Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Fyrireikingararbeiðið er nú komið so mikið áleiðis, at byggiskrá skal gerast. Byggiskráin skal lýsa byggiætlanina, herundir rúmskrá, fermetrar og ymisk funktiónskrøv. Sambært politisk-fyrisitingarligu mannagongdini fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal faknevndin biðja um byggiskrá, sum bygginevndin síðani útvegar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at biðja bygginevndina útvega byggiskrá, og at tað í hesum sambandi verður játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukontu 5175.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Mayfinn Norðoy, arkitektur, greiddi frá projektinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukonto 5175.

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi 1. juni 2011 samtykti bygginevndin formliga at senda byggi- og býarskipanarnevndini um mentamálanevndina umbøn um at viðgera og góðkenna staðseting av nýggjum

Musikkskúla á matrikklarnar 1453a, 1410d (lutur I) og 1409 (lutur I), eigari Tórshavnar kommuna, samsvarandi skitsuuppskoti.

Umbønin hjá bygginevndini skal síggjast í ljósinum av, at arbeiðið við skitsuuppskoti og byggiskrá er um at verða liðugt. Bygginevndin hevur alla tíðina arbeitt við staðseting eystanfyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Bygginevndin hevur mett at henda staðseting er væl egnað til Musikkskúla, tí hetta liggur væl fyri í mun til stóru ferðsluæðrirnar, og at Musikkskúlin og Norðurlandahúsið sum nærmastu grannar fara at fáa gagn av hvørjum øðrum serliga í mun til konsertvirksemi og høli.

Sambært galdandi mannagongd fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal byggi- og býarskipanarnevndin góðkenna staðseting, eftir at avvarðandi faknevnd hevur góðkent byggiskránna.

Staðsetingin og byggiskráin eru ikki viðgjørd av umsitingini á Byggi- og býarskipanardeildini undan hesum fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Málið varð útsett.

**Mentamálanevndin 15. juni 2011:** Samtykt at taka undir við bygginevndini og beina málið víðari í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2011**: Tikið av skrá.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið byggiskránna og mælir til at góðkenna hana við fyrivarni fyri, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingini áðrenn útbjóðing.

Bygginevndin mælir somuleiðis til at taka upp samráðingar um høvuðsráðgeva og um prosjektering, at undirráðgevingin verður boðin út, og at játtaðar verða kr. 3.800.000 av íløgujáttanini fyri 2011 á kontu 5175 til prosjektering.

Sambært galdandi mannagongd fyri íløguverkætlanir skal tekniska nevnd viðgera og góðkenna tekniska partin. Mentamálanevndin hevur 15. juni 2011 sambært somu mannagongd beint málið um at góðkenna staðseting til byggi- og býarskipanarnevndina. Sambært kommunustýrisskipani § 11, 2. petti skal tilmæli um íløgur til býráðið ganga um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

Í hesum sambandi er at viðmerkja, at samlaði byggikostnaðurin sambært byggiskránni er ikki játtaður og framgongur heldur ikki fult út í mun til langtíðaríløguætlanina árini 2011-2014, og at ikki kann farast undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við bygginevndini, og at taka upp samráðingar við Kontrast um høvuðsráðgeva og um prosjektering. Undirráðgevingin verður boðin út.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla harumframt til at beina tekniska partin fyri teknisku nevnd at viðgera og góðkenna, og at beina tilmælið um at játta kr. 3.800.000 til

prosjektering av kontu 5175 í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. juni 2011:** Nevndin: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen og Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, tó tekur Annfinn Brekkstein støðu til spurningin um samráðingar um høvuðsráðgeva á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Staðsetingin av nýggjum musikkskúla eystanfyri Norðurlandahúsið, er í byggiskránni grundgivin soleiðis:

*"Staðsetingin er vald útfrá verandi funktiónum í økinum við Kringvarpið og Norðurlandahúsið. Eitt mentunarøki sum við einum musikkskúla afturat sær fer at skapa synergi og eitt spinn off sum verður føroyskum tónleiki at frama.*

*Hølisviðurskiftini í hesum trimum húsum koma at komplementera hvørt annað – bæði í sambandi við tónleikatiltøk og gerandisdag. Ùtvarpshúsið og Norðurlandahúsið hava eisini eina hitaskipan sum musikkskúlin ómakaleyst kann knýta seg uppí."*

Grundøkið fevnir um 3 matriklar og er umleið 9499 m² til støddar:

Matr. nr. 1453a,
Eigari er Tórshavnar Kommuna
Støddin er 7016 m2

Matr nr. 1410d (lutur 1)
Eigari er Tórshavnar kommuna
Støddin er 1726 m2

Matr nr. 1409 (Lutur 1)
Eigari er Tórshavnar kommuna
Støddin er 757 m2

Økið er í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu lagt út sum C2-øki, Opin miðstaðarbygging, við hesi áseting: *"Umráðisparturin er í síni heild lagdur til miðstaðarendamál, serstakliga ætlað stovnum, framsýningarhøllum, samkomuhúsum, tónleikahøllum og øðrum mentunarligum stovnum og tílíkum og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi, skrivstovur, matstovur o.t."*

Byggistigið má ikki fara upp um 0,25 og nettonýtslustigið ikki upp um 0,3.

Býarskipanarumsitingin hevur ikki havt staðsetingarspurningin til ummælis áðrenn byggiskráin er gjørd liðug. Býarskipanarumsitingin hevur ikki viðgjørt staðsetingina undan hesi nevndarviðgerð. Býarskipanarumsitingin ger tí vart við, at aðrar staðsetingar, har slíkt virksemi eisini kundi ligið væl saman við øðrum mentunarligum og/ella undirvísingarvirksemi, sosum Marknagil, Skálatrøð, Vestara Bryggja v.fl. ikki hava verið viðgjørdar av umsitingini. Uttan hesa viðgerð, kann býarskipanarumsitingin sostatt bert vísa til undanfarna álit um staðseting av musikkskúla, sum býráðið áður hevur viðgjørt.

Viðv. tekniska partinum er sambært byggiskránni upplýst fylgjandi:

***"Parkering og atkoma***
*Vísandi til gjøgnumstreymnin av fólki til og frá skúlanum er umráðandi, at aktoman, av- og áseting og parkeringsviðurskiftini eru nøktandi. Nýggju atkomu og parkeringsviðurskiftini verða soleiðis skipað, at hetta verður lagt yvirav innkoyring til Inn, Tórsbreyt og Kurlu. Pláss verður til uml. 40-50 bilastøðlar. Eisini er møguleiki fyri at gera parkeringshús við "grønum plássi" omaná staðsett upp ímóti ringvegnum. Gøta sambindur ferðslu hjá gangandi millum Sundsvegin og Ringvegin. Mentunarligt rekrativt øki verður skipað, hylur við tilknýti til verandi á- Hugsað er um møguleika fyri t.d. uttandura tónleikatiltøkum.*

*Nógv av- og áseting er knýtt at bygninginum, umframt at nógv trýst er í økinum frammanundan- við ferðslu til m.a. Norðurlandahúsið, Inn, Yndi, Kurlu og Tórsbreyt. Hetta skal havast í huga tá atkomuviðuskiftini vera loyst."*

***Tekniskar veitingar***
*Bindast skal í verandi kommunalar vatn- og kloakkskipanir. Kloakk og aðrar leiðingar í jørð verður partur av skipanaruppskotinum"*

Plan- og rakstrardeildin hevur ikki havt tekniska partin til ummælis áðrenn byggiskráin er gjørd liðug. Plan- og rakstrardeildin ger tí vart við, at ætlaninar sambært byggiskránni viðv. ferðsluloysnum, parkeringstørvi, tekniskum veitingum v.m. ikki eru umrøddar við deildina frammanundan. Vísandi til nógva framførsluvirksemi, sum ætlanin er at hava í bygninginum sambært byggiskránni, og nógva framførsluvirksemi í økinum annars (Norðurlandahúsið og Kringvarpið), tekur plan- og rakstrardeildin fyrivarni fyri, at treytir verða settar í samband við byggimálsviðgerð, um fullfíggjaða ferðsluloysn og nøktandi tal av parkeringsplássum í mun til ætlaða virksemi.

Sambært kommunustýrisskipani § 11, 2. petti skal tilmæli um íløgur til býráðið ganga um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

Í hesum sambandi er at viðmerkja, at samlaði byggikostnaðurin sambært byggiskránni er ikki játtaður og framgongur heldur ikki fult út í mun til langtíðaríløguætlanina árini 2011-2014, og at ikki kann farast undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at góðkenna uppskotið til staðseting sambært byggiskránni, og at viðmæla at játta kr. 3.800.000 til projektering av kontu 5175, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at arbeitt verður víðari við fyriliggjandi uppskoti og vísir á fyrivarni fyri, at treytir verða settar í sambandi við byggimálsviðgerð um fullfíggjaða ferðsluloysn og nøktandi tal av parkeringsplássum í mun til ætlaða virksemið. Samtykt at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 3.800.000 til projektering av konto 5175.

**Býráðið 23. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2011:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Útsett.

**Ískoyti:**

Høvuðsráðgevasáttmálin:
Samráðst er við S/pf. Kontrast um sáttmála fyri høvuðsráðgeving, prosjekteringsleiðslu og serráðgeving (akustikk, bruni). Samlaða arkitektráðgevaratilboðið er kr. 2.963.419 v/mvg.

Undirráðgevingin:
Verkfrøðingaráðgevingin uppá berandi konstruktiónir, EL-prosjekt og HVS varð boðin út 10. oktober 2011 við freist at geva tilboð tann 14. oktober 2011.

Hesir fingu í boði at bjóða: P/f. LBF, Sp/f. KJ-Elráð, P/f. SMJ, P/f. HMP, Sp/f. PB Consult og Sp/f. M. Leo.

Tilboð komu inn frá Inn komu P/f. LBF, Sp/f. KJ-Elráð, P/f. SMJ og P/f. HMP. Sp/f. M. Leo ynskti ikki at bjóða. Sp/f. PB Consult hevur gjørt vart við, at teir vegna feriu ikki varnaðust útbjóðingina fyrr enn eftir svarfreistina, og hava biðið um at útseta svarfreistina.

Í útbjóðingarbrævinum varð víst á, at fylgjandi viðurskiftir verða tikin við í metingini av einstaka tilboðnum. Vektingin er líka deild yvir øll punktini:

- Samsýning fyri ráðgevingina
- Bygnaður av virki ráðgevans á hesi uppgávu
- Royndir og førleikar hjá virki og prosjektverkfrøðingi og øðrum persónum

Hesi tilboð eru komin inn:

| **Berandi konstruktiónir** | **P/f. LBF** | **P/f. HMP** |
|---|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 945.355 | kr. 500.000 |
| 2. Fakeftirlit | kr. 204.100 | kr. 200.000 |
| **Samanlagt** | **kr. 1.149.455** | **kr. 700.000** |
| | | |
| Fyrivarni | Byggitíð 18 mðr. | |

| **EL** | **P/f. LBF** | **Sp/f. K.J. El-ráð** |
|---|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 397.396 | kr. 396.000 |
| 2. Fakeftirlit | kr. 115.000 | kr. 118.000 |
| **Samanlagt** | **kr. 512.396** | **kr. 514.000** |

| **HVS** | **P/f. SMJ** |
|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 649.400 |
| 2. Fakeftirlit | kr. 347.500 |
| **Samanlagt** | **kr. 996.900** |
| | |
| Fyrivarni | Byggitíð 12 mðr. |

Við støði í heildarmeting mæla trivnaðarstjórin og tekniski stjórin til at geva umsitingini heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við:

- P/f. HMP um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi berandi konstruktiónum
- P/f. LBF um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi EL
- P/f. SMJ um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi HVS

Fígging:
Lægstu tilboðini fyri ávikavist høvuðsráðgeving og undirráðgeving eru í alt kr. kr. 5.310.796 v/mvg. Harumframt skal roknast við kr. 100.000 til innanhýsis prosjektumsiting og kr. 100.000 til útlegg og ókent.

Samlaður fíggjartørvur til prosjektering er sostatt kr. 5.515.796 v/mvg. Játtaðar eru kr. 3.800.000 til prosjektering, tvs., at tørvur er á írestandi fígging kr. 1.715.796.

**Ískoyti:**
Bygginevndin viðgjørdi málið á fundi 27. oktober 2011. Ein meiriluti í bygginevndini, Jógvan Arge, Annfinn Brekkstein, Jóan Petur Hentze og Heri Olsen, heitir á mentamálanevndina um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering vísandi til, at tilboðini fyri prosjekteringina samanlaggt eru uml. kr. 1.650.000 hægri enn játtaða upphæddin.

Somuleiðis verður mælt til, at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við teir í ískoytinum nevndu ráðgevarar.

Jákup Egholm Hansen boðaði frá, at hann er ikki partur av tilmælinum vísandi til, at hann í skrivi til borgarstjóran 7. oktober 2011 hevur biðið um at verða loystur úr bygginevndini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælunum hjá bygginevndini um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering, og at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við nevndu ráðgevarar.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2011:** Nevndin samtykti at heita á bygginevndina um sum fyrsta stig nú at útvega ummæli/loyvi frá skógfriðingarnevndini til byggiætlanina í Sortudíki at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.

**Ískoyti:**
Kommunan sendi áheitan til skógfriðingarnevndina um viðmerkingar til ætlanina at byggja musikkskúla í Sortudíki. Skógfriðingarnevndin ger í svari vart við, at talan er um óhepna gongd, um opna, grøna lendið millum Norðurlandahúsið og Sundsvegin so við og við verður umskipað til bygt øki. Skógfriðingarnevndin vísir á jaliga týdningin í býarskipanarligum høpi av at varðveita grøna geiran úr Gundadali, um Sortudíki og Ternurygg niðan í Hoydalarnar. Skógfriðingarnevndin mælir kommununi at skipa økið t.d. millum Berjabrekku, Norðara ringveg, Villingardalsvegin og Sundsvegin í serstakari byggisamtykt, áðrenn støða verður tikin til staðseting av nýggjum Musikkskúlabygningi. Skógfriðingarnevndin sendi svarið til yvirfriðingarnevndina.

Eftir samskifti við yvirfriðingarnevndina hevur kommunan sent náttúrufriðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu formliga áheitan um frávik frá § 2, stk. 2 punkt 2) í náttúrufriðingarlógini, har byggjast skal nærri enn 300 m frá teimum viðalundum, ið Føroya viðalundanevnd hevur um hendi. Víst varð í hesum sambandi m.a. á, at sambært góðkendu almennu byggisamtyktini er talan um C2 øki, har aðrar útbyggingar hava verið í sama øki, uttan at viðurskifti, sum hava týdning í mun til náttúrufriðingarlógina, hava verið umrødd í sambandi við hesi byggimálini. Talan er serliga um Norðurlandahúsið og Kringvarpið.

Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu og Yvirfriðingarnevndin hava nú svarað áheitanini játtandi. Í gerðabók Streymoyar Sýslu Náttúrufriðingarnevnd frá fundi 25. juni 2012 stendur m.a.:

"Nevndin viðgjørdi málið og er samd um at viðmæla umsóknini og at gera frávik frá § 2, stk. 2 nr. 2. Á økinum standa frammanundan Norðurlandahúsið og Kringvarp Føroya, og eru fleiri útbyggingar gjørdar síðan ta upprunaligu byggingina av hesum bygningum.

Mett var tí, at placeringin av einum Musikkskúla á sama øki var ein natúrligur partur av ætlanini hjá Tórshavnar Kommunu, og vil Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar Sýslu tí geva sítt loyvi til nevndu bygging.

Nevndin metti heldur ikki, at henda bygging kom at gera nakað inntriv í opna grøna lendið frá Boðanesi um Hoydalar, Ternurygg og niðan til nýggja sambindingarvegin undir Vatnaskørðum, sum Skógfriðingarnevndin vil vera við. Bygningurin kemur ikki at skemma í náttúruni, tvørturímóti er hetta ein sera nútímans og snotiligur bygningur, sum kemur at prýða um í landslagnum."

Á fundi 26. juni 2012 staðfesti Yvirfriðingarnevndin avgerðina hjá Náttúrufriðingar-nevndini fyri Streymoyar Sýslu við tí fyrivarni, at "... der ikke modtages anke inden ankefristens udløb den 24. juli 2012.

Mett verður, at málið og tilmælið, sum varð lagt fyri mentamálanevndina 27. oktober 2011, um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering, og at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við omanfyri nevndu ráðgevarar tí kann takast upp aftur til støðutakan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, vísandi til tilmæli til fund í mentamálanevndini 27. oktober 2011, at útvega írestandi fíggingina til prosjektering v.m. og játta kr. 1.715.796,- av kontu 5175 Musikkskúlin (Løgujáttan), og at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við nevndu ráðgevar.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012**: Einmælt samtykt.

**Bygginevndin og mentamálanevndin 15. januar 2013:** Skipanaruppskotið framlagt. Heitt verður á ráðgevararnar um at fáa kannað undirlendið og fáa til vega neyvari kostnaðarmeting av planeringini sum skjótast. Bygningurin í skipanaruppskotinum er størri enn í byggiskránni, eins og kostnaðurin hægri. Biðið verður um lýsing av, hvør munurin er.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2013:** Útsett.

Nevndarlimur hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013: Útsett.**

**Tekniska nevnd 18. mars 2013: Málið umrøtt.**

**Ískoyti:**
Kontrast hevur latið gera nýggja kostnaðarmeting av handverkaraútreiðslunum. Hildið verður fast við fermetratalið 2.163 í gólvvídd til tess ikki at fáa ov smá undirvísingarhøli. Hinvegin er staðfest ikki neyðugt við sjálvvirkandi brandávaringarskipan (ABA), sum gevur eina sparing uppá kr. 500.000. Aðrar sparingar eru eisini.

Graviroyndirnar hava staðfest ein eykakostnað til grevstur og fyllu uppá kr. 2.500.000 treytað av, at grót verður fingið til vega uttan kostnað. Harumframt er eykakostnaður fyri skifer klæðing kr. 1.800.000.

Handverkaraútreiðslurnar sambært nýggju kostnaðarmetingini eru kr. 42.650.000 íroknað 12% óvist. Hetta skal samanberast við, at kostnaðarmetingin frá 2011 roknaði við kr. 41.800.000. Við eykakostnaðinum fyri grevstur og fyllu og skifer klæðing verða samlaðu handverkaraútreiðslurnar kr. 46.949.040.

Á fundi 11. mars 2013 samtykti bygginevndin at mæla til, at prosjekteringsarbeiðið heldur fram innanfyri karmin í nýggju kostnaðarmetingini uppá kr. 46.949.040.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Samtykt at heita á bygginevndina um sum skjótast at nágreina, við atliti til at byggjast skal fyri í mesta lagi 55 mió. kr.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur havt fund 3. juni 2013, har tillagað skipanaruppskot dagfest 31. mai 2013 varð viðgjørt.

Við støði í samtyktini hjá mentamálanevndini fingu ráðgevararnir boð um eitt tillagað skipanaruppskot fyri upphædd í mesta lagi kr. 39 mió í handverkaraútreiðslum. Bygginevndin varð síðan gjørd varug við, at handverkaraútreiðslurnar sambært ráðgevaraavtaluni er kr. 41,8 mió.

Bygginevndin hevur um tpost 17.-18 mai 2013 viðgjørt støðuna og avgjørt at biðja um eitt tillagað skipanaruppskot fyri upphæddina samsvarandi ráðgevaraavtaluni kr. 41,8 mió í handverkaraútreiðslum.

Sambært skipanaruppskotinum, har støðið er ein bygging uppá 2.042 bruttofermetrar, verða handverkaraútreiðslurnar kr. 41,6 mió íroknað eyka grevstur og fylling, kravd parkeringspláss og skiferklædning av eternit. Ráðgevin kannar loysn við eternit-skifer nærri.

Gjørd er sparing á leið kr. 700.000 í mun til einari optimalari akustik-loysn. Bygginevndin viðmerkti í hesum sambandi, at ein musikkskúli skal hava optimal ljóðviðurskifti, og at ráðgevin í víðari prosjekteringini tekur hædd fyri hesum.

Bygginevndin samtykti skipanaruppskotið at fara víðari til forprosjektering og at senda mentamálanevndini uppskotið til góðkenningar.

**Mentamálanevndin 5. juni 2013:** Nevndin samtykti at góðkenna skipanaruppskotið.

**Ískoyti:**

Bygginevndin hevur á fundi 7. oktober 2013 viðgjørt ymsar spurningar, sum ráðgevararnir og tekniska fyrisitingin hava umrøtt í sambandi við prosjekteringsarbeiðið, og sum hava týdning at fáa avklárað tekniskt og fíggjarliga.

Spurningur er um staðseting av skúlanum á økinum, herundir um skipan av vegatkomu frá Sundsvegnum og parkeringsplássinum eisini við atliti at parkeringsplássinum hjá Norðurlandahúsinum, og yvirflatuvatnviðurskifti, har tað er umráðandi at taka hædd fyri, at stórar nøgdir av vatni fara tvørtur ígjøgnum byggiøkið til skúlan.

Í hesum sambandi verður mett fyrimunur fyri verkætlanina, at ognin matr.nr. 1453b verður keypt og tikin niður. Hetta gevur møguleika at flyta part av skúlanum av ánni og alla bygginina longur burtur frá Norðurlandahúsinum, og at skipa vegatkomu og parkeringsplássið betri eisini við atliti at dagføringini av Sundsvegnum annars.

Bygginevndin samtykti at beina spurningin um møguleikan, at kommunan ognar sær nevndu ogn og at leggja grundøkið aftrat byggiverkætlanini til Musikkskúlan, til mentamálanevndina at taka støðu til.

**Mentamálanevndin 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka málið uppaftur á næsta fundi. Til fundin skal fyriliggja neyv útgreining av avleiðingum og kostnaði v.m., um ognin ikki verður keypt.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2013:** Útsett til næsta fund.

**Bygginevndin 31. oktober 2013:** Umsitingin hevur gjørt nýggja kostnaðarmeting grundað á innkomna prosjektuppskotið. Staðfestast kann, at munandi príshækkingar eru í handverkaraútreiðslunum.

Ráðgevin hevur eisini lýst fyrimunir og vansar við atliti til ferðslu, parkering og skipan av økinum. Bygginevndin staðfestir, at ein loysn, har ognin matr. nr. 1453b verður keypt at taka niður, er frá einum fakligum sjónarmiði best fyri samlaðu loysnina.

Av tí at kostnaðurin er omanfyri ásetta fíggjarkarmin, beinir bygginevndin málið í mentamálanevndina at taka støðu til nýggju kostnaðarmetingarnar, hvør loysn til skipan av økinum skal veljast, og til val av tilfari til klædning.

Eisini skal støða takast til, um framhald av prosjekteringini fyribils skal bíða, til politiska viðgerðin av omanfyri standandi er avgreidd.

**Mentamálanevndin 6. november 2013:** Bogi Andreasen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

Jákup Egholm Hansen, tekniski stjórin, gjøgnumgekk nýggju kostnaðarmetingina hjá bygginevndini.

Niðurstøðan varð at málið eigur at fáa eina skjóta politiska viðgerð.

**Mentamálanevndin 10. desember 2013:** Samtykt at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at hækka íløgukarmin til handverkaraútreiðslur til 48,6 mió samsvarandi kostnaðarmeting dagfest 25. oktober 2013 og bjóða arbeiðið út, tá forprosjekt fyriliggur.

**Fíggjarnevndin 11. desember 2013:** Samtykt at hækka íløgukarmin til samanlagt kr. 67,125 mió. (handverkaraútreiðslur í mesta lagi kr. 48,6 mió.) og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión í fakentreprisu, tá høvuðsprosjekt fyriliggur og at beina málið í býráðið.

**Býráðið fyri læstum hurðum 12. desember 2013:** Einmælt samtykt.

- Nevndarlimur ynskir málið á skrá.

**Mentamálanevndin 6. mars 2014:** Málið varð umrøtt.

Sigrun Mohr var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Málið um staðseting av Musikkskúlanum verður tikið upp til nýggja viðgerð. Víst er á aðrar staðsetingarmøguleikar í Havn enn í Sortudíki, eisini við í størstan mun at brúka verandi prosjekt.[Lagre]

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Málið um staðseting av Musikkskúlanum verður tikið upp til nýggja viðgerð. Víst er á aðrar staðsetingarmøguleikar í Havn enn í Sortudíki, eisini við í størstan mun at brúka verandi prosjekt.

**Mentamálanevndin 22. mai 2014:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Bogi Andreasen, heitir á býráðið um at broyta staðsetingina av Musikkskúlanum til Landavegin, matr.nr. 917.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Halla Samuelsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 22. mai 2014:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Jógvan Arge, um at býráðið samtykkir at staðfesta ta staðseting, sum býráðið áður hevur samtykt fyri musikkskúlan, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Rúni Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, og Heðin Mortensen

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í mentamálanevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 118/14 Luttøka hjá teknisku nevnd á skeiði í NVF í Reykjavík 4. og 5. juni 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.03.2014 | 41/14 | 14/01079-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.03.2014 | 74/14 | 14/01079-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 118/14 | 14/01079-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í døgunum 4. og 5. juni 2014 verður skipað fyri einum seminari, ið tekur støði í ferðsslutrygdini við atliti til súkklur í ferðsluni. Spurningar um millum annað tilgongdina í ferðslutrygdarhøpi í norðurlondum verða umrøddir eins og komið verður inn á avbjóðingina hjá kommunum í vegagerð, tá ið atlit skulu verða tikin millum'bleytar trafikantar' og bilferðsu.

Nú tekniska nevnd skal taka støðu til ferðslutrygdarætlanina, vildi luttøka á hesum skeiði kunnað givið betri førleika at tikið støðu til spurningin.

Sambært kommunustýrisskipan fyri Tórshavnar kommunu § 39, 17. petti kunnu býráðið og føstu nevndirnar taka avgerð um, at kommunustýrislimur kann luttaka á skeiði, kunningarferð, umboðan v.m. bæði innan- og uttanlands. Tá verður samsýning ella endurgjald latið einstøku kommunustýrislimunum eftir reglunum í pkt. 4 í kunngerðini um samsýning.

Ynskir ein nevnd at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av fíggjarnevndini. Er talan um fíggjarnevndina, skal býráðið góðkenna umbønina.

Ynskir býráðslimur at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av avvarðandi nevnd.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Fyriliggur eingin fíggjarlig meting.

Kommunustjórin vísir á, at allur peningur til slíkar útreiðslur hjá nevndum og nevndarlimum á konto 1110 er markaður fyri 2014, og at tøkur peningur sostatt ikki er eftir av játtanini í 2014 til at limir í teknisku nevnd kunnu luttaka á ráðstevnuni.

**Tekniska nevnd 13. mars 2014:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina um at útvega fígging til at tveir limir í teknisku nevnd, Elin Lindenskov og Marin Katrinu Frýdal, at fara á skeið.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Vísandi til, at játtanin fyri 2014 er brúkt, kann fíggjarnevndin ikki vísa á játtan til luttøku á ráðstevnuni.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um málið á skrá.

**Býráðið 22. mai 2014:** Samtykt at beina málið í fíggjarnevndina.

# 119/14 Val av einum limi í nevndina fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 82/14 | 14/02829-5 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 119/14 | 14/02829-5 |

## Málslýsing:
Sambært reglugerðina fyri nevndina er barnabókavørðurin á Býarbókasavninum fastur limur, ein limur er valdur av skúlabókavørðunum við kommunalu skúlarnar í Tórshavn, tveir limir valdir av Tórshavnar býráð og haraftrat er formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs fastur limur og er formaður í nevndini.

**Býráðið 29. november 2012:** Vald vórðu Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

**Ískoyti:**
Sambært grein 5 í reglugerðini fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs er formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs fastur limur og formaður í nevndini fyri barnamentanarheiðurslønina, og harumframt velur Tórshavnar býráð tveir limir í nevndina. Á býráðsfundi 29. november 2012 valdi býráðið Helenu Dam á Neystabø og Bjørg Dam í nevndina, men av tí at Helena Dam á Neystabø er formaður í mentamálanevndini og tískil fastur formaður í nevndini, eigur býráðið at velja ein nevndarlim aftrat.

**Býráðið 21. mars 2013:** Vald varð Sólrun Mikkelsen.

**Ískoyti:**
Ein limur í nevndini er eftir at velja. Talan er um nevndarlim, valdur verður av skúlabókavørðunum við kommunalu skúlarnar í Tórshavnar kommunu.

Skúlabókavørðirnir hava heitt á mentamálanevndina um at gera mannagongd til valið. Sambært mannagongdini, sum mentamálanevndin samtykti á fundi 10. apríl 2014 (j.nr. 14/0713) velur Tórshavnar býráð eftir tilmæli frá mentamálanevndini ein nevndarlim millum virknu skúlabókavørðirnar við kommunalu skúlarnar í Tórshavnar kommunu.

## Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at velja Marin Joensen, lærara og skúlabókavørð í Kollafjarðar skúla.

**Mentamálanevndin 7. mai 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 22. mai 2014:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

# 120/14 Val av limum í nevndina fyri M.A.Jacobsens virðislønina fyri 4 ár (2012-2853)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 120/14 | 14/03013-3 |

**Málslýsing:**
Sambært reglugerðina fyri nevndina velur Rithøvundafelag Føroya ein lim, Fróðskaparsetur Føroya (setursráðið) ein lim og Tórshavnar býráð 3 limir.

**Býráðið 29. november 2012:** Vald vórðu Maria H. Olsen, Erling Isholm og Jákup Jacobsen.

**Ískoyti:**
Maria H. Olsen er flutt uttanlands.

**Býráðið 22. mai 2014:** Valdur varð Hanus Kamban.

## 121/14 Søla av óbygdum sethúsagrundstykki matr. nr. 1145 bu, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 133/14 | 14/02869-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 121/14 | 14/02869-1 |

**Málslýsing:**

**Søla matr. nr. 1145bu, Faksagøta 6. Vídd 500m2.**

Talan er um óútgrivið sethúsagrundstykki á Norðasta Hornið.
Stykkið er rættuliga slætt.
Um bygt verður við kjallara, ber til at fáa útsýnið yvir Havnadal og Velbastaðháls.

Grundstykkið hevur ligið á sølulista hjá INNI í góðar 3. mðr.

Innkomið er eitt boð á kr. 550.000,00 sum er galdandi til 20. mai. 2014 kl. 14:00

Sambært INNI, hevur áhugin fyri hesum grundstykkinum verið lítil. Einans tveir ítøkiligir fyrispurningar hava verið, og hevur bert tann eini áhugaði keyparin lagt boð inn.

Upplýst verður at áhugin at keypa ognir á Norðasta Horni yvirhøvur er minni enn t.d. í Hoyvíkshaganum.

INNI mælir til at selja, um ikki hægri boð kemur innan freist.

**Tilmæli:**
Leiðarin í løgdeildini og kommunustjórin mæla til, at fíggjarnevndin tekur støðu til innkomið boð.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka av innkomnum boði, um einki hægri boð kemur innan freistina.

**Býráðið 22. mai 2014:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Heðin Mortensen

Greiddi ikki atkvøðu: Rúni Djurhuus

## 122/14 Sjálvsognarstovnurin "Íbúðir til ung undir útbúgving": Umsókn um heimild at taka lán

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 91/14 | 14/02777-2 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 122/14 | 14/02777-2 |

Málslýsing:

Í skrivi, dagfest 23. apríl 2014, heitir nevndin í sjálvsognarstovninum "Íbúðir til ung undir útbúgving" á Tórshavnar Býráð um at fáa heimild at taka upp lán til at fremja neyðugar ábøtur á Næmingaheimið undir Fjalli. Í skrivinum stendur m.a.: "Tað er umráðandi at nýta hetta summarið til at skifta vindeyguni. Mett verður ikki, at tað er forsvarligt at fara undir enn ein vetur við gomlum og sera vánaligum vindeygum. Næmingabústaðirnir eru í ov vánaligum standi til endamálið". Víst verður á, at tað er alneyðugt at gera arbeiðið í summar, og neyðugt er at bíleggja vindeyguni nú, tí bíleggingartíð er.

Sambært grein 6 í viðtøkunum fyri "Íbúðir til ung undir útbúgving" krevja lántøka, veðhaldsveitan og onnur skuldbinding og keyp og søla av føstum ognum samtykt frá Tórshavnar Býráð.

Nevndin fyri Næmingaheimið vendi sær í 2010 til Tórshavnar Býráð við fyrispurningi um at taka neyðugt lán til umvælingar, og víst verður til eina frágreiðing, ið gjørd varð í tí sambandi, har niðurstøðan var, at tað var neyðugt at skifta vindeyguni í báðum bygningunum eins og at skifta tekjurnar, umframt at mett varð neyðugt at skifta køkarnar, ið ikki eru endurnýggjaðir, síðan húsini vórðu bygd.

Tilboð eru nú fingin at skifta vindeygu og at leggja nýggja tekju á. Nevndin hevur samtykt at taka av tilboðum, sum eru kr. 812.000 fyri nýggju vindeyguni og kr. 556.000 fyri arbeiðið at skifta tekjurnar. Samlaði kostnaðurin av at umvæla tekju og vindeygu er sostatt kr. 1.368.000, og søkt verður um heimild at taka lán upp til kr. 1.500.000.

Sambært roknskapi hjá Næmingaheiminum er innistandandi pr. 01.04.2014: 380.000 kr.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla til at heimila lántøku.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 22. mai 2014:** Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Einmælt samtykt.

# 123/14 Uppskot til broyting av serstøku byggisamtyktini fyri økið við Markangil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.05.2014 | 133/14 | 14/02888-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 123/14 | 14/02888-1 |

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Í sambandi við skipan av økinum við Marknagil til skúladepil, grundøki til framtíðar fólkaskúla og øki til eina ítróttarhøll, samtykti býráði 11. januar 2011, eina serstaka byggisamtykt (j.nr. 14/02890).

Síðani tað hevur eitt ítróttarfelag, sum fekk loyvi at byggja ítróttarhøll við Landavegin slept ætlan síni, eftir at teir høvdu latið økið planerað, samstundis sum býráðið hevur umraðfest komandi íløgir til hallarbygging. Tí verður ætlanin um at byggja ítróttarhøll við Landavegin útsett. Kommunan hevur yvirtikið planeraða økið frá omanfyri nevnda ítróttarfelag.

Samstundis hevur politiska skipanin tikið málið um staðsetingina av Musikkskúlanum, eystan fyri Norðurlandahúsið í Sortudíki, upp aftur, m.a. orsakað av dýpdini niður á fastan botn og meirkostnaðinum av byggingini, ið hetta hevur við sær.

Í økinum við Marknagil, út ímóti Landavegnum, liggur eitt planerað grundøki, sum kann nýtast til Musikkskúlan, og er tað tætt við ein komandi fólkaskúla (Vesturskúlan) og miðnámsskúlan í Marknagili (Skúladepilin) sum er í gerð.

Ein slík broytt nýtsla av planeraða partinum av ítróttarøkinum við Landavegin til Musikkskúlan viðførir tó, at neyðugt verður at broyta serstøku byggisamtyktina fyri økið við Marknagil, soleiðis at planeraði parturin av øki II til ítróttarbygging, verður broytt til øki III, Miðstaðar- og Bústaðarbygging sum gevur rúm fyri slíkari skúlabygging, meðan restin av øki II framhaldandi verður til ítróttarbygging, men har tað verður nærri ásett, at økið er til bygging av ítróttarhøll til Vesturbýin. Samstundis skal almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu broytast soleiðis, at planeraði parturin av D2-ítróttarøkinum við Landavegin verður broytt til C3-øki (j.nr. 14/02889), meðan restin av D2-ítróttarøkinum verður óbroytt og framhaldandi verður til ítróttarbygging.

**Tekniska nevnd 22. maj 2014:** Vísandi til samtykt í mentamálanevndini tann 22. maj 2014 um staðseting av Musikkskúlanum (j. nr. 14/00918), samtykti ein meiriluti, Elin Lindenskov, Helena D. á Neystabø og Bogi Andreasen, at mæla býráðnum til, at broyta serstøku byggisamtyktina fyri økið við Marknagil, soleiðis at planeraði parturin av øki II til ítróttarbygging, verður broytt til øki III, Miðstaðar- og Bústaðarbygging, meðan restin av øki II verður til ítróttarhøll til Vesturbýin.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

| | TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>22. mai 2014 | Blað nr.: 103<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 124/14 Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri D2-økið við Landavegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.05.2014 | 134/14 | 14/02889-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 124/14 | 14/02889-1 |

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Í sambandi við at politiska skipanin hevur mælt til broytingar við ítróttarøkinum í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil (j. nr. 14/02888), er neyðugt eisini at broyta almennu byggisamtyktina fyri Tóshavnar kommunu samsvarandi.

Umleið helmingurin av D2 økinum við landavegin verður broytt til C3-øki samsvarandi korti dagfest 07.05.2014.

**Tekniska nevnd 22. maj 2014:** Vísandi til samtykt í mentamálanevndini tann 22. maj 2014 um staðseting av Musikkskúlanum (j. nr. 14/00918), samtykti ein meiriluti, Elin Lindenskov, Helena D. á Neystabø og Bogi Andreasen, at mæla býráðnum til, at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at planeraði parturin av D2-økinum til ítróttarbygging verður broytt til C3-øki, meðan restin av D2-økinum verður óbroytt. Víst verður eisini til mál nr. 14/02888.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 125/14 Serstøk byggisamtykt fyri útstykking oman Gil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.05.2014 | 135/14 | 14/03058-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 125/14 | 14/03058-1 |

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Tórshavnar kommuna er í gongd við at fyrireika eina útstykking til sethúsastykkir oman Gil í Hoyvík.

Útstykkingin fevnir um 24 grundstykkir millum 306 $m^2$ og 344 $m^2$ til støddar, tvey fríøkir á 690 $m^2$ og 620 $m^2$ og 14 felags parkeringsøkir á tilsamans 400 $m^2$. Hetta gevur í miðal 401 $m^2$ fyri hvørt grundstykki við felagsøkjum.

Økið liggur í umráðispartinum A3 í 3. grundumráði.

Sambært almennu byggisamtyktini kap. IV, § 6, eru útstykkingar einans loyvdar við serstakari byggisamtykt.

Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt, dagf. 21.05.2014.

**Tekniska nevnd 22. maj 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

# 126/14 Broyting av almennu byggisamtyktini oman Gil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.05.2014 | 136/14 | 14/03057-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 126/14 | 14/03057-1 |

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Tórshavnar kommuna er í gongd við at fyrireika eina útstykking til sethúsastykkir oman Gil í Hoyvík.

Ein partur av økinum, sum útstykkingin liggur á, er í A1 øki og restin liggur í A3-øki.

Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini soleiðis, at øll útstykkingin kemur at liggja í A3-økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at góðkenna uppskotið til broyting í almennu byggisamtyktini, dagf. 21.05.2014.

**Tekniska nevnd 22. maj 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 22:55**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Olsen |
| | Rúni Djurhuus | |